| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>25. november 2021 | Blað nr.: 1101 |
| | Formansins merki: |

# GERÐABÓK

**Dato:** 25. november 2021 **Kl**. 17:00
**Stað:** Býráðssalurin
**Málsnr: 283/21 – 309/21**

**FUNDARLEIÐARI:**
Heðin Mortensen

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Annfinn Brekkstein
Tróndur Sigurðsson
Kári Johansen
Kristianna Winther Poulsen
Súna Mørk
Bjørg Dam
Elsa Berg
Jákup Dam
Annika Olsen
Birgir Nielsen
Ruth Vang
Turið Horn

**LUTTÓKU EISINI:**
Eyðfríð Jacobsen
Eyðna Justinussen
Jóan Petur Hentze
Bogi Jacobsen
Barbara Vang

**LUTTÓKU IKKI:**

**SKRIVARI:**
Bjørgfríð Ludvig

**PROTOKOLLFØRARI:**
Magnus Dam

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>25. november 2021 | Blað nr.: 1102 |
| | Formansins merki: |

**Innihaldsyvirlit** — **Síða**

**Til viðgerðar**


| | | | |
|---|---|---|---|
| 283/21 | 21/00012-1 | Mál beind í nevndir 2021 | 1104 |
| 284/21 | 17/01976-1 | Søla av grundstykki á matr. nr. 5, Norðradalur | 1106 |
| 285/21 | 19/01512-3 | Matr.nr. 139s, Hoyvík. Verandi eigari flytir ognina yvir í nýtt Sp/f sum ætlandi kemur at byggja á grundstykkinum. | 1108 |
| 286/21 | 21/04692-2 | Matr.nr. 255dq, Kirkjubøur.Argir. ( Eigari ynskir at lata grundstykkið innaftur til kommununa ) | 1110 |
| 287/21 | 21/04709-1 | Makaskifti lendi til skiljuhøll og íbúðir | 1112 |
| 288/21 | 19/01609-1 | Lendi til vindmyllulund | 1114 |
| 289/21 | 21/04708-1 | Makaskifti Penapláss og úti í Vika | 1119 |
| 290/21 | 21/04320-1 | Havnar søga og myndasavn | 1121 |
| 291/21 | 16/03741-6 | Stuðulsnevndin fyri svimjihyl í Nólsoy : Umsókn um at TK yvirtekur matr. nr. 126a, Nólsoy móti at tey fáa matr. nr. 147c, 19 ella 92a, Nólsoy til eitt savn til minnis um Ova Joensen | 1123 |
| 292/21 | 14/03408-18 | Nýggjur skúli í vesturbýnum (2012-1064) | 1129 |
| 293/21 | 21/01067-4 | Ljósskipan til Ovara vøll í Gundadali | 1151 |
| 294/21 | 15/03750-9 | Tannlæknastovan : Umbøn ella tilmæli um setan av arbeiðsbólki til útgreinan av framtíðarkarmunum fyri barnatannrøktina (2007-2871) | 1155 |
| 295/21 | 21/04627-1 | Spælipláss á Glaðsheyggi | 1159 |
| 296/21 | 17/01822-1 | Útstykking Stórabrekka | 1161 |
| 297/21 | 21/00641-5 | Almannaverkið : Fyrispurningur um grundøki til búfelagsskap | 1167 |
| 298/21 | 21/03668-1 | Grasagarður - Spælipláss 2021 | 1170 |
| 299/21 | 18/01264-2 | Føroya Ríðingarfelag : Umsókn um trøðna matr. nr. 1156, Tórshavn | 1173 |
| 300/21 | 21/03374-2 | Umsókn um broyting av byggisamtykt á matr. nr. 1122a, Tórshavn | 1176 |
| 301/21 | 21/04189-1 | Broyting av almennu byggisamtyktini fyri matr. nr. 4a til A3 øki, í smb. við útstykking oman fyri Argjahamar | 1178 |
| 302/21 | 21/02196-2 | Uppskot til stuðulslóg til nýggjan uttara ringveg og uppskot til avtalu við TK | 1180 |
| 303/21 | 21/03962-2 | Umsókn um broytan av serstøku byggisamtykt nr. 7 fyri matr. nr. 1314, Tórshavn | 1184 |

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>25. november 2021 | Blað nr.: 1103<br>Formansins merki: |


| | | | |
|---|---|---|---|
| 304/21 | 21/04429-1 | Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Hest | 1186 |
| 305/21 | 21/02256-1 | Broyting av byggisamtykt fyri havnarøkið í Hesti | 1189 |
| 306/21 | 21/00927-1 | Víðkan av sølutorginum í Vágsbotni | 1192 |
| 307/21 | 21/03493-3 | Fíggjarætlan 2022, Tórshavnar kommuna | 1198 |
| 308/21 | 21/00010-1 | Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2021 | 1209 |
| 309/21 | 21/04737-1 | Eykajáttan til ávísar barnaverndarkontur 2020 - 2021 | 1212 |

**Til viðgerðar**

## 283/21 Mál beind í nevndir 2021

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 28.01.2021 | 38/21 | 21/00012-1 |
| 2 Býráðsfundur | 25.02.2021 | 48/21 | 21/00012-1 |
| 3 Býráðsfundur | 25.03.2021 | 74/21 | 21/00012-1 |
| 4 Býráðsfundur | 27.05.2021 | 138/21 | 21/00012-1 |
| 5 Býráðsfundur | 23.06.2021 | 163/21 | 21/00012-1 |
| 6 Býráðsfundur | 30.09.2021 | 207/21 | 21/00012-1 |
| 7 Býráðsfundur | 28.10.2021 | 245/21 | 21/00012-1 |
| 8 Býráðsfundur | 25.11.2021 | 283/21 | 21/00012-1 |

**Upprunin til málið:**

**Lýsing av málinum – samandráttur**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>25. november 2021 | Blað nr.: 1105<br><br>Formansins merki: |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**

**Býráðsfundur 28. januar 2021:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 25. februar 2021:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 25. mars 2021:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 27. mai 2021:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 23. juni 2021:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 30. september 2021:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 28. oktober 2021:** Enmælt samtykt.

**Býráðsfundur 25. november 2021:** Einmælt samtykt

# 284/21 Søla av grundstykki á matr. nr. 5, Norðradalur

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 20.06.2017 | 150/17 | 17/01976-1 |
| 2 Býráðsfundur | 20.06.2017 | 163/17 | 17/01976-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 17.11.2021 | 279/21 | 17/01976-1 |
| 4 Býráðsfundur | 25.11.2021 | 284/21 | 17/01976-1 |

**Málslýsing:**

**Matr. nr. 5, Norðadalur.**
Óútgrivið grundstykki.
Um 500m2.
A1 øki í byggisamtyktini.
Vegur er ikki gjørdur til grundstykkið, men er veg rættur frá Norðadalsvegnum.

Um bygt skal vera á økinum, er neyðugt, at keypari sjálvur ger vegin til grundstykkið, og harumframt eisini leggur tekniskar veitingar, kloakk, vatn og el.

Vegurin verður um 20 metrar til longdar og verður gjørdur inni á lendi hjá Búnaðarstovuni.

Løgdeildin fráboðar beinanvegin búnaðarstovuni um at grundstykkið verður lýst til sølu, og at vegrætturin møguliga verður gjørdur galdandi..

**Tilmæli:**

kommunustjórin og leiðarin í løgdeildini mæla býráðnum til at lýsa grundstykkið matr. nr. 5, Norðadalur til sølu til hægstbjóðandi.

Grundstykkið verður selt sum tað liggur og skal keypari sjálvur taka sær av at fáa gjørt og at rinda fyri øllum teimum viðurskiftum sum eru neyðug í samband við at tað skal bera til at byggja á grundstykkið. Grundstykkið verður selt við vanligum kommunalum bindingum herundir 2 ára byggifreist.

Víst verður til fíggjarnevndarsamtykt 14. juni 2017. Mál nr. 17/01875

**Fíggjarnevndin 20. juni 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 20. juni 2017:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Búnaðarstovan hevur givið møguligum keypara av matr.nr. 5, Norðadalur, tilsøgn um at keypa lendi millum verandi veg, og grundstykkið, og verður henda vegaatkoman ætlandi matrikulerað uppí matr.nr. 5, tá ið keyparin av grundstykkinum, hevur gjørt vegin.

Grundstykkið hevur staðið á sølulista hjá BetriHeim, og er boðið kr. 450.000,00

Onki mótboð kom innan freist.

Grundstykkið verður selt til vanligar kommunalar treytir, og verður ein áseting um at á grundstykkinum er áløgd bústaðarskylda, tinglýst servituttbindandi á grundstykkið, og við átalurætti til Tórshavnar kommunu.

Keyparin er kunnaður um hesar treytir.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni, mæla til at selja grundstykkið fyri hægsta boð áljóðandi kr. 450.000,00

**Fíggjarnevndin 17. november 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. november 2021:** Einmælt samtykt.

# 285/21 Matr.nr. 139s, Hoyvík. Verandi eigari flytir ognina yvir í nýtt Sp/f sum ætlandi kemur at byggja á grundstykkinum.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 10.04.2019 | 98/19 | 19/01512-3 |
| 2 Býráðsfundur | 24.04.2019 | 84/19 | 19/01512-3 |
| 3 Fíggjarnevndin | 17.11.2021 | 281/21 | 19/01512-3 |
| 4 Býráðsfundur | 25.11.2021 | 285/21 | 19/01512-3 |

**Upprunin til málið:** Umsókn frá eigara.

**Lýsing av málinum – samandráttur.**
Matr.nr. 139s, Hoyvík. Vinnustykki á Skarðshjalla. Vídd uml. 1.064m2. Grundstykkið liggur óbygt. Søluskeytið var tinglýst 16.07.2018. Søluprísur kr. 1.383.200,00

Verandi eigari søkir um at fáa flutt grundstykkið yvir í nýtt Sp/f

Ætlanin er at grundstykkið verður í øðrum felagið, sum síðani kemur at byggja og reka bygning á grundstykkinum. Rakstrarfelagið leigar síðani bygning/ ella part av bygningi við uttanum øki frá hesum felag.

Sambært grein 3. stykki d. og. e, hevur eigarin byggiskyldu, og skal bygging verða liðug 4 ár eftir at klárt er at byggja á stykkinum. Kommunan kann krevja sær ognarrættin til stykkið um keypari ikki heldur nevndu ásetingar.

Víðarisøluskeytið verður við somu serivuttum sum uppruna skeytið og verður stykkið selt fyri kr. 1.383.200,00 sum er samsvarandi upprunaprísinum.

**Lógir, ásetingar o.a.** Kommunustýrislógin.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum.** Frávik ímun til tinglýstan servitutt.

**Umhvørvisárin.** Ongi.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**Ongar.

**Skjøl.** Kortskjal, umsókn.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|

| | Býráðsfundur<br>25. november 2021 | Blað nr.: 1109<br><br>Formansins merki: |
|---|---|---|

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☐ **Nei** ☒

**Tilmæli**: Kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni, mælir til at góðkenna at ognin matr. nr. 139s, Hoyvík verður seld til nýtt sp/f. sí málslýsing.

**Fíggjarnevndin 10. apríl 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 24. apríl 2019:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti.**

Verandi eigari byggir ein vinnubygning á grundstykkið ( sí mál 19/04183) Upplýst verður at bygningurin er nærum liðugur.

Eigarin hevur avgjørt at lýsa grundstykkið við ástandandi bygningi í ger til sølu.

Sambært grein Grein 3. punkt d, er millum annað tinglýst sum servituttur, at eigarin kann ikki selja stykkið víðari uttan góðkenning frá seljara, fyrrenn byggingin er fullfíggjað.

**Tilmæli:**

Kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni mæla til at góðkenna viðarisølu av matr.nr. 139s, við ástandandi bygningi í gerð.

**Fíggjarnevndin 17. november 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið

**Býráðsfundur 25. november 2021:** Einmælt samtykt.

Birgir Nielsen luttók ikki í viðgerðini av málinum vegna ógegni.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>25. november 2021 | Blað nr.: 1110 |
| | Formansins merki: |

## 286/21 Matr.nr. 255dq, Kirkjubøur.Argir. ( Eigari ynskir at lata grundstykkið innaftur til kommununa )

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 17.11.2021 | 282/21 | 21/04692-2 |
| 2 Býráðsfundur | 25.11.2021 | 286/21 | 21/04692-2 |

**Upprunin til málið.** Eigari hevur keypt bústað, og ynskir at lata grundstykkið innaftur til kommununa.

**Lýsing av málinum.**

Matr. nr. 255dq, Kirkjubøur,Argir. Vídd 400 m2. Keypsprísur 682.000,- Skeytið tinglýst 28.04.2020.

Grundstykkið liggur í útstykkingini Klingurstjørn 2.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl. Kort. Umsókn. Skeyti.**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☒ **Nei** ☐

**Tilmæli:** Kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni mæla til at keypa stykkið aftur, og síðani at luta stykkið út millum teirra sum enn ikki hava fingið grundstykkið tillutað í útstykkingini Klingurstjørn 2.

Sølan verður ætlandi avgreidd sum viðarisøla, soleiðis at tað slepst undan tinglýsingargjaldi.

**Fíggjarnevndin 17. november 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. november 2021:** Einmælt samtykt.

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>25. november 2021 | Blað nr.: 1112<br><br>Formansins merki: |

# 287/21 Makaskifti lendi til skiljuhøll og íbúðir

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 17.11.2021 | 285/21 | 21/04709-1 |
| 2 Býráðsfundur | 25.11.2021 | 287/21 | 21/04709-1 |

**Upprunin til málið**
Ætlan at byggja skiljihøll til Brennistøðina á Sandvíkarhjalla at skilja burturkast í.

**Lýsing av málinum**
Á uppskotinum til fíggjarætlan fyri 2022 eru settar av 5 milliónir krónur til eina skiljihøll til burturkast til Brennistøðina á Sandvíkarhjalla. Pláss er ikki á lendinum hjá Brennistøðini til slíka skiljihøll, og neyðugt verður tí at fáa til vega lendi aðrastaðni á Sandvíkarhjalla til ætlaðu skiljihøllina.

Samskifti hevur verið við eigaran av matr. nr. 1od, Hoyvík um ætlanirnar hjá Tórshavnar kommunu, og er eigarin sinnaður at lata kommununi grundøki til skiljihøllina í einum makaskifti við annað lendi, ið umsøkjarin kann byggja íbúðir á.

Fingnar eru til vega virðismetingar av matr. nr. 1od, Hoyvík, 1107 og 1108, Tórshavn, og er eigarin av matr. nr. 1od sinnaður at gera eina avtalu um makaskifti av nevndu ognum.

Matr. nr. 1107 og 1108 liggja í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu í A2-øki, ið er lagt av til høga bústaðarbygging. Verður makaskifti framt, ætlar eigarin av matr. nr. 1od at byggja íbúðarhús í fleiri hæddum á matr. nr. 1107 og 1108, Tórshavn.

Ætlandi verður vegatkoma til ognirnar eftir Grásteinsgøtu. Ætlanin er at leggja frílendi á parti av matr. nr. 1166c, ið liggur niðanfyri 1107, og eisini fer kommunan í sambandi við eitt møgulig makaskifti at treyta sær, at gøtufarleið verður knýtt í Rossagøtuna, oman gjøgnum 1107 og 1166c og bundin í Marknagilsvegin.

Tórshavnar kommuna treytar sær harumframt í sambandi við eitt møguligt makaskifti, at komandi eigarin av matr. nr. 1107 og 1108 ger gjøgnumkoyrandi veg gjøgnum báðar ognirnar og yvir til matr. nr. 1170, ið kommunan eisini eigur, og sum somuleiðis liggur í A2-byggisamtyktarøkinum, har byggjast kunnu íbúðarhús í fleiri hæddum. Sostatt tryggjar kommunan sær, at tað ber til uttan kostnað fyri kommununa at knýta eina komandi íbúðarbygging á matr. nr. 1170 í vegin, ið gongur gjøgnum 1107 og 1109.

Matr. nr. 1od, Hoyvík, er til víddar 8.112 m².
Matr. nr. 1107, Tórshavn, er til víddar 12.751 m².
Matr. nr. 1108, Tórshavn, er til víddar 7.577 m².

Við ætlaða makaskiftinum fær kommunan matr. nr. 1 od, Hoyvík, ið er til víddar 8.112 m², og núverandi eigarin av matr. nr. 1od, fær matr. nr. 1107 og 1108, ið tilsamans eru til víddar 20.328 m² umframt umleið 2.000 m² av matr. nr. 1166c til fríøkið til komandi íbúðarhúsini á ognunum omanfyri.

Av tí at munur er á víddini á lendinum, ið partarnir ávíkavist lata og fáa við makaskiftinum, er avtalað, at núverandi eigari av matr. nr. 1od, Hoyvík, rindar Tórshavnar kommunu 4 mió. kr. fyri ta størru víddina, ið eigarin fær í sambandi við makaskifti.

Tá er hædd tikin fyri, at komandi eigarin og útstykkjarin av matr. nr. 1107 og 1108 tekur á seg allan kostnað av at gera veg eftir Grásteinsgøtu, gjøgnum matr. nr. 1108 og 1107 og yvir til matr. nr. 1170, Tórshavn, sum kommunan uttan kostnað kann binda í seinni, tá ið útstykkjað verður á matr. nr. 1170.

Aðrar kommunalar treytir í sambandi við útstykkking á matr. nr. 1107 og 1108 verða settar í sambandi við eina komandi byggimálsviðgerð. Tað verið seg treytir um teknisk viðurskifti s.s. kloakk, burturbeining av yvirflatu- og spillvatni v.m.

Sambært kunngerð um alment útboð av kommunalari fastogn skal kommunal fastogn bjóðast út alment, áðrenn ognin verður seld. Í § 2, stk. 2 er undantak frá hesi reglu, ið ásetur, at vikið kann verða frá hesum kravi við góðkenning frá landsstýrismanninum í sambandi við makaskifti.

Eitt møguligt makaskifti er sostatt treytað av góðkenning frá Umhvørvis- og vinnumálaráðnum/kommunala eftirlitinum.

**Lógir, ásetingar o.a.**

Kunngerð nr. 122 frá 22. Desember 2000 um alment útboð av kommunalari fastogn.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
21/01810 - Brennistøðin, høll til skiljing, endurnýtslu, knúsing o.a

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
Virðismetingar av ognunum matr. nr. 1od, Hoyvík, 1107, 1108 og 1170, Tórshavn.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:** Kommunustjórin, tekniski stjóri og deildarleiðarin á Stjórnarskrivstovuni mæla til at makaskifta ognina matr. nr. 1od, Hoyvík, við ognirnar 1107 og 1108, Tórshavn, ið Tórshavnar kommuna eigur, treytað av góðkenning frá Umhvørvis- og vinnumálaráðnum/kommunala eftirlitinum.

**Fíggjarnevndin 17. november 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. november 2021:** Einmælt samtykt.

## 288/21 Lendi til vindmyllulund

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 10.04.2019 | 115/19 | 19/01609-1 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 15.05.2019 | 95/19 | 19/01609-1 |
| 3 Tekniska nevnd | 16.05.2019 | 34/19 | 19/01609-1 |
| 4 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 16.05.2019 | 26/19 | 19/01609-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 23.05.2019 | 149/19 | 19/01609-1 |
| 6 Býráðsfundur | 23.05.2019 | 102/19 | 19/01609-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 20.10.2021 | 243/21 | 19/01609-1 |
| 8 Býráðsfundur | 25.11.2021 | 288/21 | 19/01609-1 |

**Upprunin til málið:**
Tórshavnar kommuna hevur fingið umsóknir til lendi til vindmyllulund í Flatnahaga ísv. útboð hjá Umhvørvisstovun/Orku at knýta vindorku í eltnetið hjá SEV.

**Lýsing av málinum – samandráttur**

**Lógir, ásetingar o.a.**
**Kommunustýrislógin**
**Kunngerð um útboð at kommunalari fastogn**
**Elveitingarlógin**

**Upplýsingar frá umsitingini**
Tórshavnar kommuna hevur móttikið tvær umsóknir um at leiga lendi í Flatnahaga til vindmyllulund.

Sp/f Røkt hevur fyri stuttari tíð síðani søkt Umhvørvisstovuna – Orku – um framleiðslu av ravmagni av 18 MW í Hoyvíkshaganum. Sp/f Røkt hevur bindandi avtalu við bóndan um atgongd til Hoyvíkshagan.

Eftir elveitingarlógini skal Orka, um umstøðurnar í umsóknini tala fyri, at umsóknin eigur at verða viðgjørt, lýsa alment, um onnur áhugað ynskja at søkja um sama loyvi. Freistin fyri slíkum útboði er 60 dagar, og skulu møgulig tilboð vera Umhvørvisstovuni í hendi í seinasta lagi 14. juni 2019.

Treytirnar fyri at luttaka í útbjóðingini hjá Umhvørvisstovuni eru hesar:

Í sambandi við umsóknir um loyvi, sambært omanfyri nevnda, er neyðugt, at umsøkjarin kann vísa á eitt øki (við váttan frá jarðaeigara), har vindmyllurnar kunnu setast, og eisini skal umsøkjarin kunna útvega onnur neyðug loyvi, eitt nú loyvi frá náttúrufriðingarmyndugleikum og loyvi frá viðkomandi kommunu. Eisini skulu umhvørvisárinsmetingar gerast sambært § 16 í elveitingarlógini, og hesar skulu góðkennast av Umhvørvisstovuni.

Vindviðurskiftini á staðnum skulu verða væl lýst, t.d. við vindmátingum helst fyri 1 ár, ella við øðrum upplýsingum, sum kunnu javnmetast við vindmátingar.

Harumframt er tað ein treyt, at viðkomandi umsøkjari kann vísa á neyðugan tekniskan førleika og harundir møguligar royndir innan elveiting, og umsøkjarin skal hava váttan frá peningastovni um tøka fígging til ætlanina.

Feløgini, ið ynskja at leiga lendi frá Tórshavnar kommunu, ynskja at vera við í hesari útbjóðing, men hava ikki møguleika at fáa atgongd til Hoyvíkshagan í hesum sambandi.

Søkt verður tí um møguleikan at seta vindmyllur upp í Flatnahaga og fáa ein leigusáttmála við kommununa, ið er treytaður av, at felagið vinnur útboðið hjá Umhvørvisstovuni um at framleiða í økinum.

Býarskipanarliga og umhvørvisliga er spurningurin um eina møguliga vindmyllulund í Flatnahaga ikki lýstur. Áðrenn loyvi verður givið, má ein neyv lýsing gerast av avleiðingunum av at leggja nevnda økið av til vindmyllulund.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
J. nr. 19/01460
J. nr. 19/01443

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**
Verða lýst nærri.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:** Kommunustjórin og tekniski stjórin mæla fíggjarnevndini til at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina og náttúru- og umhvørvisnevndina við atliti til spurningin um, hvørt lendið skal leggjast av til vindmyllulund í Flatnahaga. Málið, herundir útbjóðingartreytir, verður at leggja fyri aftur fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 10. apríl 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina og Náttúru- og umhvørvisnevndina.

**Ískoyti:**
4 umsóknir eru komnar um at fáa atgongd til lendi at seta upp vindmyllur.
Hesar eru:

1. Felag søkir um byggiloyvi til 6 vindmyllur í Hoyvíkshaganum (Gellingarklett) við veingjadiametri á 82 m, samlaða hæddin verður uml. 120 m. Felag hevur avtalu við festaran, og onnur fáa ikki tilsøgn um sama øki.
2. Felag søkir um atgongd til Flatnahaga til vindmyllur. Ynski er at leiga ml 20.000 og 30.000 fermetrar íroknað 1500 metrar veg, treytað av at felagið vinnur útboðið. At fáa leigusáttmála í fyrsta umfari í 20-25 ár, við møguleika at leingja, um framleiðsluloyvið verður longt.

3. Felag søkir um tilsøgn um leigu av lendi í Flatnahaga. Ætlanin er at seta 4 myllur upp av slagnum ENERCON E82, sum eru 78 m høgar og við einum veingjabreiði á 82 m. Atkomuvegurin verður okkurt um 4,5 m breiður, og hvørt vindmylluupláss er okkurt um 1035 $m^2$.
4. Felag søkir um prinsipielt byggiloyvi til vindmyllur í Húsa- og Flatnahaga. Talan er um 7 myllur av slagnum ENERCON E44, ið verða staðsettar í Húsahaga, sum víðkan av verandi vindmyllulund. Harumframt er ætlanin at seta 4 størri myllur upp á Bøllureyni, vestan fyri Oyggjarvegin av slagnum ENERCON E82. Vindmyllurnar verða knýttar í koplingarstøðina á Húsareyni, og verða kaðalar lagdir í atkomuvegin, sum verður 4,5 m breiður og 2420 m til longdar.

Tórshavnar kommuna er eigari av økinum í Húsahaga. Festari á økinum hevur viðmælt, at økið verður leigað út til vindmyllulund, men ynskir at ríðigøtan verður umløgd, so hon ikki fer ígjøgnum vindmyllulundina.

Á økinum í Flatnahaga er teknisk útgerð, sum Arktisk Kommando hevur ræði á og hava leigusáttmála av lendinum. Tryggjast má, at vindmyllulundin ikki órógvar virksemið hjá Arktisk Kommando.

Vindmyllurnar, ætlanin er at seta upp, hava veingjabreiði á 82 m, sum er nærum dupult so stórt sum á verandi vindmyllum í Húsahaga.
Tryggjast má, at virksemið ikki hevur skaðilig árin á drekkivantsbrunnin, sum liggur í økinum niðanfyri.
Økið, biðið verður um, er sambært kommunuætlanini ikki partur av býarvakstrarøki áðrenn 2030. Tó kann hugsast, at økið sum frálíður verður partur av býarvakstrarøki.
Tryggjast má, um umsóknin verður játtað, at økið kann inndragast aftur, og at umsøkjari ruddar alla útgerð og bygging av økinum, um Tórshavnar kommuna hevur aðrar ætlanir á økinum.
Neyðugt verður at gera serstaka byggisamtykt fyri økið, har loyvt verður at byggja vindmyllur av hesari stødd.

Umsitingin hevur havt fund við umsøkjarar um málið.
Upplýst verður, at livitíðin av einari vindmyllu er 20-25 ár, og verður tí mett hóskandi, at leigusáttmálin verður gjørdur fyri 20-25 ár, við møguleika fyri at siga upp ella leingja, so hann hóskar til livitíðina

**Tilsøgn um lendi:**
Umsøkjari skal sambært útbjóðingartreytunum hava tilsøgn um lendi við í sínum tilboði.
**Flatnahagi:** Tilsøgn um lendi fyri Flatnahaga verður ikki knýtt at einstøkum umsøkjarum, men at útboðnum, soleiðis at fleiri kunnu bjóða uppá sama øki, so kann tann sum vinnur útboðið gera leigusáttmála við Tórshavnar kommunu við omanfyri nevndu treytum.
**Húsahagi:** Festarin hevur givið bindandi tilsøgn um lendi fyri Húsahaga (Gellingarklett) til eitt felag.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Umhvørvisstovan/orka arbeiðir áhaldandi við at gera fleiri øki klár til útboð av vindorku.

Eitt øki, sum seinastu árini hevur verið klárt til at gera útboð á, er Hoyvíkshagin norðan fyri Havnina, sum hevur mark til Húsahaga og vindmyllulundina har.

Men júst í hesum haganum, sum er landsjørð, hava eitt felag og festarin gjørt eina avtalu, sum ger at Umhvørvisstovan ikki hevur havt møguleika at gera útboð har.

Umhvørvisstovan arbeiðir við at fáa viðurskiftini broytt, so til ber at gera útboð, sum øll hava møguleika at bjóða uppá.

Umsóknir:
J. nr. 19/01208 umsókn frá felag um byggiloyvi at reisa vindmyllur í Hoyvíkshaganum (Gellingarklett) tilhoyrandi Hoyvík
J. nr. 19/01443 Umsókn frá felag um atgongd til Flatnahaga til vindmyllur
J. nr. 19/01979 Umsókn frá felag um tilsøgn at leiga lendið í Flatnahaga til vindmyllur
J. nr. 19/01980 Umsókn frá felag um prinsipielt byggiloyvi til vindmyllur í Húsahaga/Flatnahaga

**Umhvørvisárin:**
Útbygging av grønari orku, minkar um brúk av dálkandi orkukeldum.
Umsóknin lýsir við myndum, hvussu útsjóndin verður frá fleiri sjónarhornum.
Mett verður, at útsjóndin hóskar væl til heildarmyndina saman við verandi vindmyllulund.
Kannast skal um serlig lívfrøðilig viðurskifti eru á økinum, sum atlit skulu takast til.

**Skjøl:**
Skjøl verða løgd fram á fundinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at tilsøgn verður givin til at vindmyllur kunnu byggjast á økini sum søkt verða um, treytað av at loyvið fæst frá avvarðandi myndugleikum, at byggisamtyktin verður broytt og eftir omanfyri standandi treytum og at málið verður beint í býráðið umvegis teknisku nevnd, náttúru- og umhvørvisnevndina og fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 15. mai 2019:** Umboð fyri allar tríggjar umsøkjarar vóru á fundinum og greiddu frá teirra ætlanum.

Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Tekniska nevnd 16. mai 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.
Annfinn Brekkstein luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 16. mai 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 23. mai 2019:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini, teknisku nevnd og náttúru- og umhvørvisnevndini við treytum, ið verða at áseta nærri, tá ið greitt er, hvør hevur vinnandi boðið, herundir treytum um, at verandi gøtusamband í økinum verður endurskapað í sambandi við, at vindmyllur verða settar upp í økinum.

**Býráðsfundur 23. mai 2019:** Einmælt samtykt.

Annfinn Brekkstein boðsaði frá, at hann metti seg vera ógegnigan at luttaka í viðgerðini av málinum, og býráðið tók til eftirtektar, at hann fór av fundi, meðan málið varð viðgjørt.

**Ískoyti.**

P/F Flatnahagi hevur vunnið útboðið hjá Umhvørvisstovuni ( Orka ) um eina 18 MW Vindmyllulund í Flatnahaga.

Umsitingin hjá kommununi hevur gjørt eitt uppskot til leigusáttmála sum er galdandi í 20 ár. J.nr. 19/01609-10 og kortskjal J.nr. 19/01609-9.

Upprit um prísáseting av lendi til vindmyllulund í Flatnahaga. J. nr. 19/01609-8

**Tilmæli:** Kommunustjórin og leiðarin á løgdeildini, mæla byráðnum til umvegis fíggjarnevndina, at góðkenna 20 ára leigusáttmála, við P/F Flatnahagi um leigu av lendi til eina 18MW vindmyllulund. Sí j. 19/01609-10.

**Fíggjarnevndin 20. oktober 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og gera 20 ára leigusáttmála við P/F Flatnahaga við eini árligari leiguupphædd áljóðandi kr. 558.000.

**Býráðsfundur 25. november 2021:** Samtykt við 12 atkvøðum fyri, einari blankari og ongari ímóti**.**

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Elsa Berg, Jákup Dam, Turið Horn, Annika Olsen, Birgir Nielsen og Ruth Vang.

Blankt atkvøddi: Kári Johansen

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>25. november 2021 | Blað nr.: 1119<br>Formansins merki: |

## 289/21 Makaskifti Penapláss og úti í Vika

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 17.11.2021 | 284/21 | 21/04708-1 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 22.11.2021 | 229/21 | 21/04708-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 24.11.2021 | 309/21 | 21/04708-1 |
| 4 Býráðsfundur | 25.11.2021 | 289/21 | 21/04708-1 |

**Upprunin til málið**
Ynski frá borgarstjóranum og formanninum í byggi- og býarskipanarnevndini at skipa fríøki við Pena Pláss sum kommunalt frílendi við uppihaldsøki.

**Lýsing av málinum**
Tórshavnar kommuna og eigarin av matr. nr. 655, Tórshavn hava á fundi 6. Oktober 2021 umrøtt møguleikan at makaskifta ognirnar matr. nr. 655, Tórshavn, við ástandandi seyðahúsi og part av matr. nr. 1077, Tórshavn somuleiðis við ástandandi seyðahúsi.

Fyri Tórshavnar kommunu er endamálið við makaskiftinum at fáa til vega lendi, ið kann binda vegin Yviri við Strond við fjøruna og at skipa eitt grønt uppihaldsøki á frílendinum á matr. nr. 655, Tórshavn, ið er privat ogn.

Matr. nr. 655 verður eisini nevnt Penapláss og er náttúruvakurt øki, ið er væl egnað til kommunalt frílendi við gøtum, benkrum, útsýnis- og uppihaldsplássi.

Ynski hjá eigaranum av matr. nr. 655 er afturfyri at fáa part av matr. nr. 1077, Tórshavn, ið er trøð í Vika, ið Tórshavnar kommuna eigur. Eigarin av matr. nr. 655 eigur eisini trøðna 1075, ið er grannatrøð hjá matr. nr. 1077, og ætlanin er at leggja hesar báðar traðarlutirnar saman í ein lut.

Sum treyt fyri makaskiftinum hevur eigarin av matr. nr. 655 sett fram ynski um, at hann fær heldur størri lendi frá Tórshavnar kommunu, enn hann letur Tórshavnar kommunu við makaskiftinum. Ítøkiliga er ynski um at fáa 7.375 m² afturfyri matr. nr. 655, ið er til víddar 2.715 m².

Orsøkin til víddarmunin er, at hetta er fyri at kunna leggja hóskandi part av trøðni – býtt longs eftir trøðni har skúrurin stendur – saman við grannatrøðni á matr.nr. 1075 og fyri at taka hædd fyri, at jarðarstykkið matr. nr. 655, Tórshavn, hevur serliga staðseting út til sjógvin og serligan áhuga fyri kommununa í mun til gøtu og frílendisætlan.

Sambært kunngerð um alment útboð av kommunalari fastogn skal kommunal fastogn bjóðast út alment, áðrenn ognin verður seld. Í § 2, stk. 2 er undantak frá hesi reglu, ið ásetur, at vikið kann verða frá hesum kravi við góðkenning frá landsstýrismanninum í sambandi við makaskifti.

Eitt møguligt makaskifti er sostatt treytað av góðkenning frá Umhvørvis- og vinnumálaráðnum/kommunala eftirlitinum.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Kunngerð nr. 122 frá 22. desember 2000 um alment útboð av kommunalari fastogn.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Kortskjal: Skipanaruppskot av fríøkinum matr.655 við ”Penapláss”
Kortskjal: Skipanaruppskot av fríøkinum matr.655 við ”Penapláss” v. teksti

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☐ **Nei** ☐

**Tilmæli:** Kommunustjórin og deildarleiðarin á stjórnarskrivstovuni mæla til at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Fíggjarnevndin 17. november 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla nevndini til at makaskifta og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 22. november 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 24. november 2021:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. november 2021:** Einmælt samtykt.

# 290/21 Havnar søga og myndasavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 20.10.2021 | 246/21 | 21/04320-1 |
| 2 Býráðsfundur | 28.10.2021 | 249/21 | 21/04320-1 |
| 3 Mentamálanevndin | 03.11.2021 | 273/21 | 21/04320-1 |
| 4 Býráðsfundur | 25.11.2021 | 290/21 | 21/04320-1 |

**Upprunin til málið**
Havnar søga er skrivað og givin út í fleiri umførum. Tær fyrstu tvær bøkurnar komu út í 2004, síðan komu bøkurnar 3, 4 og 5 í 2009.

Túsundtals fotomyndir liggja goymdar teldutøkar í telduskipanunum hjá Tórshavnar kommunu. Hesar eru ikki skipaðar í eitt savn, sum kann varðveita myndirnar fyri eftirtíðina, og kommunan hevur tí biðið um uppskot frá fotografi um, hvussu hetta arbeiðið kann skipast Eitt uppskot er fingið til vega, og fotografurin bjóðar sær til at fara í gongd við arbeiðið at seta upp eina skipan, sum myndirnar kunnu goymast í. Ætlanin er at skipanin skal nýtast bæði til eldri myndir og nýggjar myndir, ið verða tiknar í kommunalum høpi.

**Lýsing av málinum**
Havna søga bind 6 er nú klár til endaliga prenttilgerð og prenting í 1200 eintøkum, harumframt verður skotið upp at prenta umleið 500 eyka eintøk av bind 1 og umleið 300 eintøk av bind 2. Onki er eftir av bind 1 og lítið av bind 2. Kostnaðurin fyri prent v.m. er mettur til umleið 500 tkr.

Í sambandi við myndasavnið verður mælt til, í eini royndartíð á tríggjar mánaðir, at seta 150 tkr. av til hetta arbeiðið. Hetta tíðarskeið skal brúkast til at fáa til vega yvirlit yvir vavið á samlaðu uppgávuni og hvussu loysnin tekniskt og á annan hátt skal síggja út. Eftir hetta verður støða tikin til, hvussu arbeiðið skal skipast framyvir.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís øki í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☐ **Nei** ☐

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og miðfyrisitingarstjórin mæla til at játta 500 tkr. til Havnar søgu og 150 tkr. til myndasavn av konto 20910 aðrar útreiðslur á konto 5366 stuðul annars.

**Fíggjarnevndin 20. oktober 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið sum eykajáttan, ið krevur tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 28. oktober 2021:** Einmælt samtykt við fyrstu viðgerð og málið beint til aðru viðgerð.

**Ískoyti:**
Bókadeild Føroya Lærarafelags hevur vegna kommununa staðið fyri at fáa sætta bind av Havnar søgu lidna. Rithøvundarnir hava latið síðsta og endaliga tilfarið frá sær 31. oktober 2021, og fer hetta nú til at gera klárt til prentingar og til útgávu í nýggja árinum.

Sum lýst omanfyri er ætlanin eisini at uppaftur prenta nøkur eintøk av bindi 1 og 2.

Tá endaligt prístilboð fyriliggur seinni í hesum mánaðinum, skal støða takast til, hvussu nógv eintøk av bindi 6, 1 og 2 kunnu rúmast innanfyri játtanina uppá kr. 500.000.

**Tilmæli:**
Greitt verður frá málinum.

**Mentamálanevndin 03. november 2021:** Greitt var frá málinum.

**Býráðsfundur 25. november 2021:** Einmælt samtykt við aðru viðgerð.

# 291/21 Stuðulsnevndin fyri svimjihyl í Nólsoy : Umsókn um at TK yvirtekur matr. nr. 126a, Nólsoy móti at tey fáa matr. nr. 147c, 19 ella 92a, Nólsoy til eitt savn til minnis um Ova Joensen

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 03.05.2017 | 99/17 | 16/03741-6 |
| 2 Mentamálanevndin | 11.05.2017 | 121/17 | 16/03741-6 |
| 3 Mentamálanevndin | 15.06.2017 | 176/17 | 16/03741-6 |
| 4 Mentamálanevndin | 13.09.2017 | 207/17 | 16/03741-6 |
| 5 Mentamálanevndin | 04.10.2017 | 239/17 | 16/03741-6 |
| 6 Mentamálanevndin | 06.11.2019 | 305/19 | 16/03741-6 |
| 7 Mentamálanevndin | 05.02.2020 | 47/20 | 16/03741-6 |
| 8 Byggi- og býarskipanarnevndin | 23.04.2020 | 73/20 | 16/03741-6 |
| 9 Nólsoyarnevndin | 28.04.2020 | 3/20 | 16/03741-6 |
| 10 Mentamálanevndin | 10.06.2020 | 175/20 | 16/03741-6 |
| 11 Fíggjarnevndin | 17.06.2020 | 164/20 | 16/03741-6 |
| 12 Mentamálanevndin | 09.09.2020 | 232/20 | 16/03741-6 |
| 13 Mentamálanevndin | 19.10.2020 | 270/20 | 16/03741-6 |
| 14 Fíggjarnevndin | 21.10.2020 | 254/20 | 16/03741-6 |
| 15 Býráðsfundur | 25.03.2021 | 104/21 | 16/03741-6 |
| 16 Fíggjarnevndin | 17.11.2021 | 288/21 | 16/03741-6 |
| 17 Býráðsfundur | 25.11.2021 | 291/21 | 16/03741-6 |

**Málslýsing:**
Á heystið 2016 fekk Tórshavnar kommuna umsókn frá Stuðulsnevndini fyri svimjihyli í Nólsoy um yvirtøku av øllum skyldum viðvíkjandi matr. nr. 126a, ið er eystanfyri Nólsoyar skúla (sí hjálagt skriv).

Nevndin metir tað vera ósannlíkt at hon klárar at fullføra verkætlanina við svimjihyli. Nevndin hevur nú ístaðin í hyggju at broyta endamálið í viðtøkunum og heldur fara undir at gera eitt savn til minnis um Ova Joensen og hansara roysni.

25. november 2016 vóru umboð fyri løgdeildina og mentamáladeildina á fundi og ástaðarfundi við umboð fyri Stuðulsnevndina úti í Nólsoy (sí hjálagda fundarfrásøgn).

7. mars 2017 kemur uppfylgjandi skriv frá Stuðulsnevndini um málið (sí hjálagt skjal).

Á fundinum kemur umsitingin at greiða frá verandi anleggi á matr. nr. 126a og møguleikunum har og teimum møguleikunum, sum eru fyri staðseting av einum komandi savnsvirksemi og hvør samrakstur er hugsandi við aðrar partar.

Út frá tí ber til at meta nærri um, hvørt farast skal víðari í samskiftinum við Stuðulsnevndina og aðrar partar um møguliga verkætlan. Henda tilgongdin vil so avklára nærri fyritreytirnar fyri hesi verkætlanini sum mentamálanevndin so fær aftur til viðgerðar í heyst.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til yvirskipað at umrøða uppskotið hjá Stuðulsnevndini og at taka støðu til, um farast skal víðari við samskiftinum um eina møguliga savnsverkætlan.

**Mentamálanevndin 03. mai 2017:** Útsett.

**Mentamálanevndin 11. mai 2017:** Samtykt at umsitingin tekur upp víðari samráðingar við umsøkjaran, um hvørjar aðrar loysnir kunnu vera hugsandi, herundir í onkrum verandi bygningi/húsi.

**Ískoyti**
Við støði í samtyktini hjá nevndini á seinasta fundi málið var fyri, hevur umsitingin verið í samskifti við stuðulsnevndina. Við støði í tí hevur nevndin latið inn nýtt uppskot við fleiri hugsandi møguleikum. Sí hjálagt skriv.

Talan er um:
a). Royndarhúsið
b). Avhaldshúsið
c). Lonin

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja hvønn ella hvørjar av hesum valmøguleikunum, ið umsitingin skal samskifta víðari við stuðulsnevndina um.

**Mentamálanevndin 15. juni 2017:** Nevndin ynskir at fáa nærri lýsing av teimum trimum møguleikunum at leggja aftur fyri nevnd.
**Ískoyti**
Stuðulsnevndin er sbrt. umbøn komin við dagførdum uppleggi til framtíðar loysn og sum betri lýsir tær áður umrøddu loysnirnar. Sí hjálagt skjal.

Viðv. loysnunum
- Lonin er bygningur hjá Tórshavnar kommunu, ið verður umsitin av Tórshavnar Havn.

- Kunningarstovan leigar í bygningi hjá privatum eigara. Ein loysn har krevur nærri samráðingar við eigaran.
- Royndarhúsið er sum áður nevnt bygningur hjá Royndarhúsfelagnum og krevur at felagsskapirnir finna saman um eina loysn.

Umsitingin kemur á fundinum at greiða nærri frá uppskotunum og møguleikunum sum eru í teimum.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka støðu um
a). loysnin við Lonini skal innganga í víðari samskifti við Stuðulsnevndina?
b). loysnin við Kunningarstovuna skal innganga í víðari samskifti við Stuðulsnevndina?
c). loysnin við Royndarhúsinum skal innganga í víðari samskifti við Stuðulsnevndina?

**Mentamálanevndin 13. september 2017:** Útsett.

**Mentamálanevndin 04. oktober 2017:** Samtykkt at arbeiða víðari við loysn a) og beina málið til ummælis í vinnunevndini.

Marin Katrina Frýdal og Heðin Mortensen vóru ikki við í viðgerðini av hesum málið.

**Ískoyti:**
Málið kom ikki sum hugsað fyri í vinnunevndini.

Hinvegin avgjørdi vinnunevndin á fundi 3. apríl 2019 í máli 19/01422 - umsókn frá Biofar um at leiga stampagoymsluna at gera leigusáttmála við Biofar um somu hølir, ið annars vóru í umbúna til Ovasavn. Øll Lonin er uml. 100 m2, meðan Biofar leigar 33 m2, umframt bíðihøli hjá SSL eru har og arbeiðsrúm hjá tekniska økinum. Virksemi hjá Biofar kemur ætlandi at geva føst arbeiðspláss í oynni.

Meiri grundleggjandi kundi málið lutvíst ikki gjøgnumførast av tí, at byggisamtyktin har er havnaøkið og at tilgongd eisini skuldi fara í gongd viðv. at broyta byggisamtyktina – hetta er nú ávegis til politiska viðgerð.

Tulkingin hjá umsitingini var at talan var um eitt savn viðv. bátavirksemi og sjólívi og tí møguliga kundi góðtakast á einum havnaøkið.

Á borgarafundi í Nólsoy 23. oktober fekk TK handað eina umsókn um 'Verkætlan Savnsdepil í Nólsoy' - sí hjálagt skjal.

Í skrivi frá nevndini 23. oktober verður greitt frá at tey kenna til verkætlanina um savnsdepil, men at nevndin ynskir sum útgangsstøði at fasthalda sína verandi umsókn um stuðul og samstarv og nú at halda fram við loysn b). at keypa hølini har Kunningarstovan hevur verið og at TK inngongur í ta verkætlanina. Stuðulsnevndin metir at útlitini fyri einum savnsdepli eru meiri óviss og vil tí fyrst og fremst fremja hesa verkætlanina og kann savnsdepilsverkætlanin so vera áhugaverd seinni um hon skuldi komið so langt einaferð í framtíðini.

Býarskipanardeildin hevur gjørt uppskot til broytta byggisamtykt á Havnaøkinum á Klivum, umframt gjørt uppskot til skipan og innihald á økinum, herundir at eitt margvirksemishús - við nakað sama innihaldi sum verkætlanin við savnsdepli lýsir kann vera. Sí hjálagt uppskot til skipan av økinum. Enn óvist viðv. víðari tilgongd við broyting av byggisamtykt.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja antin:

a). at boðað umsøkjaranum frá at farið verður víðari í dialoginum um møguliga hølisloysn í Kunningarstovubygninginum ella øðrum bygningi í bygdini og avklára leiklutin hjá TK.
ella
b). at arbeiða víðari við at menna eina verkætlan á havnaøkinum, tá byggisamtyktin ætlandi er broytt.

**Mentamálanevndin 06. november 2019:** Nevndin samtykti at taka undir við punkt a).

**Ískoyti:**
Við støði í samtyktini seinast hevur stuðulsnevndin fyrireika uppskot til loysnir í bygdini. Sí hjálagt skjal.

Á fundinum greinar umsitingini fyrimunir og vansar við ymsu loysnunum.

Fígging
Um farast skal víðari við ætlanini verður mælt til at útvega fígging á fíggjarætlanini fyri 2021.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja um:

a). haldast skal fram við samráðingunum við stuðulsnevndina um eina loysn og b). at velja hvørja ella hvørjar av loysunum í sofall arbeiðast skal víðari við.

**Mentamálanevndin 05. februar 2020:** Samtykt at halda fram við samráðingunum við stuðulsnevndina um loysn og beina uppskot um at matr. nr. 19 og 92a verður framtíðarloysn fyri Ovasavn í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Ískoyti:**
Matr. 19 og 92a, Nólsoy, sum uppskot er um skal nýtast sum framtíðarloysn fyri Ovasavn, liggur sum D øki, ætlað almennum stovnum og mentan, í byggisamtyktini fyri Nólsoy. Sostatt eru ætlanirnar í tráð við ásetingarnar fyri økið.

Umsitingin hevur arbeitt við eini ætlan um at umskipa økið úti á Klivum, soleiðis at tað umframt havnavirksemi, eisini fevnir um m.a. mentan, smátt vinnuvirksemi, tænastuvirksemi og íbúðir. Í tí sambandi hevur man umrøtt møguleikan fyri at staðseta Ovasavnið í økinum úti á Klivum. Ætlanin varð løgd fram á borgarafundi í Nólsoy hin 23. oktober 2019 og bíðað verður eftir, at staðbundna nevndin viðger ætlanina og vendir aftur við viðmerkingum.

Hetta er tó ein long tilgongd, og eingin niðurstøða ella samtykt fyriliggur uppá ætlanina enn.

Nevnast skal, at onnur, t.d. Nólsoyar Bjargingarfelag og Nólsoyar róðrarfelag, hava víst áhuga fyri sama øki.
Sí skjal *Dokument* journal nr. 2005-1087/5 og
*TórshavnNew Microsoft Office Word Document* journal nr. 15/01767-1.
Møguliga kundi okkurt av hesum virkseminum húsast í sama bygningi.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á býarskipanardeildini mæla til at taka undir við, at Ovasavnið verður staðsett á matr. nr. 19 og 92a, Nólsoy, og beina málið í staðbundnu nevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 23. apríl 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Nólsoyarnevndin 28. apríl 2020:** Staðbundna nevndin tekur undir við at haldast skal fram við samráðingingunum um Ovasavnið og og taka fund við Bjargingarfelagið um útbygging á áðurnevnda matr. nr. 19 og 92a.
**Ískoyti**:
Umsitingin hevur verið í samskifti við Stuðulsnevndina og tekur hon undir við at fara víðari við fyrireikingunum og herundir fáa til vega eitt skitsuuppskot til bygning á økinum at søkja um byggiloyvi við. Talan er um byggisamtykt, ið sum útgangsstøði hevur byggistig á 0,3 og tí er hóskandi at vita, um frávik kann fáast áðrenn farið verður undir at gera endaliga avtalu og at projektera verkætlanina.

Bjargingarfelagið
Samskifti hevur eisini verið við Bjargingarfelagið og ynskja tey eina loysn á sama stað, ið er torfør at sameina við hesa verkætlanina. Mett verður meiri hóskandi at tað verður arbeitt fram móti eini betri loysn aðrastaðni.

Fígging
Stuðulsnevndin hevur eina ogn á umleið 500 tkr. og ynskir eitt gjald frá kommununi fyri at kommunan tekur yvir toftirnar á matr. 126a. Umframt at felagið kann søkja um annan stuðul til at fremja verkætlanina. Í samanleggingarsáttmálanum millum Tórshavnar kommunu og Nólsoyar kommunu frá 2004 er spurningurin um Ovasavn nevndur í punkt 29F (Sí hjálagt skjal).

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja:

a). at fara undir at gera treytaðan leigusáttmála við stuðulsnevndina um langtíðarleigu av matr. 19 og 92a, har felagið skal hava fingið útvegað byggiloyvið til ein bygning innan 1 ár.

b). at fara undir samráðingar við Stuðulsnevndina um yvirtøku av matr. 126a.

Málið verður beint í fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 10. juni 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 17. juni 2020:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini.

**Ískoyti**:
Umsitingin hevur havt fyrireikandi fund við stuðulsnevndina. Nevndin hevur júst latið inn umsókn um byggiloyvi. Sí hjálagt nakrar tekningar. Væntandi kemur ein niðurstøða tí viðv. í heyst.

Nevndin hevur í hyggju at fáa stuðul frá kommununi, Uttanríkis- og mentamálaráðnum, fyritøkum og grunnum. Nevndin hevur meldað út at hon hugsar at stuðul frá TK íroknað endugjald fyri lendið har svimjihøllin skuldi brúkast skal vera umleið 1.000 tkr. Í sofall má hædd takast fyri tí í fíggjarætlanini fyri 2021 ella 22.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at umrøða, hvørt fíggjarligar raðfestingar skulu gerast av málinum í 2021 ella 22.

**Mentamálanevndin 09. september 2020:** Umrøtt.

Heðin Mortensen varð ikki við í viðgerðini av hesum málið.

**Ískoyti**:
Nevndin í felagnum hevur søkt um byggiloyvi til verkætlanina og væntast svar í hesum árinum. Somuleiðis er nevndin farin undir fyrireikingar til at søkja um stuðul til verkætlanina.

Sum liður í at skipa viðurskiftini til framtíðar tørv og ætlanir er felagið farið undir tilgongd at umskipa felagið til ein grunn. Sí hjálagt verandi viðtøkur. Ætlanin er at fara burtur frá ætlanin um svimjihyl og til burturav at hava savnsvirksemi sum endamál.

Eisini er ásett í § 11: "**§ 11.** Verður felagið upployst, skulu ognir felagsins latast í grunn, íð Mentunardeildin í Tórshavnar kommunu umsitur til frama fyri Dianu Victoriu."

Hugsanin er at kalla til eykaaðalfundar og niðurleggja felagið og gera ein grunn.

Tey hugsa eisini, at grunnurin hevði eina nevnd við 5 limum, harav 1 valdur av kommununi og ein av kunningarstovuni.

Sum útgangsstøði metir umsitingin, at ætlanirnar um at gera felagið um til ein grunn kunnu góðtakast. Umsitingin metir tó ikki neyðugt at binda kommununa til at hava ein nevndarlim í grunninum.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin, leiðarin á stjórnarskrivstovuni og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini at umrøða spurningin um at loyva felagnum at umskipa seg til grunn. Mælt verður harumframt til ikki at hava kommunala umboðan í nevndini fyri grunnin.

Mælt verður til at beina málið til ummælis í fíggjarnevndini.

**Mentamálanevndin 19. oktober 2020:** Samtykt at taka undir við, at felagið umskipar seg til grunn. Harumframt samtykt ikki at hava kommunalan nevndarlim í grunninum.

**Fíggjarnevndin 21. oktober 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Annika Olsen biður um at fáa málið á skrá til komandi býráðsfund.

**Býráðsfundur 25. mars 2021:** Málið umrøtt.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur gjørt eitt uppskot til leigusáttmála. Kommunan leigur Grunninum fyri Ovasavn, matrikklini 92a og 19, Nólsoy til bygging av neysti. Sí leigumál j.nr. 16/03741-102

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, leiðarin í mentamáladeildini, kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni, mæla býráðnum til umvegis fíggjarnevndina, at taka undir við 30 ára leigusáttmála sí j.nr. 16/03741

**Fíggjarnevndin 17. november 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. november 2021:** Einmælt samtykt.

## 292/21 Nýggjur skúli í vesturbýnum (2012-1064)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 24.06.2014 | 151/14 | 14/03408-18 |
| 2 Fíggjarnevndin | 24.06.2014 | 203/14 | 14/03408-18 |
| 3 Býráðsfundur | 25.06.2014 | 148/14 | 14/03408-18 |
| 4 Mentamálanevndin | 20.10.2014 | 207/14 | 14/03408-18 |
| 5 Mentamálanevndin | 11.02.2015 | 22/15 | 14/03408-18 |
| 6 Mentamálanevndin | 06.05.2015 | 72/15 | 14/03408-18 |
| 7 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.05.2015 | 117/15 | 14/03408-18 |
| 8 Mentamálanevndin | 19.10.2015 | 209/15 | 14/03408-18 |
| 9 Tekniska nevnd | 20.10.2015 | 112/15 | 14/03408-18 |
| 10 Byggi- og býarskipanarnevndin | 20.10.2015 | 199/15 | 14/03408-18 |
| 11 Býráðsfundur | 21.10.2015 | 173/15 | 14/03408-18 |
| 12 Fíggjarnevndin | 21.10.2015 | 236/15 | 14/03408-18 |
| 13 Fíggjarnevndin | 06.01.2016 | 1/16 | 14/03408-18 |
| 14 Býráðsfundur | 06.01.2016 | 1/16 | 14/03408-18 |
| 15 Mentamálanevndin | 06.01.2016 | 1/16 | 14/03408-18 |
| 16 Býráðsfundur | 28.01.2016 | 12/16 | 14/03408-18 |
| 17 Mentamálanevndin | 10.02.2016 | 24/16 | 14/03408-18 |
| 18 Fíggjarnevndin | 17.02.2016 | 52/16 | 14/03408-18 |
| 19 Býráðsfundur | 25.02.2016 | 38/16 | 14/03408-18 |
| 20 Mentamálanevndin | 04.05.2016 | 133/16 | 14/03408-18 |
| 21 Fíggjarnevndin | 11.05.2016 | 158/16 | 14/03408-18 |
| 22 Býráðsfundur | 19.05.2016 | 128/16 | 14/03408-18 |
| 23 Fíggjarnevndin | 08.06.2016 | 222/16 | 14/03408-18 |
| 24 Býráðsfundur | 16.06.2016 | 162/16 | 14/03408-18 |
| 25 Mentamálanevndin | 17.10.2016 | 273/16 | 14/03408-18 |
| 26 Mentamálanevndin | 27.10.2016 | 275/16 | 14/03408-18 |
| 27 Fíggjarnevndin | 27.10.2016 | 364/16 | 14/03408-18 |
| 28 Býráðsfundur | 27.10.2016 | 247/16 | 14/03408-18 |
| 29 Fíggjarnevndin | 16.11.2016 | 367/16 | 14/03408-18 |
| 30 Mentamálanevndin | 24.11.2016 | 300/16 | 14/03408-18 |
| 31 Fíggjarnevndin | 29.11.2016 | 396/16 | 14/03408-18 |
| 32 Býráðsfundur | 30.11.2016 | 297/16 | 14/03408-18 |
| 33 Býráðsfundur | 15.12.2016 | 323/16 | 14/03408-18 |
| 34 Mentamálanevndin | 06.12.2016 | 312/16 | 14/03408-18 |
| 35 Fíggjarnevndin | 07.12.2016 | 404/16 | 14/03408-18 |
| 36 Býráðsfundur | 26.01.2017 | 44/17 | 14/03408-18 |
| 37 Býráðsfundur | 02.03.2017 | 71/17 | 14/03408-18 |
| 38 Býráðsfundur | 27.04.2017 | 120/17 | 14/03408-18 |
| 39 Mentamálanevndin | 24.04.2017 | 89/17 | 14/03408-18 |
| 40 Fíggjarnevndin | 26.04.2017 | 103/17 | 14/03408-18 |
| 41 Mentamálanevndin | 14.05.2018 | 158/18 | 14/03408-18 |
| 42 Fíggjarnevndin | 18.05.2018 | 140/18 | 14/03408-18 |
| 43 Býráðsfundur | 24.05.2018 | 115/18 | 14/03408-18 |
| 44 Fíggjarnevndin | 13.06.2018 | 190/18 | 14/03408-18 |
| 45 Mentamálanevndin | 18.06.2018 | 232/18 | 14/03408-18 |
| 46 Fíggjarnevndin | 20.06.2018 | 205/18 | 14/03408-18 |
| 47 Mentamálanevndin | 02.07.2018 | 238/18 | 14/03408-18 |
| 48 Fíggjarnevndin | 04.07.2018 | 217/18 | 14/03408-18 |
| 49 Býráðsfundur | 04.07.2018 | 174/18 | 14/03408-18 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 50 Býráðsfundur | 30.08.2018 | 196/18 | 14/03408-18 |
| 51 Mentamálanevndin | 26.02.2019 | 73/19 | 14/03408-18 |
| 52 Fíggjarnevndin | 28.02.2019 | 61/19 | 14/03408-18 |
| 53 Býráðsfundur | 28.02.2019 | 36/19 | 14/03408-18 |
| 54 Mentamálanevndin | 11.09.2019 | 249/19 | 14/03408-18 |
| 55 Fíggjarnevndin | 18.09.2019 | 235/19 | 14/03408-18 |
| 56 Býráðsfundur | 26.09.2019 | 205/19 | 14/03408-18 |
| 57 Mentamálanevndin | 05.02.2020 | 57/20 | 14/03408-18 |
| 58 Fíggjarnevndin | 12.02.2020 | 45/20 | 14/03408-18 |
| 59 Býráðsfundur | 27.02.2020 | 34/20 | 14/03408-18 |
| 60 Mentamálanevndin | 02.04.2020 | 102/20 | 14/03408-18 |
| 61 Mentamálanevndin | 07.12.2020 | 331/20 | 14/03408-18 |
| 62 Fíggjarnevndin | 28.05.2020 | 142/20 | 14/03408-18 |
| 63 Býráðsfundur | 28.05.2020 | 111/20 | 14/03408-18 |
| 64 Býráðsfundur | 11.06.2020 | 121/20 | 14/03408-18 |
| 65 Fíggjarnevndin | 25.11.2020 | 307/20 | 14/03408-18 |
| 66 Býráðsfundur | 26.11.2020 | 266/20 | 14/03408-18 |
| 67 Fíggjarnevndin | 26.11.2020 | 321/20 | 14/03408-18 |
| 68 Fíggjarnevndin | 01.12.2020 | 322/20 | 14/03408-18 |
| 69 Fíggjarnevndin | 09.12.2020 | 337/20 | 14/03408-18 |
| 70 Mentamálanevndin | 09.12.2020 | 337/20 | 14/03408-18 |
| 71 Býráðsfundur | 17.12.2020 | 292/20 | 14/03408-18 |
| 72 Fíggjarnevndin | 17.02.2021 | 20/21 | 14/03408-18 |
| 73 Býráðsfundur | 25.02.2021 | 47/21 | 14/03408-18 |
| 74 Trivnaðarnevndin | 07.10.2021 | 70/21 | 14/03408-18 |
| 75 Fíggjarnevndin | 20.10.2021 | 249/21 | 14/03408-18 |
| 76 Býráðsfundur | 25.11.2021 | 292/21 | 14/03408-18 |

## Málslýsing:

**2012-1064/17 SG**

**Fyrireika bygging av nýggjum skúla**

Arbeiðsbólkur og arbeiðssetningur
Í álitinum um skúlabygnað og skúlabygging 2012-2021 (sí mál 2011-0679), sum skúlastýrini eisini hava viðgjørt og gjørt viðmerkingar til, verður m.a. mælt til at byggja nýggjan trý sporaðan skúla í staðin fyri

Tórshavnar kommunuskúla og Venjingarskúlan. Mælt verður eisini til at skipa forskúla og frítíðarskúla í øllum skúlum. Haraftrat er lagt upp til at hava tilboð til næmingar við serligum avbjóðingum.

Hesin nýggi skúlin hevur arbeiðsheitið Vesturskúli við tað, at hann ætlandi verður staðsettur í Vesturbýnum inn frá Landavegnum, har økið eisini er lagt av til at byggja ítróttahøll. Inn frá Marknagilsvegnum verður miðnámsskúladepilin granni.

Tørvur er á at gera uppskot til eitt meira útgreinað konsept bæði um samlaða virksemið í skúlanum og bygningin sjálvan. Hetta arbeiðið er at meta sum ein fyrsta fyrireiking og hugskotsgrundarlag fyri víðari politiskari viðgerð og støðutakan til at seta bygginevnd og at útvega byggiskrá v.m.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at geva umsitingini heimild til at seta arbeiðsbólk við umboðum fyri umsitingina, skúlarnar, frítíðarskúlarnar og møguliga onnur at gera uppskot til yvirskipað konsept fyri nýggja skúlanum at lata mentamálanevndina aftur til viðgerðar í seinasta lagi 15. juni 2012.

**Mentamálanevndin 30. apríl 2012:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 2. mai 2012:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Arbeiðsbólkurin hevur latið gera uppskot til yvirskipað konsept fyri nýggja skúlan, sí frágreiðing. Arbeiðsbólkurin hevur m.a. lýst námsfrøðiliga profilin við atliti at eitt nú ætlanini um deildarbýti, floks- og hølisbýti, samstarv millum lærarar og pedagogar, samstarv millum skúlar, serundirvísing og næmingatrivnað. Harumframt verður nomið við staðsetingina, bygningsstødd v.m.

Konseptið er í góðum samsvari við álitið um skúlabygnað og skúlabygging eins og viðmerkingarnar frá skúlastýrunum (máltal 2011-0679).

Mett verður, at tilfarið, ið arbeiðsbólkurin hevur latið úr hondum, saman við álitinum um skúlabygnað og skúlabygging og viðmerkingunum frá skúlastýrunum er haldgott grundarlag fyri at fara víðari í tilgongdini at fyrireika bygging av nýggjum Vesturskúla. Næsta stigið er sostatt at seta bygginevnd og at útvega byggiskrá.

Til endamálið skal fígging fáast til vega. Í sambandi við heildarætlanina fyri Kommunuskúlan eru uml. 3 mió kr. ikki brúktar. Nýggi Vesturskúlin er ein samanlegging av Kommunuskúlanum og Venjingarskúlanum, og tí verður mett, at hesir pengar kunnu játtast og flytast til nýggju skúlaætlanina fyri hesar báðar skúlar.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at seta bygginevnd og at útvega byggiskrá til nýggjan Vesturskúla í samsvari við álitið um skúlabygnað og skúlabygging, og at áður játtað upphædd kr. 3 mió frá kontu 4175 Dagføring av skúlum L41003 Kommunuskúlin høvuðsumvæling verður flutt til bygging av nýggjum Vesturskúla.

**Mentamálanevndin 27. juni 2012:** Ein meiriluti: Jógvan Arge, Halla Samuelsen og Elin Lindenskov taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.
Ein minniluti: Annfinn Brekkstein og Vagnur Johannesen taka støðu á seinni fundi.

**Fíggjarnevndin 28. juni 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 28. juni 2012:** Einmælt samtykt.

**Mentamálanevndin 10. apríl 2013:** Málið varð umrøtt.

**Ískoyti:**

Ein arbeiðsbólkur við umboðum fyri leiðslur, lærarar og foreldur í skúlastýrunum í Venjingarskúlanum og Tórshavnar Kommunuskúla og umboðum fyri umsitingina (sí mál nr. 14/00423) hevur gjørt uppskot um bygnaðarliga samskipan og samanlegging av Venjingarskúlanum og Tórshavnar Kommunuskúla og tíðarætlan.

Á býráðsfundi 22. mai 2014 varð samtykt at broyta ætlaða talið av sporum í Vesturskúlanum soleiðis, at trý spor vera í yngru flokkunum og fimm spor í 8. og 9. flokki (sí mál nr. 14/00423).

Grundøkið við Landavegin, sum ætlanin er at byggja skúlan á, er 34.000 $m^2$, til samanberingar eru grundøkini hjá Skúlanum við Løgmannabreyt og Skúlanum á Argjahamri ávikavist 22.000 $m^2$ og 20.000 $m^2$.

Bygginevndin hevur viðgjørt uppskotið, sum ein arbeiðsbólkur læt úr hondum í juni 2012, og nevndin er samd um, at tað uppskotið er gott grundarlag at brúka í fyrireikingini at byggja nýggja skúlan í vesturbýnum. Á fundi mikudagin 18. juni 2014 samtykti bygginevndin at biðja um, at 1.300.000 kr., sum settar eru av til av Vesturskúla, verða játtaðar til fyrireiking og til byggiskrá.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta 1.300.000 kr. til fyrireiking og útvegan av byggiskrá av konto 4176 Nýbygging av skúlum.

**Mentamálanevndin 24. juni 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevnd 24. juni 2014:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 25. juni 2014:** Einmælt samtykt.

**Mentamálanevndin 20. oktober 2014:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Støðan í dag.

Tøkt lendi, sum ætlanin er at byggja á:

| | |
|---|---|
| Matr.nr. 1099 | 14.660 $m^2$ |
| Matr.nr. 1100 | 15.280 $m^2$ |
| Matr.nr. 1102c | 5.879 $m^2$ |
| | |
| Tilsamans | 35.819 $m^2$ |

Hesir matriklar eru allir D3-øki Almennir stovnar.

Samtykt er, at skúlin skal byggjast til 850 næmingar, og við grundarlagi í verandi skúlum við Løgmannabreyt og á Argjahamri eru umleið 14 $m^2$ fyri hvønn næming.
Nýggi skúlin skal sostatt vera 850 x 14 $m^2$ = 11.900 $m^2$ til støddar.

Neyðugt er at útvega meiri lendi, tí serstaka byggisamtyktin fyri Marknagil ásetur nettonýtslustig 0,3, sum krevur eitt grundøkið uppá 39.700 $m^2$.

Ætlanin er at nýta matr.nr. 1104d ella partar av hesum matrikli afturat. Kommunan eigur grundøkið, sum er 6.576 m² til støddar.

Soleiðis verður samlaða víddin økt úr 35.819 m² til 42.395 m².

Bygginevndin hevur á fundi 11. desember 2014 samtykt at mæla til, at matr.nr. 1104d verður lagt afturat samlaða økinum til Vesturskúlan.

Upplýsast skal, at matr.nr. 1104d er C3-øki Miðstaða- bústaðarbygging.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og verkætlanarleiðarin mæla til at taka undir við bygginevndini og beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Mentamálanevndin 11. februar 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Bygginevndin hevur fingið 1.part av byggiskránni (Byggiskrá Fyritreytir) og mælir til at góðkenna hana við tí fyrivarni, at smærri tillagingar kunnu verða gjørdar av umsitingingini, áðrenn útbjóðað verður.

Víst verður til skjal 15/01528-2, sum er viðfest.

Sambært tíðarætlanini verða 2. og 3. partur av byggiskránni lidnir í september. 2. partur er námsfrøðilig viðurskifti og 3. partur er teknisk viðurskifti.

**Tilmæli til mentamálanevndina:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka undir við bygginevndini og góðkenna fyrsta part av byggiskránni.

**Ískoyti:**
Eftir at málið var fyri í mentamálanevndini, hevur fundur verið á teknisku deild við luttøku av umboðum fyri Landsverk og Rambøll um atkomuviðurskiftini til Vesturskúlan. Niðurstøðan frá fundinum var, at Rambøll skuldi koma við einum uppskoti til loysn og gera eina innkoyring frá Marknagilsvegnum ígjøgnum nevnda matr.1104d.
Mál 14-03118-22. Hjáløgdu kort sum vísa uppskot til loysn.

**Tilmæli til byggi- og býarskipanarnevndina:**
Tekniski stjórin og verkætlanarleiðarin mæla til at taka undir við bygginevndini og teknisku deild og nýta matr. nr. 1104d fyri at halda kravið um nettunýtslustig til byggingina og møguligan atkomuveg frá Marknagilsvegnum til Vesturskúlan.

**Mentamálanevndin 6. mai 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum til mentamála-nevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. mai 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum til byggi- og býarskipanarnevndina.

**Ískoyti:**
Bygginevndin hevur 12. oktober 2015 samtykt endaliga byggiskrá fyri byggiverkætlanina Skúlin á Fløtum. Byggiskráin, ið er hjáløgd, er í trimum pørtum:

1. Fortreytir
2. Námsfrøðilig viðurskifti
3. Teknisk viðurskifti

**Grundøki**

Eitt øki í Marknagili er lagt av til Skúlan á Fløtum www.saf.fo . Økið er tilsamans 42.335 $m^2$ og er ogn hjá Tórshavnar kommunu.

Sambært serstøku byggisamtyktini fyri Marknagil kunnu bygningurin/bygningarnir í mesta lagi vera 10.583 $m^2$ við tilsamans 12.700 innrættaðum $m^2$. Støddin á skúlanum verður 11.600 $m^2$ við møguleika at byggja út til tveir flokkar aftrat í 7. árgangi.

**Kostnaður**
Metta samlaða íløgan til handverkaraútreiðslur uttan meirvirðisgjald verður:
11.600 $m^2$ av gólvvídd fyri 11.600 $m^2$ x 20.000 kr.= 232.000.000 kr.

**Tíðarætlan**
Byggingin verður skipað sum ein bygging í trimum byggistigum. Sambært tíðarætlanini verður fyrsta byggistig liðugt í juli 2018, og tá flytur miðdeildin (4.- 6-fl.) inn í skúlan. Annað byggistig er til hádeildina (7.-9.fl.), og tað verður liðugt í juli 2019. Í juli 2020 verður triðja byggisstig liðugt, og tá flytur grunddeildin (0-3- fl. og frítíðarskúli) inn í skúlan.

Málið verður viðgjørt í mentamálanevndini, tekniskunevnd, byggi- og býarskipanarnevndini, fíggjarnevndini og í býráðnum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, mentamálaleiðarin, tekniski stjóri og býararkitekturin mæla mentamálanevndini til at góðkenna byggiskránna og at beina málið víðari til teknisku nevnd, ið skal beina málið víðari til byggi- og býarskipanarnevndina, ið skal beina málið umvegis fíggjarnevndina í býráðið.

**Mentamálanevndin 19. oktober 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í avvarðandi nevndir.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til at nevndin tekur undir við byggiskránni fyri tann partin sum viðkemur vegaføringar, ferðsluviðurskiftir og leiðingar í sambandi við verkætlanina, og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 20. oktober 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Timæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla nevndini til at taka undir við byggiskránni, fyri tann partin, sum viðkemur býarskipan og staðseting, og at beina málið í býráðið umvegis Fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 20. oktober 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.
Halla Samuelsen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 21. oktober 2015:** Samtykt at góðkenna byggiskránna og at beina málið í býráðið, og heitt verður samstundis á teknisku nevnd um í góðari tið at skipa øll nøktandi vega- og ferðsluviðurskifti við skúlarnar.

**Býráðsfundir 21. oktober 2015:** Samtykt við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti at góðkenna byggiskránna.

**Ískoyti**
Hugskotskappingin fyri Skúlan á Fløtum var útskrivað 23. oktober 2015 eftir at Tórshavnar býráð 21. oktober 2015 hevði samtykt byggiskránna fyri Skúlan.

Fýra ráðgevaratoymi vóru undangóðkend til at luttaka í hugskotskappingini.

Tey vóru:
- Elvi (Selmar Nielsen Arkitektar, Ósbjørn Jacobsen Arkitektar, LBF og SMJ)
- BIGKONTRAST (BIG-Bjarke Ingels Group, Kontrast byggilist og byggifrøði, LBF, SMJ)
- Árni Winter arkitektar, ZETA architects, SMJ og LBF
- MAP Arkitektar, Arkitektar 99, LBF og PB-Consult

18. desember 2015 lótu toymini inn síni boð uppá loysn og var tað latið navnloynt soleiðis, at nevndin ikki visti, hvat toymið átti hvat uppskot.

4. januar 2016 hevur dómsnevndin gjørt úrskurð og tilmæli í málinum um, hvat ráðgevaratoymið skal fáa møguleikan at innganga avtalu um ráðgeving, projektering og eftirlit av skúlabyggingini. Sí hjálagt dómsúrskurðin.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin, mentamálaleiðarin, tekniski stjórin og býararkitekurin mæla mentamálanevndini til at staðfesta úrskurðin hjá dómsnevndini og at heimila umsitingini til at fara undir samráðingar við vinnandi ráðgevaratoymið í dómsúrskurðinum um projektering og eftirlit, og at venda aftur við einum uppskoti til sáttmála.

**Mentamálanevndin 6. januar 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 06. januar 2016:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 06. januar 2016:** Einmælt samtykt at staðfesta úrskurðin hjá dómsnevndini og heimila umsitingini at fara undir samráðingar við vinnandi ráðgevaratoymið: Árni Winther arkitektar, ZETA architects, SMJ og LBF og uppskoti teirra, Eindirnar í heildini.

**Býráðsfundur 28. januar 2016:** Tikið av skrá.

**Ískoyti**
Bygginevndin fyri Skúlan á Fløtum hevur á fundi 9. februar 2016 samtykt samráðingarúrslitið frá samráðingunum hjá samráðingartoyminum (umboð frá bygginevnd og teknisku fyrisiting) við vinnandi ráðgevaratoymið í hugskotskappingini. Talan er um samtak, ið eitur Samtakið Eind Í/F (undir stovnan).

Hjálagdur er uppskot til sáttmála við tilhoyrandi fylgiskjølum.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, býararkitekturin og mentamálaleiðarin mæla til at heimila umsitingini til at innganga hjáløgdu ráðgevaraavtalu við Samtakið Eind Í/F.

**Mentamálanevndin 10. februar 2016:** Ein meiriluti, Helena Dam á Neystabø, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen og Sigrun Mohr, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Jógvan Arge, fílist á, at tilmælið við tilfari kom ikki fyrrenn á sjálvum fundinum og tekur ikki støðu til málið í dag.

**Fíggjarnevndin 17. februar 2016:** Samtykt at taka undir við meirilutanum í mentamálanevndini og at innganga hjáløgdu ráðgevaraavtalu við Samtakið Eind Í/F og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. februar 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Verkætlanin er komin so mikið áleiðis at klárt er at fara undir jørðarbeiðið. Í fyrsta lagi avgrevstur, ið m.a. skal geva betri yvirlit til víðari jørðarbeiði t.e. spreinging, grovplanering, planering vm.

Útboð hevur verið av avgrevstrinum. Kostnaðarmetingin lá millum 1,1 og 1,4 mió. kr.

2 arbeiðstakarar vóru bodnir at bjóða. Lisitatión var 3. mai 2016 kl. 14.

Tilboðini vóru soljóðandi:

| | |
|---|---|
| P/F Articon | kr. 1.294.147 |
| H. V. Lützen | kr. 1.772.448 |

Ikki íroknað MVG.

Farast kann í holt við arbeiðið innan umleið 3 vikur.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at taka undir við at gera sáttmála við lægsta tilboðsgeva og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina. Sáttmálin væntast klárur til viðgerðina í figgjarnevndini.

**Mentamálanevndin 4. mai 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Halla Samuelsen og Tróndur Sigurðsson vóru ikki við í viðgerðini av hesum málið.

**Fíggjarnevndin 11. maj 2016:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndni og beina málið í býráðið.

***Býráðsfundur 19. mai 2016: Einmælt samtykt.***

*Ískoyti*
*Á karminum eru fyri 2016 játtaðar 30,8 mio.kr. á stovnsnr. 4174 – Nýbygging skúlar (íløgur). Projekteringin av skúlanu er nú gott ígongd, umframt at jørðarbeiðið er um at fara í gongd. Tørvur er á áleið upphæddini til virksemi í ár.*

*Tilmæli*
*Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla at játta 30,8 mio.kr. á projektkonto L41012.*

**Fíggjarnevndin 08. juni 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 16. juni 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Eftir at fyrra útbjóðingin bleiv annulerað í summar hevur bygginevndin saman við Ráðgevarasamtakinum Eind gjøgnumgingið skipanaruppskotið vm. og gjørt ávísar tillagingar. Yvirlit sæst í hjálagda skjali.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at taka tillagingarnar til eftirtektar.

**Mentamálanevndin 17. oktober 2016:** Umrøtt.

**Ískoyti:**
20. oktober 2016 kl. 14 var licitatión uppá bygging av nýggjum skúlabygningi til Skúlan á Fløtum.

Hesi feløg/samtøk vóru boðin at bjóða í innbodnari licitatión og teirra høvuðsboð eru:

P/F MT Højgaard Føroyar við undirarbeiðstakarum - 287.151.814 kr.
P/F J&K Petersen, Sp/f Húsavarðatænastan og Sp/f TG Verk við undirarbeiðstakarum - 298.955.524 kr.
(eisini nevnt: Samtakið í Havn)
P/F Articon og Sp/f Búsetur við undirarbeiðstakarum - 267.809.320 kr.

Høvuðsráðgevin Samtakið Eind Í/F hevur, eftir innanhýsis viðgerð og gjøgnumgongd av tilboðunum, saman við umboðum fyri Tórshavnar kommunu, latið tilmæli 26. oktober 2016 viðvíkjandi hvat av samtøkunum skal fáa í boði at gera eina partalagsavtalu (fasu I) og har ætlandi raka ein targetprís, sum síðani vil innibera eina endaliga partalagsavtalu (fasu II) og ein arbeiðstøkusáttmála.

Henda tilgongdin kemur ætlandi at byrja 1. november 2016 og gongur fram til í januar 2017, tá komið ætlandi verður aftur í nevndir og býráð við einum úrsliti og tilmæli.

Bygginevndin fyri Skúlan á Fløtum hevur 26. oktober 2016 viðgjørt tilmælið frá Samtakinum Eind og umrøtt málið saman við teknisku fyrisiting. Bygginevndin tekur undir við tilmælinum frá Samtakinum Eind (sí tilmælið á nevndarportalinum).

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, býararktitekurin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at heimila umsitingini at fara í partalag (fasu I) við lægsta tilboðsgeva. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 27. oktober 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 27. oktober 2016:** Samtykt og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. oktober 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Við atliti til tryggja javna gongd og framhald í verkætlanini, er nú klárt at innganga arbeiðstakarasáttmála um víðari jørðarbeiðið. Avgrevsturin er framdur og byggipláss-økið riggað til, herundir við skúrum til verkætlanarsamskipanina vm.

Næsta stigið, sum hesin arbeiðstøkusáttmálin fevnir um, er spreinging og planering. Uppskot til sáttmála og kostnaðarmeting verður tøkt til fundin. Sáttmálin um víðari jørðarbeiðið er við lægsta tilboðsgeva frá lisitatiónini Samtakið Articon - Búsetur. Fígging er tøk á játtanini til Skúlan á Fløtum.

Bygginevndin fyri Skúlan á Fløtum viðger sáttmálan týsdagin áðrenn fundin í mentamálanevndini.

Sáttmáli um størra partin av høvuðsarbeiðstøkuni (byggingin) verður klárur tá fasa 1 í partalagnum verður liðug í fyrsta ársfjórðingi í 2017.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, býararktitekurin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at heimila umsitingini at innganga arbeiðstakarasáttmála við Samtakið Articon – Búsetur um jørðarbeiði fíggjað av kontu 4176 Nýggir skúlar L41012 Skúlin á Fløtum.

**Fíggjarnevndin 16. november 2016:** Tikið av skrá.

**Ískoyti**
Mett verður, at samlaði íløgutørvurin til byggingina av Skúlanum á Fløtum fíggjarárið 2017 verður umleið kr. 70 mió.

Í uppskotinum til fíggjarætlan fyri 2017 eru settar kr. 42,075 mió av til endamálið. Í hesum sambandi er fráboðað, at írestandi fíggingin til komandi fíggjarár kr. 28 mió skal játtast sum eykajáttan í inniverandi fíggjarári av løgukarmi 5175 Musikkskúlin.

Partalagssáttmáli er undirskrivaður. Umframt avgrevsturin, sum er liðugur, verður grót- og spreingiarbeiðið byrjað í ár, og byggingin av sjálvum bygninginum byrjar ætlandi í apríl 2017.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og tekniski stjóri mæla til at samtykkja eykajáttan kr. 28 mió av løgukarmi 5175 Musikkskúlin til løgukontu 4176 Nýbygging skúlar L41012 Skúlin á Fløtum.

**Mentamálanevndin 24. november 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og játta kr. 28 mió av løgukarmi 5175 Musikkskúlin til løgukontu 4176 Nýbygging skúlar L41012 Skúlin á Fløtum við teirri viðmerking, at meirinntøkurnar fyri fíggjarárið 2016 skulu játtast til arbeiðið at byggja Musikkskúlan og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 29. november 2016:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið at viðgera tvær ferðir.

**Býráðsfundur 30. november 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Við atliti til tryggja javna gongd og framhald í verkætlanini, er nú klárt at innganga arbeiðstakarasáttmála um víðari jørðarbeiðið. Avgrevsturin er framdur og byggipláss-økið riggað til, herundir við skúrum til verkætlanarsamskipanina vm.

Næsta stigið, sum hesin arbeiðstøkusáttmálin fevnir um, er spreinging og planering. Uppskot til sáttmála er gjørt, kostnaðarmetingin fyri arbeiðið er kr. 7.386.512 u/mvg. Harumframt koma útreiðslur til byggipláss uml. kr. 500.000 og mvg, samlaður kostnaður umleið kr 8.500.000. Sáttmálin um víðari jørðarbeiðið er við lægsta tilboðsgeva frá lisitatiónini Samtakið Articon - Búsetur. Fígging er tøk á játtanini til Skúlan á Fløtum.

Bygginevndin fyri Skúlan á Fløtum viðger sáttmálan týsdagin áðrenn fundin í mentamálanevndini.

Sáttmáli um størra partin av høvuðsarbeiðstøkuni (byggingin) verður klárur tá fasa 1 í partalagnum verður liðug í fyrsta ársfjórðingi í 2017.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, býararktitekurin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at

heimila umsitingini at innganga arbeiðstakarasáttmála við Samtakið Articon – Búsetur um jørðarbeiðið og játta kr. 8.500.000 av kontu 4176 Nýggir skúlar L41012 Skúlin á Fløtum.

**Mentamálanevndin 6. desember 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 07. december 2016:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 15. desember 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Ì sambandi við, at byggiverkætlanin verður skipað í partalagssamstarvi millum Tórshavnar kommunu, Samtakið Eind Í/F og Samtakið Articon – Búsetur Í/F, skal sbrt. partalagsskipanini skipast ein stýrisbólkur við umboðum fyri Tórshavnar kommunu og bæði samtøkini.

Bygginevndin, sum hevur virkað higartil, gongur tí út, men mælt verður til, at býráðið velur umboð í stýrisbólkin.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla býráðnum til at velja umboð í stýrisbólkin í partalagnum.

**Býráðsfundur 26. januar 2017:** Tikið av skrá.

**Býráðsfundur 02. mars 2017:** Vald vóru Gunnvør Balle, Jákup Dam, Helena Dam á Neystabø og Heðin Mortensen.

**Ískoyti:**
Partalagsavtala varð undirskrivað 17. november 2016. Síðani hava partarnir arbeitt við at gjøgnumganga og menna verkætlanina sbrt. ætlanini í partalagsavtaluni, herundir at fáa sent myndugleikaprojekt til góðkenning hjá byggivaldinum. Hetta var gjørt fyrst í apríl og er endaligt svar væntandi um stutta tíð.

Eisini er arbeitt við at fáa ásett endaliga byggikostnaðin. Í tilgongdini eru fleiri tilagingar gjørdar við atliti til at náa ein nøktandi targetkostna samsvarandi upprunaligu ætlanini, sí hjálagt skjal. Eisini sæst at, í tilgongdini eru nakrar postitiónir, sum av misgáum ikki vóru við í upprunaliga útboðstilfarinum/nøgdarlistunum, og sum nú eru roknaðar við.

Targetprísurin er nú ásettur til kr. 247.000.000 við avhending í einum byggistigi 1. apríl 2020, tó so, at møguliga vilja partar av verkætlanini kunna verða liðug áðrenn, men er ov tíðiliga at áseta tað enn. Arbeiðið kann byrja at kalla beinanvegin. Verandi arbeiðstøka við planering er um at vera liðug.

Nú er klárt at taka støðu til um farast skal víðari í partalagsfasu 2 og gera høvuðsarbeiðstøkusáttmála.

Kostnaðarkarmurin fyri alla verkætlanina (HVÚ, ókent, prís- og lønarvøkstur, heildarráðgeving, eftirlit, listprýði v.m. umframt mvg) er nú kr. 383.073.750.

Higartil eru játtaðar kr. 101.752.000 til verkætlanina, harav kr. 42.075.000 er standa í løgukarmi 4176 Nýbygging skúlar fyri fíggjarárið 2017, og aðrar kr. 37.809.000 standa sum minninýtsla fyri 2016 og tí skulu framflytast í sambandi við ársroknskapin hjá kommununi.

Írestandi fíggjartørvur avrundað er sostatt kr. 281.323.000, ið skulu játtast yvir fíggjarárini 2018, 2019 og 2020. Mett verður, at fíggjartørvurin fyri inniverandi ár er kr. 61.015.000, tvs., at í inniverandi fíggjarárið er kr. 18.869.000 sett ov nógv av, og kann løgukarmurin tí lækkast fyri inniverandi fíggjarár.

Samlaði fíggjartørvurin fyri árini 2018, 2019 og 2020 verður sambært hesum tí kr. 300.192.000. býtt soleiðis samsvarandi væntaðum útreiðslutørvi fyri hesi ár: í 2018 kr. 110.175.000, í 2019 kr. 127.383.000, og í 2020 kr. 62.634.000.

Hjáløgd málinum er:
a) frágreiðing um fyriliggjandi forprojekt til góðkenningar
b) uppskot til høvuðsarbeiðstøkusáttmála við Samtakið Articon-Búsetur Í/F

c) kostnaðaryvirlit

**Tilmæli**

Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, býararkitekturin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at góðkenna hjálagda forprojekt og høvuðsarbeiðstøkusáttmála og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina, har samlaði kostnaðarkarmurin fyri byggingina er kr. 383.073.750.

Til tess mæla trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin til at játta fyri fíggjarárið 2017 kr. 23.206.000 á løgukarminum 4176 Nýbygging skúlar út á løgukontu L41012 Skúlin á Fløtum, og flyta minninýtslu á somu løgukontu fyri fíggjarárið 2016 kr. 37.809.000, og at írestandi upphæddin kr. 300.192.000 fyri árini 2018, 2019 og 2020 verður játtað samsvarandi býtinum omanfyri, og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 24. apríl 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 26. apríl 2017:** Samtykt at taka undir við mentamálanevdini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. apríl 2017:** Einmælt samtykt.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Sjúrður Olsen, Bergun Kass, Annfinn Brekkstein, Helena Dam á Neystabø, Bjørghild Djurhuus, Tróndur Sigurðsson, Heðin Mortensen og Gunvør Balle.

**Ískoyti**:
Á løgukarminum L4176 Nýbygging skúlar fyri 2018 eru játtaðar 100 mio.kr til verkætlanina. Støðug gongd er á verkætlanini og væntandi verður tørvur á á leið 91 mio. kr til arbeiðstakarar og ráðgevar. Hartil koma ymiskar útreiðslur hjá byggiharranum. Samstundis er við 1 viðgerð samtykt í býráðnum framflytning av minnunýtsluni í 2017 á 6.541 tkr. (sí mál 18/01521 – Framflytingar fyri árið 2017). Mett verður hóskandi at hava eitt ávíst fíggjarligt rásarúm fyri um verkætlanin kemur at vinna inn á settu tíðarætlanina.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at játta 92 mio. kr. av

løgukarminum 4176 á løgukonto L41012 - Skúlin á Fløtum. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 14. mai 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 18. mai 2018:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. mai 2018:** Einmælt samtykt**.**

**Ískoyti**:
Fíggjarnevndin biður um, at fáa málið á skrá til kunningar.

**Fíggjarnevndin 13. juni 2018:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti**:
Víst verður til skjal nr. 14/03408-83.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, virkandi tekniski stjórin, deildarleiðari á verkætlanardeildini og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at heimila umsitingini at fara undir samráðingar við arbeiðstakara og ráðgeva um dagføring av partalagsavtaluni at leggja fyri aftur í nevndunum til góðkenningar. Málið verður beint í fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 18. juni 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2018:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini.

**Ískoyti**
Umsitingin hevur havt samráðingar við partarnar í partalagssamstarvinum t.e. Í/F Articon-Búsetur og Í/F Eind og er komin til eina semju. Sí hjálagt ískoyti til partalagsavtaluna (dagfest 17. November 2016) og ískoyti til arbeiðstakarasáttmálan (dagfestur 10. Mai 2017).

Ískoytini innibera at TK hækkar upphæddina til ókendu puljuna við 5 mio.kr., umframt setur 1 mio.kr. av til at lækka targetkostnaðin frá 248 mio.kr. til 247 mio.kr., umframt setur 1 mio.kr. av til tilkeyp í sambandi við eina betri takloysn, soleiðis at endamálið við at gera takið atkomiligt og brúkiligt kann vera rokkið.

Hesar broytingarnar innibera, at kostnaðarkarmurin fyri alla verkætlanina (HVÚ, ókent, prís- og lønarvøkstur, heildarráðgeving, eftirlit, listprýði v.m., umframt kommunalt MVG) fer úr 383.073.750 til kr. 390.511.250. Væntandi hava hesar broytingar ikki samanlagt fíggjarligar avleiðingar í 2018 og helst heldur ikki í 2019 og eisini tengt at, hvussu umfatandi brúkið av tí ókenda verður framyvir. Í sambandi við viðgerðina av fíggjarætlanini í heyst verður nærri nágreina um periodisering av játtanini til verkætlanina í 2019 og 2020.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, leiðarin fyri verkætlanardeildini og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka undir við ískoytinum til partalagsavtaluna fyri Skúlan á Fløtum og at hækka samlaða kostnaðarkarmin fyri verkætlanina til kr. 390.511.250. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 02. juli 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 04. juli 2018:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 04. juli 2018:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Helena Dam á Neystsbø hevur boðað frá, at hon ynskir at taka seg úr stýrisbólkinum fyri "Nýggjur skúli í vesturbýnum".

**Býráðsfundur 30. august 2018:** Tikið til eftirtektar at Helena Dam á Neystabø tekur seg úr stýrisbólkinum og at Bjørghild Djurhuus tekur sætið í stýrisbólkinum.

**Ískoyti:**
Viðv. broyting av takbelegningi
Innanhýsis stýrisbólkurin og Stýrisbólkurin fyri skúlan á Fløtum hevur eftir áheitan frá Húsaumsitingini viðgjørt spurningin um, hvørt tað er betri at brúka takpapploysn ístaðin fyri takmembran (takdúk) á tekjuni á oyggjunum (omaná bygningunum 1-7, tó ikki miðøkið). Takpapp er minni viðbreki fyri herverki, skaðum v.m., umframt nakað høgligari at røkja og viðlíkahalda.

Meirkostnaður fyri at skifta frá membrani til papp er 4.056.754 kr. + kommunalt MVG. Innanhýsis stýrisbólkurin mælir til at broyta takbelegningin til takpapp. Í mun til verkætlanina er broytingin at rokna sum eitt tilkeyp og kann tí ikki fara av puljuni til ókent og eiheldur er rúm fyri hesi íløgu á øðrum kontum í verkætlanini. Tí er neyðugt at økja samlaða kostnaðarkarmin fyri verkætlanina við hesi upphædd.

Ætlandi verður byrjað at leggja takpapp í mars 2019 og tekur tað arbeiðið nakrar mánaðir.

Viðv. innbúgvi og uttandura økið
Sum greitt frá í framløgu í sambandi við viðgerðina í nevndini á sumri 2018 er greitt, at áður gjørd meting í 2016 um kostnaðin av hóskandi innbúgvi v.m. ikki heldur í mun til tað, sum nú verður mett rímiligt. Á fundinum verður innleiðandi greitt frá metingini og atlitunum í málinum. Á einum komandi fundi kemur endalig tilráðing um málið.

## Tilmæli
Trivnaðarstjórin, leiðarin á verkætlanardeildini og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at samtykkja at leggja takkpapp á bygningin í staðin fyri membran, og í hesum sambandi at hækka samlaða løgukarmin fyri byggiverkætlanina við 4.056.754 kr. + kommunalt MVG at fíggja yvir løgujáttanina í 2020.

Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 26. februar 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 28. februar 2019:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. februar 2019:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Á løgukarminum L4176 Nýbygging skúlar fyri 2019 eru játtaðar 90.000 tkr til verkætlanina, umframt framflyting frá 2018 á 21.970 tkr. Støðug gongd er á verkætlanini og væntandi verður tørvur á umleið 110.000 tkr í 2019 til arbeiðstakarar, ráðgevar og byggiharraveitingar og -útreiðslur. Á framflutta løgukarminum 4176 Nýbygging skúlar eru 18.099 tkr. tøkar., ið tørvar at vera flutt á projektkontuna L41012 Skúlin á Fløtum.

Ískoyti viðv. játtan til innbúgv v.m.

Tekstur er ávegis

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at játta 18.099 tkr. av løgukarminum 4176 Nýbygging skúlar á løgukonto L41012 - Skúlin á Fløtum. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 11. september 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 18. september 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 26. september 2019:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Á løgukarminum L4176 Nýbygging skúlar fyri 2019 eru játtaðar 116.000 tkr til verkætlanina. Á projektkontuni L41012 Skúlin á Fløtum er væntað meirnýtsla á uml. 5 mio.kr. í 2019 (ikki endaliga uppgjørt enn!). Hetta vegna at tað hevur gingið væl at byggja í 2019.

Støðug gongd er á verkætlanini, ið ætlandi endar í ár. Tilgongdin viðv. útboð av innbúgvi og øðrum byggiharraveitingum er farin í gongd og kemur tann spurningur væntandi fyri aftur til viðgerðar í mars 2020.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at samtykkja at játta 116.000 tkr. av løgukarminum 4176 Nýbygging skúlar á løgukonto L41012 - Skúlin á Fløtum.
Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina

**Mentamálanevndin 05. februar 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 12. februar 2020:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. februar 2020:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Sbrt. galdandi samtykt hevur verkætlanin 394,8. mio.kr. í játtan. Ætlandi verður bygningin avhendað 26. juni 2020.

Í hjálagda skjali verða lýst útlitini fyri, um samlaða játtanin fer at halda. Niðurstøðan er at í løtuni verður mettur tørvur á meirjáttan svarandi til uml. kr. 5-8 mió.kr.

**Tilmæli**

Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin gera vart við møguligan tørv á meirjáttan at nágreina til ein komandi fund.

**Mentamálanevndin 02. apríl 2020:** Framlagt.

**Ískoyti:**
Byggingin av Skúlanum á Fløtum líður væl. Útboð av føstum og leysum innbúgvi hava verið, umframt útboð av KT-skíggjum til floks- og fakstovur. Sum áður kunnað um, hevur kostnaðarmetingin til innbúgv og útgerð, harundir útiútgerð, verið ov tepur.

Orsøkin er millum annað tilkeyp av ídnaðarkøki og skilaveggi í ítróttahøllini, umframt ov lítið er sett av til aktiva útgerð (kt), innbúgv sum heild og ráðgeving til hesar byggiharraveitingarnar.

Sáttmálar stunda til at verða undirskrivaðir, so at innbúgv og útgerð kann verða sett upp sambært tíðarætlanini.

Mett verður, at neyðugt er við kr. 6,82 mió í eykajáttan til innbúgv og útgerð. Greitt verður neyvari frá hesum á fundinum.

Fyrisitingin hevur ikki fígging at vísa á, men vísir á møguleikan við lántøku.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, mentamálaleiðarin og verkætlanarleiðarin mæla til at játta kr. 6,82 mió til innbúgv og útgerð til kontu 4176 Nýbygging skúlan L41012 Skúlin á Fløtum um neyðugt fíggjað við lántøku.

**Fíggjarnevndin 28. mai 2020:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Bergun Kass g Gunvør Balle, samtykti at taka undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið til tvær viðgerðir.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson, tekur undir við tilmælinum um at játta kr. 6,82 mió. til innbúgv og útgerð, tó tekur minnilutin ikki undir við at fíggja útreiðsluna við lántøku og mælir til at finna peningin innanfyri verandi íløgukarm.

**Býráðsfundur 28. mai 2020:** Fyrst varð atkvøtt um broytingaruppskot frá Tróndi Sigurðsson, Heðin Mortensen, Helelna Dam á Neystabø, Bjørghild Djurhuus, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein um at játta kr. 6,82 mió. til innbúgv og útgerð og fíggja útreiðsluna innanfyri verandi íløgukarm.

Uppskotið fall við 6 atkvøðum fyri, 7 atkvøðum ímóti og ongari blankari.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helenu Dam á Neystaø, Hallu Samuelsen og Annfinn Brekkstein

Ímóti atkvøddu: Annika Olsen, Gunnvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turid Horn, Borgi Andreasen og Bergun Kass

Síðan varð atkvøtt um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við fyrstu viðgerð við 7 atkvøðum fyri, 3 ímóti og 3 blonkum**.**

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunnvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turid Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson og Annfinn Brekkstein.

Blankt atkvøddu: Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø og Halla Samuelsen.

Málið beint víðari til aðru viðgerð.

**Býráðsfundur 11. juni 2020:** Fyrst varð atkvøtt um broytingaruppskotið frá Tróndi Sigurðsson, Heðin Mortensen, Helelna Dam á Neystabø, Bjørghild Djurhuus, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein um at játta kr. 6,82 mió. til innbúgv og útgerð og fíggja útreiðsluna innanfyri verandi íløgukarm.

Uppskotið fall við 6 atkvøðum fyri, 7 atkvøðum ímóti og ongari blankari.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helenu Dam á Neystabø, Hallu Samuelsen og Annfinn Brekkstein

Ímóti atkvøddu: Annika Olsen, Gunnvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turid Horn, Borgi Andreasen og Bergun Kass

Síðan varð atkvøtt um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við aðruviðgerð við 9 atkvøðum fyri, 3 ímóti og 1 blankari atkvøðu**.**

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunnvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turid Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass, Helena Dam á Neystabø og Bjørghild Djurhuus.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson og Annfinn Brekkstein.

Blankt atkvøddu: Halla Samuelsen.

**Fíggjarnevndin 25. november 2020:** Kunnað varð um málið.

**Fíggjarnevndin 26. november 2020:** Kunnað varð um málið.

**Býráðsfundur 26. november 2020:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Seinasta hálva árið er nógv orka løgd í at fáa stóru skúlabyggingina Skúlan á Fløtum lidna – nú umleið 58 mánaðir eftir, at sáttmáli var inngingin við ráðgevarasamtakið EIND Í/F sum høvuðsráðgeva um at projektera bygningin - eindirnar í heildini.

2. november 2020 fluttu næmingar og starvsfólk skúlans og frítíðarskúlans inn í bygningin, og 3. november 2020 var hátíðarhald og opið hús fyri almenninginum.

Í so stórari og umfatandi verkætlan eru hópatals viðurskifti og tilgongdir við eini longri røð av ráðgevum, arbeiðstakarum, veitarum og áhugapørtum. Sum heild metir umsitingin, at verkætlanin hevur gingið rímiliga væl, tó høvi er fyri batum í nøkrum førum, og hevur nógv orka verið løgd í at hava eina stundisliga og dygga verkætlanarstýring. Í januar/februar 2021 er ætlanin at hava eina eftirmeting av verkætlanini, bæði í stýrisbólkinum og innanhýsis í umsitingini, og eftirmetingin verður løgd við, tá verkætlanin skal lokast.

Samstundis er greitt, at áhugamálini, herundir serliga tey fíggjarligu, hjá ymisku pørtunum ikki altíð eru tey somu og ymiskt er, hvussu fatanin er av tilgongdunum. Høvuðsgrundarlagið fyri samstarvinum um ráðgeving og bygging er partalagssáttmálin, ið var undirskrivaður 17. november 2016, og tilhoyrandi høvuðsráðgevaraavtala (sbrt. ABR89) og høvuðsarbeiðstøkusáttmáli frá apríl 2017(sbrt. ABF06). Í hesum

skjølunum eru ásetingar og fyriskipanir um, hvussu ymisku viðurskiftini í verkætlanini skulu handfarast, herundir ásetingar viðv. handfaring av ósemjum. Umsitingin hevur hesi árini lagt nógv orku í at greiða mál og ósemjur so hvørt, og var m.a. á sumri 2018 gjørd ein rímiliga umfatandi broyting/ískoytissáttmáli til partalagsavtaluna fyri at fáa greið fíggjarlig viðurskifti partanna millum. Hesi árini eru gjørd trý siffra tal av ATR-skjølum við ráðgevar og avtaluseðlum við høvuðsarbeiðstakaran. Alt við støði í galdandi sáttmálum.

Í apríl 2020 byrjaði høvuðsarbeiðstakarin Articon-Búsetur Í/F (A/B) at gera galdandi, at felagið metti seg hava krav móti byggiharranum m.a. fyri drál hjá høvuðsráðgevanum í sambandi við útvegan av tekningum í verkætlanini og at tað hevði viðført eyka útreiðslur fyri felagið fleiri ár aftur í tíð, viðurskifti, ið felagið ikki hevði gjørd vart við áður. Hesum er høvuðsráðgevin heilt ósamdur í, og umsitingin sum heild er eisini ósamd í tí (við nøkrum undantøkum) og metir, at kravið frá A/B kemur alt ov seint til at kunna vera tikið við nú. Harumframt er A/B ónøgd við byggiroknskapin í verkætlanini, har tað vísir seg at vera ávís ógreiða um handfaring av einum posti.

Síðani tá hava verið ein longri røð av fundum bæði í stýrisbólkinum og aðrir samráðingarfundir millum leiðsluna í A/B og verkætlanarleiðsluna hjá TK og til tíðir eisini EIND, har roynt hevur verið at fáa yvirlit yvir páhaldini hjá A/B og annars at fáa gjørt verkætlanina upp, samstundis hevur verkætlanarleiðslan hjá TK saman við byggileiðsluni samskift við A/B og høvuðsráðgevan um at fáa avklárað, gera avtalu um restspurningar og fáa seinastu viðurskiftini avkláraði, uppgjørd og greidd. Í verandi støðu fyriliggur ikki ein sluttuppgerð og endaligur byggiroknskapur, men er væntandi, at uppgerðirnar vera klárar innan stutta tíð.  Umsitingin kemur á fundinum at greiða nærri frá hesum.

Annar høvuðsspurningur, ið hevur verið frammi, er dagurin fyri avhending. TK metir, at avhending var 17. sept 2020, meðan A/B metir, at bygningurin ikki er avhendaður enn og metir seg eiga skotbráð fram til fyrst í 2021. Sbrt. byggirættinum metir umsitingin og byggileiðslan, at bygningurin var avhendaður í september 2020. Í tíðarskeiðnum frá avhending 2020 til nýtslutøkuna hevur A/B avgreitt eitt 4 siffrað tal av manglum. Sum heild verður mett, at bygningurin er væl úr hondum greiddur.

A/B hevur ynskt, at málið um staklutir í sluttuppgerðini og avhendingarviðurskiftini skulu leggjast fyri ein atstøðumann sbrt. partalagssáttmálanum. Fundur kann verða í næstum at velja ein slíkan. Um annar parturin er ónøgdur við úrskurðin hjá hesum ber til at leggja fyri gerðarrættarmál.

Útyvir høvuðsarbeiðstøkuna og høvuðsráðgevingina er ein longri røð av útreiðslupostum. Hesir eru um at vera liðugt uppgjørdir og kemur umsitingin at greiða nærri frá tí á fundinum.

Verkætlanarbúskapur

Høvuðsarbeiðstøkan
Byggiroknskapurin fyri høvuðsarbeiðstøkuna er um at vera liðugur. Eftir stendur at A/B hava sett fram krøv um gjald fyri yvirtíð, og mistar ordrar og umframt er ósemja um uppgerðina av byggiplássinum, rekkverki og onnur smærri viðurskifti. Hartil kemur spurningurin um longda byggitíð, ið vil ávirka postin fyri byggipláss, umframt ávís ósemja um uppgerð av index tí A/B ikki vil taka hædd fyri at felagið fekk forskot í verkætlanini 20 mio.kr, ið síðani stigvíst var sett niður so hvørt acontoumbønir vóru avgreiddar. Hartil metir felagið seg hava rætt til tíðarinsitament, tí felagið metir seg hava latið bygningin til tíðina havandi í huga umstøður, ið tey meta liggja hjá byggiharranum og høvuðsráðgevnum. Harumframt metir A/B seg ikki skula rinda negativt insitament sambært ásetingum í partalagsavtaluni vegna viðurskifti byggiharrans og høvuðsráðgevan.

Í hjálagda skjali (verður hendað á fundinum) er ein uppseting av fíggjarligu støðuni har tað sæst, hvørja meting umsitingin hevur av støðuni, umframt uppskot frá A/B til semju. Eisini framgongur ávegis uppgerð av øðrum útreiðslum byggiharrans.

Høvuðsráðgevingin
1. desember 2020 sendi høvuðsráðgevin EIND Í/F hjálagda skriv til endaliga semju um teirra veiting. Lagt verður upp til at TK rindar 585 tkr. sum endaliga semju, tá krevur ráðgevin fult gjald fyri nøkur ATR-skjøl,

umframt at frítikin fyri at rinda negativt insitatmet sbrt. galdandi partalagsavtalu, umframt ikki taka við krøvum frá TK um ávís projekteringsmistøk. Samstundis gera ráðgevin vart við, at um TK ikki ger semju, gera teir onnur og hægri krøv galdandi. Viðurskifti sum umsitingin sum heild metir ikki eru rímilig og haldbar.

Meting viðv. víðari gongdini
Umsitingin kemur á fundinum at greiða nærri frá metingum kring krøvini. Umsitingin metir sum heild at málini kring EIND eiga at vera greinaði nakað betri og lata tilgongdina við samráðingum ganga nakrar vikur afturat.

Aðrar útreiðslur byggiharrans
Sbrt. hjáløgdu uppgerð sæst støðan. Talan er um staðfestar útreiðslur, ið stórt sæð eru um at vera endaligar. Væntandi eru hesar útreiðslurnar endaliga uppgjørdar í mars 2021.

Samanumtikið
Talan er um eina ógvuliga samansetta støðu og vil umsitingin taka støði í uppgerðini sum hon sær hana. Samstundis er greitt, at A/B hevur eina uppgerð, sum á fleiri økjum víðkir frá. Alternativið til eina semju er fyrst at partarnir velja ein ástøðumann, og um tað ikki ber á mál, so fáa gerðarrætt at meta um og taka støðu til ósemjurnar. Útfallið av slíkari tilgongd vil hava ávísa óvissu fyri báðar partar, umframt fíggjarliga kostnaðir til fyrireikingar, fundir, ráðgevaraútreiðslur og gerðarrættin. Av tí at tað hava verið samráðingar í rúma tíð og av tí at A/B krevur ástøðumann, má sum heild metast, at í hesum umfari eru samráðingarmøguleikin um at vera úttømdur. Viðurskiftini í mun til høvuðsráðgevan eru helst øðrvísi og kunnu lutvíst viðgerast fyri seg.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til:
a). at taka støðu til kravið frá A/B um semju ella um farast skal víðari við at velja ástøðumann sbrt. galdandi partalagssáttmála
b). at umsitingin heldur fram við samráðingunum við Eind sbrt. galdandi partalagssáttmála
c). at umrøða fyribils uppgerðina av øðrum útreiðslum byggiharrans.

Málið verður beint í fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 07. desember 2020:** Samtykt at taka undir við b) og c) í tilmælinum og útseta a).

**Mentamálanevndin 09. desember 2020:** Oyvindur Brimnes, spf. Ráð, greiddi frá.

Ein meiriluti, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal og Jákup Dam, samtykti at gera semju við Articon/ Búsetur og Eind og at taka undir við at játta kr. 21,8 mió. eyka til verkætlanina. Henda játtan er treytað av at Articon/Búsetur og Eind góðtaka semju og at semjan er endalig. Upphæddin verður fíggjað av meirinntøkum 2020.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Halla Samuelsen, mæla til at framhaldandi semjusøking verður gjørd og í øðrum lagi at velja ástøðumann sbrt. galdandi partalagssáttmála.

**Fíggjarnevndin 09. desember 2020:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Bergun Kass og Gunvør Balle, tekur undir við meirilutanum í Mentamálanevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson, tekur undir við minnilutanum í Mentamálanevndini.

**Býráðsfundur 17. desember 2020:** Samtykt við sjey atkvøðum fyri, fýra ímóti og tveimum blonkum at taka undir við meirilutanum í fíggjarnevndini.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turid Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

Blankt atkvøddu: Bjørghild Djurhuus og Helena Dam á Neystabø.

Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

**Ískoyti:**
Til kunningar verður sagt frá, at semjan er undirskriva.

**Fíggjarnevndin 17. februar 2021:** Kunnað varð um málið.

**Býráðsfundur 25. februar 2021:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Samráðingar hevur verið við høvuðsráðgevaratoymið EIND Í/F um endauppgerð. Komið er ikki mál enn, tí ósemja er enn millum partarnar. Víst verður í hesum sambandi eisini til undanfarna viðgerð av ósemju við høvuðsarbeiðstakaran Articon-Búsetur Í/F, sí omanfyri, harímillum sáttmálaásetingar um handfaring av ósemjum.

EIND ÍF krevur nú semju, har:
1. At parturin hjá EIND Í/F í negativa insitamentinum dettur burtur.
2. At parturin hjá EIND Í/F í negativum avtaluseðlum/projekteringsfeilir dettur burtur.
3. At goldið verður fyri gjørd arbeiði í sambandi við listprýði og innbúgv og útgerð (*ATR-skjal 15, 17, 18, 27, 41 og 44), áljóðandi kr. 585.070,79.
4. At goldið verður fyri ráðgeving (einki ATR-skjal) í sambandi við akustik og eyka goymsluskúr kr. 182.709,00.
5. Kreditnota um prosjekteringsleiðslu kr. -150.913,00. (áður útgoldið forskot).
6. Givið verður avslag í samband við møguliga semju kr. -200.000,00
7. At onnur krøv frá EIND Í/F fella burtur, uttan so at Tórshavnar kommuna hevur umbiðið arbeiðið.

*ATR merkir ískoytisavtala til høvuðssáttmála um ráðgeving

Umframt nevndu upphædd vísir EIND á, at tvey sáttmálagjøld (rata 5-20 og 6-20) eru afturhildin, samlað upphædd kr. 481.350.

Samlað upphædd fyri semju er sambært hesum kr. 898.216,79 u/mvg. Sí annars skjal.

Í sambandi við samráðingar við arbeiðstakara á heysti í 2020 boðar EIND TK frá, at tey hava krøv á kr. 586.000 krónur. Nú er kravið kr. 898.216,79 u/mvg. TK hevur einki arbeiðið umbiðið frá EIND Í/F síðani fyrra kravið.

Byggiharrans mótkrøv:
Samráðingar hava verið í drúgva tíð við EIND Í/F, og umsitingin metti seg hava semju á fundi fyri summarfrítíðina 2021. Semja var m.a. um útreiðslur fyri kr. 437.622, sum stavaða frá mistøkum, ið EIND beinleiðis er orsøk til. Onnur krøv uppá kr. 653.770 er ikki liðugt at samráðast um. Fleiri teirra metir umsiting eru ráðgevaramistøk. (sí hjálagt skjal).

Í sambandi við nýtsluloyvið hava myndugleikar víst á fleiri manglar í prosjektinum. Eitt nú er ein taktrappa og fleiri hurðar, sum ikki eru rætt prosjekteraðar, og sum kommunan má keypa inn av nýggjum fyri uml. kr. 200.000.

Samanumtikið er metingin hjá umsitingini at byggiharrin hevur størri krøv móti ráðgevum enn ráðgevarar móti byggiharra.

Fyrr í summar var viðgerð av spurninginum um semju við EIND Í/F viðgjørdur í innanhýsis stýrisbólki á Fløtum. Heimilað var umsitingini at gera semju við ávísum fyritreytum. Hildið var fyrr í summar, at tilboð frá TK um eina null loysn var eitt sera gott tilboð, men hesum tók EIND Í/F tó ikki undir við.

Viðvíkjandi ymsu ATR skjølunum, so er talan um seinkaðar veitingar og ikki ikki lidnar veitingar, sum hava kostað kommununi útreiðslur. Í øðrum førum er talan um arbeiði, sum einki ATR skjal er avtala uppá, og slíkt skal avtalast áðrenn útreiðslur verða settar í gongd, er ein meginregla í avtalugrundarlagnum. Í tveimum førum eru ATR skjøl goldin (41 og 44).

Viðvíkjandi afturhildnu sáttmálagjøldunum metir umsitingin, at ráðgevararnir hava ikki veitt ta tænastu og tilfar sum sáttmálin ásetir. Partur av hesum er at brunaprojektið er ikki liðugt, og at kommunan hevur ikki fingið “as built tekningar og tilfar”. Farið er nú langt út um tíðarfreistir við hesum.

Ráðgevaratoymið hevur harumframt afturhildið tilfar, sum skal til fyri at fáa m.a. nýtsluloyvi. At halda aftur tilfar, tí ósemja er um fíggjarlig viðurskifti, er ikki heimilað sambært ráðgevarasáttmálanum. Ósemjan hevur gjørt, at kommunan verður noydd at keypa uttanhýsis ráðgeving, skal skúlin fáa endaligt nýtsluloyvi.

Um semja, sum EIND Í/F krevur, verður gjørd, so hevur hetta fíggjarligar avleiðingar fyri fíggjarstøðuna í prosjektinum, men ilt er at meta um, hvussu týðandi hetta verður viðvíkjandi møguligum nýggjum fíggjartørvi. Umsitingin greiðir á fundinum frá fíggjarstøðuni á verkætlanini og atlit í hesum sambandi.

**Tilmæli:**

Trivnaðarstjórin, tekniski stjóri og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at taka støðu til kravið frá EIND ÍF um semju og gjald kr. 898.216,79 u/mvg ella um haldast skal fram við samráðingum og møguligum uppmanni sambært galdandi sáttmálum.

**Trivnaðarnevndin 07. oktober 2021:** Nevndin samtykti at innganga endaliga semju á kr. 898.216,79 u/mvg við EIND, treytað av at alt manglandi tilfar verður latið kommununi. Málið verður beint í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 20. oktober 2021:** Samtykt at taka undir við trivnaðarnevndini.

**Býráðsfundur 25. november 2021:** Einmælt samtykt.

# 293/21 Ljósskipan til Ovara vøll í Gundadali

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 15.09.2021 | 212/21 | 21/01067-4 |
| 2 Mentamálanevndin | 15.11.2021 | 278/21 | 21/01067-4 |
| 3 Fíggjarnevndin | 17.11.2021 | 289/21 | 21/01067-4 |
| 4 Býráðsfundur | 25.11.2021 | 293/21 | 21/01067-4 |
| 5 Fíggjarnevndin | 24.11.2021 | 310/21 | 21/01067-4 |

**Upprunin til málið**
Mál: 2005-3037 "Mastrafundamentir og ljós til ovara vøll í Gundadali". Fundament, mastrar og ljós blivu sett upp upp í 2002/03.

**Lýsing av málinum**
Verandi ljósskipan á ovara vølli er við eldast og lýkur ikki krøvinin í vallarreglugerðini hjá FSF. Fundament, mastrar og ljós bleiv sett upp í 2002/03. T.v.s. at øll ljósskipanin á Ovara vølli er skjótt 20 ára gomul. Vanliga hava mastrar eina livitíð uppá 25 ár, so út frá hesum skulu tær skjótt skiftast.

Sbrt. verandi krøvum hjá FSF, so krevst 350 lux við vøllir í dag, har dystir í Betri deildini verða leiktir. Mett verður, at í dag eru áleið 150 lux á vøllinum.

Í UEFA høpi er vøllurin skrásettur sum Cat. 2 vøllur. Hetta merkir, at vøllurin kann nýtast til t.d. U21 landsdystir og í tveimum teimum innleiðandi leikumførini í UEFA kappingum fyri feløg. Spælir felag seg víðari til triðju leikumfar er kravið, at vøllurin er í Cat. 3. Skiftir TK til betri ljós, eru tað onnur viðurskifti sum eisini skulu koma upp á pláss, fyri at vøllurin verður Cat. 3. T.d. støddin á vøllinum og fleiri áskoðarapláss.

Gamla ljósskipanin er ótíðarhóskandi og tekur t.d. ikki hædd fyri ljósdálking. Verandi ljós lýsa ov breitt, sum er til ampa fyri grannar og ferðslu. Kommunan hevur í dag fingið góðar loysnir á Hoyvíksvøllinum og tennisvøllinum, har nýggj ljóstøkni tekur hædd fyri ljósdálking.

Í Danmark eru tey farin at brúka DS/EN 12193 ljós-standardin hjá ES um ljósdalking á ítróttarøkjum. Sambært Umhvørvisdeildini er eingin slíkur standardur í Føroyum, men verður væntandi.

**Hvørjir møguleikar eru?**
Fleiri veitarar eru innan bæði ljós og mastrar, og tað er sostatt nógvar ymiskar loysnir. Her eru nøkur dømi:

1) Einans skifta ljósið út og brúka verandi mastrar.
   Greitt verður frá kostnaðarmeting á fundinum.
   Her skal trygd veitast fyri, at verandi mastrar er nóg góðar til loysnina.

2) Skifta ljós og mastrar út.
   Greitt verður frá kostnaðarmeting á fundinum.
   Her kundi ein loysn verið útvega nýggjar mastrar, ið passa til verandi fundament. T.v.s. at fóturin bara kann boltast í sama stað. Onnur loysn er at útvega lægri mastrar enn verandi, sum eru bíligari, men trygd skal veitast fyri t.d. Lux, ljósdálking og blending.

3) Skifta ljós, mastrar og fundament út.
   Greitt verður frá kostnaðarmeting á fundinum.
   Ístaðin fyri at gera heilt nýtt fundament, er eisini møguleiki at útbyggja/tryggja verandi fundament, alt eftir hvat fyri loysn finst fyri hvørt av teimum fýra fundamentunum.

**Fyrivarni viðv. verandi mastrum**
Er ætlanin at einans skifta ljósið út og brúka verandi mastrar, so hevur umsitingin ávís fyrivarni, tí lítið tøkt skjalatilfar er og mastraveitarin er ikki til longur. LBF hevur tó staðfest, at hetta slagið av mastrum er farið úr framleiðslu, og alt týðir uppá, at tær trygdarliga hava stutta livatíð eftir.

Ivi er eisini um, hvørt mastrarnar megna at bera ljósskipan við 350 lux, tá tað eisini verður hugsað um trýst frá vindi.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**
Ovari vøllur hevur síðstu árini fingið undantak frá FSF viðvikjandi lágu ljósstyrkini. Alsamt fleiri miðvikudystir verða spældir, har 350 lux er ynskiligt eisini viðvíkjandi sjónvarpsgóðskuni.

Ongin upphædd er sett av til nýggja ljósskipan á Ovara vølli í Gundadali.

Greitt svar er ikki komið frá FSF, um tey lata stuðul til nýggju ljósini. FSF skrivar at TK hevur møguleika at søkja um hetta, og so verður tað tikið upp.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamáleiðarin mæla mentamálanevndini til at heimila umsitingini at gera neyvari fyrireikingar og at leggja kostnaðarætlan fyri nýggjari ljósskipan, harundir viðvíkjandi mastrum og fundamentum, til ein komandi fund.

**Mentamálanevndin 15. september 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Ruth Vang var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti:**
Síðani viðgerðina 15. september 2021 hevur verið arbeitt við at kanna møguligu loysnirnar, sum vóru nevndar í málslýsingini til tann fundin.
Tilboð eru fingin uppá ljósprojektørar (LED) og mastrar, umframt at byggifakligu viðurskiftini eru kannaði gjøllari (mastrar, fundament v.m.)

Støðan er, at um ynski er at fáa umleið 350 lux ljósstyrki á leikvøllinum, so ber til at brúka verandi mastrar og seta nýggja projektørar á tær (LED). Hartil krevst legging av nýggjum kaðalum og nýggj streymtalva og annað í hesum sambandi. Verkfrøðingafelagið LBF kemur ætlandi fríggjadagin við endaligari váttan uppá at henda ætlan letur seg gera, herundir at verandi mastrar kunnu brúkast í eini 5-10 ár afturat. Komandi árini verður gjørd árlig kanning av óheftum serfrøðingi av standinum og trygdini á mastrunum og ljósskipanunum.

Í fall hettar er støðan verður mett at verktæltanin kann fremjast fyri 2.100 tkr. íroknað ókent, kommunalt mvg og ráðgeving.
Hinvegin um verkfrøðin ikki kann geva váttan um brúk av verandi mastrum, verður neyðugt at skifta tær út og gevur tað ein meirkostna uppá umleið 700 tkr.

Ávís bíleggingartíð er til projektørar, so væntandi kann nýggja skipanin vera tøk í januar-februar 2022.

Sbrt. galdandi vallarreglugerð hjá FSF, verður ætlaða verkætlanin send FSF til góðkenningar, áðrenn farið verður undir útinning av henni. Eisini hevur áður verið galdandi stuðulsskipan frá UEFA til ljósskipanir og er eisini søkt um tað. Enn er tó ógreitt um hetta verður játtað, men um so er ger tað verkætlanina tað bíligari.

Byggivaldið er somuleiðis spurt um tað er neyðugt at søkja um byggiloyvi. Svar er ikki komið enn!

Í íløguætlanini sambært fíggjarætlanaruppskotinum fyri 2022 er ætlanin at játta kr. 10 mió til at skifta graslíksvøll og ljós v.m. Kostnaðarmetingar verða gjørdar í løtuni og verður lagt fyri politiska viðgerð ætlandi í desember, men endaligi kostnaður er greiður væntandi mars-apríl 2022. Skotið verður tí upp at játta kr. 2,1 mió av hesi játtan til ljósini í Ovara vølli, so at arbeiðið verður liðugt í vetur, og at møguligur fíggjartørvur til arbeiðini á Argjum verður tikin uppaftur tá.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja, at
a) heimila umsitingini at útinna verkætlan við nýggjari ljósskipan til Ovara vøll í Gundadali innan ein fíggjarkarm á 2.100 tkr., og at gera neyðugar sáttmálar í hesum samband,
b) at játta kr. 2.100 tkr. av íløgujáttan á kontu 5775 Ítróttaranlegg treytað av, at játtan er tøk til endamálið.

**Mentamálanevndin 15. november 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 17. november 2021:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini.

**Ískoyti:**
Trivnaðarstjórin ger vart við, at tilmæli b) skal vera soljóðandi: at játta 2.100 tkr. av løgukontu 5775 Ítróttaranlegg í fíggjarætlanini 2022.

**Fíggjarnevndin 24. november 2021:** Samtykt at beina málið í býráðið samsvarandi samtyktini í fíggjarnevndini 17. november 2021 og við omanfyristandandi viðmerking viðv. tilmæli b.

**Býráðsfundur 25. november 2021:** Einmælt samtykt.

# 294/21 Tannlæknastovan : Umbøn ella tilmæli um setan av arbeiðsbólki til útgreinan av framtíðarkarmunum fyri barnatannrøktina (2007-2871)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin | 05.10.2015 | 32/15 | 15/03750-9 |
| 2 Trivnaðarnevndin | 14.02.2019 | 5/19 | 15/03750-9 |
| 3 Trivnaðarnevndin | 15.04.2021 | 29/21 | 15/03750-9 |
| 4 Trivnaðarnevndin | 15.11.2021 | 77/21 | 15/03750-9 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | | | 15/03750-9 |
| 6 Fíggjarnevndin | 17.11.2021 | 305/21 | 15/03750-9 |
| 7 Býráðsfundur | 25.11.2021 | 294/21 | 15/03750-9 |

**Málslýsing:**
Gott 5.000 børn millum 0-16 ár í Tórshavnar kommnunu, skulu sambært løgtingslóg nr. 23 frá 6. mars 1998 um barna- og ungdómstannrøkt, hava tilboð um fyribyrgjandi og viðgerandi tannrøkt.

Kommunan skal tryggja øllum børnum og ungum undir 16 ár, sum búgva í kommununi, møguleika fyri ókeypis fyribyrgjandi og viðgerðandi tannrøkt.

Við heimild í løgtingslógini hevur landsstýrismaðurin í heilsumálum við kunngerð nr. 53 frá 24. apríl 1998 m.a. ásett, at tann kommunala barna- og ungdómstannrøktin skal umfata:

1. Vanlig fyribyrgjandi tiltøk, herundir upplýsningsvirksemi v.m.
2. Regluligar kanningar viðvíkjandi menning og heilsustøðuni í tann-, munn- og kjálkaøkinum.
3. Einstøk fyribyrgjandi tiltøk, herundir upplýsing av tí einkulta og foreldrum, og leiðbeining í tannrøkt fyri tann einkulta.
4. Viðgerð av sjúkum í tann-, munn-, og kjálkaøkinum og tannjavning í samsvar við danskar reglur fyri ortodontivisitatión og ortodontiindikatión.

**Karmarnir í dag:**
Kommunala barna- og ungdómstannrøktin heldur til í Tórsgøtu 23, har karmarnir eru tambaðir so nógv, sum yvirhøvur til ber. Umframt er í skúlanum í Kollafirði ein tannrøktareind. Ætlanin er eisini at gera eina tannlæknastovu á nýggja skúlanum, sum bygdur verður í Hoyvíkshaganum.

Tórshavnar kommuna hevur sáttmála við Bergtóru Hanusardóttir, sertannlækna, har børn við tannrættingartørvi fáa viðgerð. Hesin sáttmáli er galdandi fram til skúlaársenda í 2008. Um sáttmálin tá verður longdur, verður tað væntandi bert við einum ári í senn. Tí er neyðugt nú at umhugsa, hvussu kommunan framhaldandi kann tryggja, at børn við tannrættingartørvi fáa neyðuga viðgerð.

Sigrid Arge, tannlæknastjóri mælir til, at settur verður arbeiðsbólkur at gera tilmæli um, hvussu kommunan eisini í framtíðini kann tryggja øllum børnum og ungum ta lógarásettu fyribyrgjandi og viðgerðandi tannrøktina. Her verður serliga hugsað um tær trongu hølisumstøðurnar og óvissuna í sambandi við viðgerðina av børnum við tannrættingartørvi.

**Tilmæli:**
Mælt verður til at heimila trivnaðarstjóranum at seta arbeiðsbólk at gera tilmæli um, hvussu kommunan eisini í framtíðina kann tryggja øllum børnum og ungum ta lógarásettu fyribyrgjandi og viðgerðandi tannrøktini. Bólkurin skal eisini útgreina hølistørvin serliga við atliti til viðgerðina av børnum við tannrættingartørvi, og koma við tilmæli um, hvussu kommunan í framtíðini kann nøkta tørvin.

**Sosiala nevnd 23. oktober 2007:** Samtykt at taka undir tilmælinum.

Trivnaðarstjórin setti í januar 2008 arbeiðsbólk at gera tilmæli um, hvussu kommunan eisini í framtíðina kann tryggja øllum børnum og ungum ta fyribyrgjandi og viðgerðandi tannrøktina, sum lógin ásetir. Arbeiðsbólkurin skuldi eisini útgreina hølistørvin og koma við tilmæli um, hvussu kommunla tannrøktin karmaliga eigur at verða skipað í framtíðini.

Arbeiðsbólkurin, Sigrid Arge, leiðari á tannlæknastovuni, Unn Jacobsen, barnatannlækni, Bergtóra Hanussardóttir, sertannlækni og Eyðun Jensen, sosialdeildarleiðari hava handað trivnaðarstjóranum álit og tilmæli.

**Sosiala nevnd 9. juni 2009:** Vitjað varð á Tannlæknastovuni, har Sigrid Arge, vegna arbeiðsbólkin, legði fram álitið fyri nevndina.

Samtykt at viðgera málið aftur á einum komandi fundi.

**Sosiala nevnd 1. desember 2009:** Nevndin tekur undir við tilmælinum hjá arbeiðsbólkinum, sum mælir til at barnatannrøktin framyvir verður skipað sum ein sentralklinikk, har ortodontiin er partur av hesum bygnaði í hølum, sum eru gjørd og hóska til endamálið.

Samtykt at heita á byggi- og býarskipanardeildina um at staðseta øki til endamálið.

**Nýtt:** Áheitan um at fáa staðsett øki varð 17. desember 2009 send bygggi- og býarskipanardeildini.

Vísandi til, at hølistørvurin er mettur at vera umleið 1.000 fermetrar, verður víst til Karlamagnusarbreyt sum staðseting.

**Sosiala nevnd 5. apríl 2011:** Nevndin kundi hugsað sær fleiri valmøguleikar at taka støðu til. Um økið við Karlamagnussarbreyt er einasti valmøguleiki, tekur sosiala nevnd undir við hesum og beinir málið í byggi- og býarskipanarnevndina til víðari viðgerð.

Forkvinnan ynskir málið á skrá.

**Trivnaðarnevndin 5. oktober 2015:** Vísandi til, at barnatannrøktin nú eisini hevur lógarskyldu at veita ókeypis tannrøkt til øll undir 18 ár, og at miðnámsskúladepil og stórur fólkaskúli verða bygdir í Marknagili, verður mett skilagott, at sentralklinikk, sum veitir alla barnatannrøkt, herundir sertannlæknaviðgerð, verður staðsett har. Samtykt at heita á byggi- og býarskipanarnevndina um at viðgera staðseting av sentralklinikkini út frá hesum.

**Ískoyti:**
Víst verður til málsgongdina, ið gongur meira enn 10 ár aftur í tíðina, og síðstu samtykt um at fáa staðsett nýggja tannlæknastovu til kommunalu barnatannrøktina.

Í samráð við teknisku fyrisiting verður mett skilabest, at gjørd verður fyrst ein yvirskipað tørvs- og virksemislýsing, harundir meting um samlaðan hølistørv-/støðd og krøv annars, og hetta kann veita eitt betri grundarlag fyri avgerð um staðseting.

Mett verður, at slík yvirskipað lýsing kann gerast liðug fram móti sumrinum.

Vísandi til, at stórur tørvur er á nýggjari tannlæknastovu, er endamál við arbeiðinum eisini at fáa sett hesa bygging á skrá og raðfest í langtíðaríløguætlanini, og at kommunan í hesum sambandi kann seta neyðugt fyrireikingararbeiðið í gongd, eitt nú at útvega byggiskrá.

**Ískoyti:**
Trivnaðarstjórin og tannlæknastjórin mæla til at fyrisitingin ger yvirskipaða tørvs- og virksemislýsing, harundir meting um samlaðan hølistørv og stødd at leggja aftur fyri nevndina.

**Trivnaðarnevndin 14. februar 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum. Samstundis ynskir nevndin vegleiðandi kostnað, soleiðis at tannlæknastovan kemur inn í langtíðar íløgukarmin.

**Ískoyti:**
Forkvinnan setir mál um nýggja tannlæknastovu á skrá.

Viðmerkingar:
Sum omanfyri lýst og sum nevndin eisini er kunnað um í sambandi við vitjan í tannlæknastovuni í Tórsgøtu, so er gamalt ynski um at byggja nýggja tannlæknastovu.

Ásannast má, at trupult hevur verið at fingið málið kjølfest, tó at ávís bygging av tannlæknahølum hevur verið farnu árini í sambandi við skúlabyggingar. Eisini er sertannlæknastova innrættað í hølum í Skúlanum við Løgmannabreyt. Høvuðstannlæknastovan í Tórsgøta lýkur hinvegin bart út ikki krøvini til virksemið. Barnatannrøktin fevnir um 6.300 børn og ung.

Átrokandi er at fáa nýggj høli til vega, og best var, um bygt varð nýtt til endamálið íroknað sertannlæknastovan, tvs. eina miðsavnaða tannlæknastovu (sentralklinikk).

Eingin avgerð um staðseting fyriliggur, men tannlæknastjórin mælir til at byggja á økinum millum Musikkskúlan og Skúlan á Fløtum. Har eru fleiri túsund av børnunum og teimum ungu í grannalagnum (Glasir, Skúlin á Fløtum, Musikkskúlin og fleiri dagstovnar). Harumframt vísir hon á, at hetta er beint við nýggju ringvegirnar við góðum busssambandi.

Á grein 2 er íløgujáttan kr. 1 mió sett av til nýggja lækna-/tannlæknastovu, játtanin er skrásett undir tannrøkt. Heilsu- og eldranevndin viðgerð í løtuni mál um nýggjar kommunulæknaviðtalur (21/00922).

Mett verður, at við parti av hesi játtan ber til at fáa til vega neyðugt tilfar, t.e. neyv tørvs- og virksemislýsing og byggiskrá, sum grundarlag fyri avgerð um staðseting og víðari støðutakan um byggiverkætlan og íløgutørv at raðfesta í íløguætlanini.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin mælir til at umrøða málið.

**Trivnaðarnevndin 15. apríl 2021:** Umrøtt.

**Ískoyti:**
Víst verður til ískoytið omanfyri. Víst verður eisini til fíggjarætlanaruppskotið 2022, har kr. 1 mió er sett av til nýggja tannlæknastovu til Barnatannrøktina. Um samtykt eru kr. 2 mió tøkar til endamálið.

Harumframt verður víst til mál um ymiskan hølistørv innan skúlaøkið, har høli í skúlum, sum Barnatannrøktin í dag brúkar, kundu verið loysn hjá skúlunum í tí sambandi.

Skotið verður upp at skipa fyrireikingararbeiði, har fingin verður til vega byggiskrá, sum m.a. skal lýsa hølis- og funktiónstørv og krøv annars til virksemið og henda ítøkiliga bygning, umframt íblástur frá øðrum

barnatannlæknastovum. Býarskipanardeildin kann standa fyri hesum saman við umboðum fyri tannlæknastovuna o.ø.
Byggiskráin verður grundarlag fyri víðari tilgongd og útboð, har fleiri møguleikar eru at velja. Í bygging sum hesari, ið kommunan ikki hevur so nógvar royndir við, kundi verið skilagott at sett bygginevnd, sum leggur leist fyri fyrireikingararbeiðinum og tilgongdini viðvíkjandi útvegan av projektuppskotum, kostnaði og annars stendur fyri samlaðu verkætlanini.

Mælt verður til at seta kr. 1.000.000 av til endamálið.

Sum eisini framgongur av málinum, skal støða takast til staðseting av nýggjari tannlæknastovu til Barnatannrøktina. Hetta verður at beina til byggi- og býarskipanar-nevndina.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og tannlæknastjórin mæla trivnaðarnevndini til:

- At fáa til vega byggiskrá viðvíkjandi nýggjari tannlæknastovu til Barnatannrøktina, sum savnar alt virksemið á einum stað.
- At stovna løgukontu til endamálið og at játta av galdandi fíggjarætlan kr. 1.000.000 av løgukarmi 2375 Tannrøkt til fyrireikingararbeiðið at beina í býráðið um fíggjarnevndina.
- At heita á byggi- og býarskipanarnevndina um at staðseta nýggju tannlæknastovuna til Barnatannrøktina.
- At heita á býráðið um at velja limir í bygginevnd fyri nýggjari tannlæknastovu til Barnatannrøktina.

**Trivnaðarnevndin 15. november 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 17. november 2021:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein og Tróndur Sigurðsson, atkvøður ímóti tilmælinum frá trivnaðarnvndini og samtykkir soljóðandi broytingaruppskot:

- Fyrisitingin fær til vega eina kravspesifikatión viðvíkjandi nýggjari tannlæknastovu, ið skal bjóðast út í umvendari lisitatión, og settar verða av kr. 1.000.000 til endamálið av løgukarmi 2375 Tannrøkt.

Málið beint í býráðið.

Ein minniluti, Elsa Berg, atkvøður blankt.

**Býráðsfundur 25. november 2021:** Einmælt samtykt.

## 295/21 Spælipláss á Glaðsheyggi

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.11.2021 | 193/21 | 21/04627-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 17.11.2021 | 290/21 | 21/04627-1 |
| 3 Býráðsfundur | 25.11.2021 | 295/21 | 21/04627-1 |

**Upprunin til málið**
Politiskt er ynski at fara undir at dagføra verandi fitness útgerð á Glaðsheyggi, umframt at uppraðfesta økið við spæliútgerð.

**Lýsing av málinum**
Fleiri og fleiri borgarar brúka býin og uppihaldsøkini í býnum. Seinnu árini eru familjurnar í størri mun eisini farnar at brúka uppihaldsøkini í býnum til at stytta sær um løturnar, í staðin fyri einans at halda seg til sítt nærumhvørvið.

Fyri fáum árum síðani varð fríøkið á Glaðsheyggi útgjørt við "fitness-reiðskapi", soleiðis at borgararnir kundu steðga á frá gongutúrinum og røra seg á annan heilsugóðan hátt. Útgerðin treingir til at verða dagførd, umframt at ynski er um at uppraðfesta økið við spælireiðskapi, soleiðis at børn og familjur í størri mun kunnu njóta gleði av økinum, og soleiðis at miðbýurin hevur enn eitt tilboð til barnafamiljurnar í kommununi.

**Lógir, ásetingar o.a.**
I byggisamtyktini liggur økið í 2. Grundumráði.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Økið á Glaðsheyggi liggur í dag sum eitt fríøki millum tað bygda í býnum. Umsitingin metur tað vera upplagt at fara undir at uppraðfesta økið, soleiðis at tað kemur til gagn fyri fleiri borgarar í býnum.
Fyri at fáa eitt nøktandi tilboð upp á uppraðfestingina, verður neyðugt at bjóða dagføringina av "fitness-útgerðini" og spæliplássið út til tveir veitarar at veita, uppseta og viðlíkahalda.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
-

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
-

**Skjøl**
-

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☒ **Nei** ☐

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at heimila umsitingini at bjóða uppraðfestingina av Glaðsheyggi út í undirhondsboð, at seta arbeiðið í gongd, at játta kr. 700.000 av kt. 6275, L62044, Spæliplássi í kommununi og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. november 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 17. november 2021:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. november 2021:** Einmælt samtykt.

## 296/21 Útstykking Stórabrekka

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 19.06.2017 | 138/17 | 17/01822-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 20.06.2017 | 160/17 | 17/01822-1 |
| 3 Býráðsfundur | 20.06.2017 | 172/17 | 17/01822-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 20.09.2017 | 202/17 | 17/01822-1 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | 12.12.2018 | 278/18 | 17/01822-1 |
| 6 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.05.2019 | 87/19 | 17/01822-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 15.05.2019 | 142/19 | 17/01822-1 |
| 8 Býráðsfundur | 23.05.2019 | 112/19 | 17/01822-1 |
| 9 Byggi- og býarskipanarnevndin | 18.05.2020 | 106/20 | 17/01822-1 |
| 10 Byggi- og býarskipanarnevndin | 10.06.2020 | 130/20 | 17/01822-1 |
| 11 Fíggjarnevndin | 11.06.2020 | 146/20 | 17/01822-1 |
| 12 Býráðsfundur | 11.06.2020 | 124/20 | 17/01822-1 |
| 13 Býráðsfundur | 25.06.2020 | 154/20 | 17/01822-1 |
| 14 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.11.2021 | 199/21 | 17/01822-1 |
| 15 Fíggjarnevndin | 17.11.2021 | 291/21 | 17/01822-1 |
| 16 Býráðsfundur | 25.11.2021 | 296/21 | 17/01822-1 |

**Málslýsing:**
Økið eystan fyri Dalin Langa í Hoyvík varð í kommunuætlanini frá 2014 lagt út sum møguligt býarvakstrarøki í Hoyvík. Ynski er nú um at seta í verk eina útstykking á hesum sama øki.

Umsitingin hevur umrøtt spurningin viðvíkjandi framtíðar bygging, og er ynski um at gera eina øðrvísi útstykking á økinum við blandaðum bústøðum. Sum sæst niðanfyri, so skal serstøk byggisamtykt gerast fyri útstykkingina við Dalin Langa, sum umframt at tryggja skilagóða bygging, er við til at staðseta bygningina, atkomu, parkering, fríøki v.m.

Men fyri at seta skjøtul á arbeiðið at fyrireika útstykkingina við Dalin Langa er neyðugt at byrja við eini byggiskrá fyri økið, sum lýsir, hvør bygging talan er um. Tískil verður biðið um, at nevndin góðkennir at farið verður undir at gera eina byggiskrá fyri økið, umframt at bjóða sniðgevingina av útstykkingini út til ráðgeva.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Økið, sum er ogn hjá Tórshavnar kommunu, verður í kommunuætlanini nevnt “Heyggurin” og er 5,1 hektarar til støddar, sí skjalið “Økið eystan fyri Dalin Langa_Kort”. Harafturat liggur økið, sum er partur av matr. 138a, í umráðispartinum A3 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, har ásetingarnar eru:

*1. Økið verður lagt til blandaða bústaða- og miðstaðabygging, har loyvt er at hava handlar, smáhandverk og minni virkir, skrivstovur, stovnar, samkomuhús, heilsubótarhøli og tílíkt.*

*2. Útstykkingar kunnu bert gerast sambært serstakari byggisamtykt.*

*3. Grundstykkini skulu vera í minsta lagi 400 $m^2$ fyri stakhús, 300 $m^2$ fyri tvíhús og 250 m2 fyri raðhús. Ein partur av hesum kann leggjast sum fríøki, tó í mesta lagi 100 $m^2$ fyri hvørt grundstykki.*

*4. Byggistig 0,3*

*5. Nýtslustigið má ikki fara upp um 0,6 fyri stakhús og 0,7 fyri tvíhús, ella raðhús. Tó kann tað fyri grundstykkir, sum eru 200 $m^2$, fara upp til helvtina hægri og fyri stykkir millum 200 $m^2$ og 500 $m^2$ verða sett javnt minkandi niður til vanliga ásetta minstuvídd. Í serstakari byggisamtykt kann nýtslustigið verða roknað út frá heildarbyggingini í mun til eitt náttúrliga avmarkað øki.*

*6. Hús við vanligari mønureising mugu einans verða bygd í tveimum hæddum umframt nýttum lofti og mugu ikki vera hægri enn 6 m til hægsta punkt við útvegg og 9 m til mønuna. Kjallari verður roknaður sum húsahædd. .*

*7. Verða hús bygd við einvegis takhalli ella sløttum taki kann tann lægra síðan í mesta lagi verða 6 m til hægsta punkt við útvegg og tann hægra síðan í mesta lagi verða 7,5 m.*

*8. Er hægsta punkt við útvegg meira enn 6 m, skal frástøðan frá marki økjast við somu longd, sum hægsta punkt er hægri enn 6 m.*

*9. Í serstakari byggisamtykt kann víkjast frá tal av hæddum og verða loyvt at byggja hægri og fyriskipað at húsini verða sett í veglinju ella byggilinju, (víkja frá ásettu byggi- og nýtslustigunum og minstu grundstykkjavídd).*

**Skjøl:**

- Økið eystan fyri Dalin Langa_Kort

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at umsitingin kann fara undir at gera eina byggiskrá fyri útstykkingina, umframt at játta kr. 200.000 av kt. 6475 til sniðgeving av útstykkingini og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 19. juni 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2017:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

Tróndur Sigurðsson luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 20. juni 2017:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Kunnað verður um status í málinum.

**Fíggjarnevndin 20. september 2017:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
SNA Arkitektar hava gjørt eitt uppskot til byggiskrá og skipan av økinum. Sí uppskotið *Stórabrekka-byggiskrá_06122018.*

Økið á Stórubrekku liggur í 100 m hædd og hevur stórsligið útsýni móti norðuri, eystri og suðri. Frá miðbýnum í Havn og niðan til nýggju staðsetingina á Stórubrekku eru fimm kilometrar, og eru handilsmøguleikar, skúlar og stovnar í nærumhvørvinum.

Stórabrekka liggur á eini høvd omanfyri vinnuøkið við Vegin Langa. Økið er óslætt heyggjalendi og liggur út til Dalin Langa, sum er eitt rekreativt øki við gongu/súkklubreyt og uppihaldsøki við Myllutjørn.

Uppskotið, sum SNA Arkitektar hava gjørt, arbeiðir við einum nýggjum býlingi, ið leggur seg júst millum hendan dalin vestanfyri og lendisfallið eystanfyri. Býlingurin er hugsaður sum klingrubygging í trimum fríttliggjandi eindum, har lagt verður upp fyri, at uppruna lendið verður varðveitt og gerst ein stórur partur av býlinginum.

Tær tríggjar eindirnar í klingrubyggingini verða bundnar saman við eini innara vegaskipan við parkering, og eitt øki til felagsparkering er staðsett við innkoyringina til býlingin úr Klingruni. Ein gøtuskipan, ið knýtir seg á verandi lendisgøtuskipan, bindur somuleiðis alt økið saman, og skilja hesar gøturnar seg frá koyrandi ferðslu, so tað framhaldandi verður trygt hjá fólki til gongu.

Klingruskapini verða myndað sum røðir av raðhúsum, har allar bústaðareindirnar fáa útsýni antin út á fjørðin ella móti vakra landslagnum í dalinum, umframt at allar bústaðareindirnar fáa eina síðu við lívd og nærleika. Í miðjuni á hvørjum klingruskapi eru hægri punkthús við íbúðum, har mestsum øll síggja uppum raðhúsini.

Klingruskapini við raðhúsunum eru náttúrliga staðsett í mun til lendið, soleiðis at innara landslagsrúmið liggur hægri, og er tað á hesum hálendinum, at parkeringin er staðsett inni undir langum flagtekjum. Heyggur og grøn øki mynda sostatt økið og skiftið millum raðhúsini, íbúðarbyggingina og parkeringina.

Ymiskt er, hvussu nógvir bústaðir eru í hvørjum klingruskapi, men í fyrsta klingruskapi, sum er hugsað sum fyrsta byggistig rúmast:

- 19 bústaðir í raðhúsi
- 18 íbúðir í punkthúsum
- 28 íbúðir í raðhúsum
- felagsrúm
- dagstovnur

Tá bygt verður tætt, verður mett, at 1,5 bilur til hvørt húskið er nøktandi. Byggisamtyktin setur krav um 1 p-pláss fyri hvørjar 75 $m^2$ íbúð í eini felagsparkering.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Í sambandi við málið *Staðseting av nýggjum og víðkan av verandi dagstovnum 2019*, journal nr. 18/03848, verður málið at leggja fyri á komandi býráðsfundi at samtykkja at staðseta ein nýggjan dagstovn á Stórubrekku. Víst verður á eitt øki á eystaru síðu á Stórubrekku. Í hesum sambandi hevur tekniska deild gjørt viðmerkingar til málið, umframt at víst verður á vega- og kloakkíbindingar v.m., sí kortskjalið.

**Skjøl:**
Stórabrekka-byggiskrá_06122018, journal nr. 17/01822-8
Staðseting av nýggjum og víðkan av verandi dagstovnum 2019, journal nr. 18/03848-1
Dagstovnur_Stórabrekka_Vegaíbinding_Kloakkíbinding, journal nr. 18/03848-9

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at samtykkja skipanaruppskotið sum ætlan fyri Stórubrekku, og at umsitingin arbeiðir víðari við at nágreina uppskotið, áðrenn málið aftur verður at leggja fyri byggi- og býarskipanarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 12. desember 2018:** Nevndin var á staðnum og kunnaði seg um viðurskiftini.
Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Hóast tað var vanligt at búgva tætt saman, so hevur tað í Havn verið óvanligt at byggja húsini saman. Tað eru nógvir fyrimunir við at byggja tætt og lágt, tí tað krevur minni lendi, styttri vegir og leiðingar, betri lívd til vøkstur og tilhald úti, felagsøki, spælipláss og samskifti við onnur.

Fyrst 1950 árunum vórðu raðhús bygd fram við Jóannesar Paturssonar gøtu, og seinni hava vit somuleiðis sæð raðhúsabygging í eysturbýnum m.a. við Bókbindaragøtu, í Tórsbyrgi og á Berjabrekku. Men í 1990 árunum tordi kommunan at gera eina nýggja roynd at byggja tættari bústaðir. Grundin og eldverjuveggir vórðu bygd fyrst, og síðani kundi tann einstaki keyparin taka við og byggja sjálvur og soleiðis seta sín egna dám á innan fyri felags karmarnar. Talan er um tær báðar raðhúsbyggingarnar Millum Gilja og Inni á Gøtu. Hesar byggingarnar eru samansettar av húsum, ið eru bygd eitt og eitt í senn. Úrslitið er ein fín javnvág millum fría valið hjá hvørjum einstakum eigara av innrætting, tilfari og litum og so felags heildina, sum støddir, tekjur og samanbyggingar hava við sær.

Skipanaruppskotið fyri Stórubrekku fevnir um trý klingruskap við ávikavist raðhúsum og íbúðum. Lagt verður upp til, at klingruskapið í miðjuni (byggistig 1), sum somuleiðis er størsta skapið av teimum trimum, verður skipað sum raðhúsabyggingin nevnd omanfyri, at grundin og eldverjaveggirnir fyrst verða gjørdir, og síðani seta einstøku keypararnir sín dám á bygningina. Treytir viðvíkjandi skapi og útsjónd, sum skapa eina heildarmynd av byggingini, verða ásettar í serstaka byggisamtykt. Tað kann t.d. vera, at allar tekjurnar skulu vera eins fyri at skapa eitt samanhangandi strekki og heildarmynd fyri byggingina.

Umrøtt hevur verið við Bústaðir at fara í samstarv um verkætlan at fremja byggistig 3 í verkætlanini, sí skjal yvir klingruskapini og byggistig 1-3. Bústaðir vístu áhuga fyri hesum samstarvi, og tí verður mælt til at fara undir eitt fyrireikandi samstarv.

**Skjøl:**
Stórabrekka_Byggistig 1-3, journal nr. 17/01822-13

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at heimila umsitingini at innheinta tilboð frá ráðgevum uppá projektering av byggistigi 1 at leggja fyri nevndina aftur, at fara í samstarv við Bústaðir um byggistig 3, við tí endamáli at selja økið til Bústaðir at byggja íbúðir á, og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. mai 2019:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Turið Horn, Bogi Andreasen og Bjørg Dam, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein, tekur ikki undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 15. mai 2019:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Marin Katrina Frýdal og Bergun Kass, tekur undir við meirilutanum í byggi- og býarskipanarnevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Helena Dam á Neystabø, tekur ikki undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 23. mai 2019:** Fyrst varð atkvøtt um soljóðandi broytingaruppskot frá Anniku Olsen: Mælt verður til at heimila upsitingini at innheinta tilboð frá ráðgevum uppá projektering av byggistigi 1 at leggja fyri nevndina aftur.

Broytingaruppskotið varð samtykt við sjey atkvøðum fyri, seks ímóti og ongari blankari.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Jákup Dam, Jákup Dam, Turid Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Bjørg Dam, Halla Samulsen og Annfinn Brekkstein.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur bjóðað projektering, útbjóðing og projektuppfylging sum heildarráðgeving av verkætlanini á Stórabrekku í Hoyvík út til ráðgevararnar Arkitekar 99, Brim Arkitektar, SNA og Kontrast, og eru tilboðini soljóðandi:

| | |
|---|---|
| Arkitektar 99: | 6.071.500,00 kr. u/mvg. |
| Brim: | 4.949.430,00 kr. u/mvg. |
| SNA: | 4.829.440,00 kr. u/mvg. |
| Kontrast: | 3.879.250,00 kr. u/mvg. |

Kappast varð uppá prís (80%), samanseting av toymi (10%) og tíðarætlan (10%) og er greitt, at Kontrast vann útboðið við lægsta tilboði.

Stórur munur var á tilboðunum, og mælir umsitingin til at fara í realitets samráðingar við Kontrast um møguligan ráðgevarasáttmála. Um partarnir ikki kunnu semjast um ein sáttmála, verður ynskt at fara í samráðingar við annan ráðgeva.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til, at umsitingin fer í realitetssamráðingar við Kontrast um møguligan ráðgevarasáttmála, at leggja málið fyri aftur nevndina, tá ráðgevaraupphæddin er kend.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 18. mai 2020:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Turið Horn og Bogi Andreasen, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Helena Dam á Neystabøð, tekur ikki undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Umsitingin fer í realitetssamráðingar við Kontrast um møguligan ráðgevarasáttmála. Tá semja er um ein ráðgevarasáttmála, verður málið lagt fyri nevnd aftur til endaliga støðutakan.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til, at kr. 2.300.000 verða játtaðar til ráðgeving av konto 6275, Fríðkan av kommununi, L62034, Vágsbotnur skipan av økinum, á konto 6475, Byggibúning bústaðir, á nýggja verkætlan "Útstykking Stórabrekka", og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 10. juni 2020:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Turið Horn og Bogi Andreasen, samtykti at taka undir við tilmælinum.
Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Helena Dam á Neystabø, atkvøður ímóti.
Barbara Mikkelsen fór av fundinum, meðan hetta málið varð viðgjørt.

**Fíggjarnevndin 11. juni 2020:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunnvør Balle og Bergun Kass, tekur undir við meirilutanum í byggi- og býarskipanarnevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson, tekur ikki undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 11. juni 2020:** Fyrst varð atkvøtt um soljóðandi broytingaruppskoti frá umboðunum hjá Javnaðarflokkinum og Sambandsflokkinum: Mælt verður til at sleppa ætlanini at stykkja út í Stórubrekku og í staðin víðka um frílendið í økinum til eisini at umfata Stórubrekku, sum m.a. skal nýtast til nýggja viðarlund í Hoyvík. Samstundis verður mælt til at staðseta nýggjar útstykkingar við Stórutjørn.

Broytingaruppskotið fall við seks atkvøðum fyri, sjey ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Turið Horn, Jákup Dam, Bergun Kass og Bogi Andreasen.

Síðani varð atkvøtt um meirilutatilmælið frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við sjey atkvøðum fyri, seks ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Turið Horn, Jákup Dam, Bergun Kass og Bogi Andreasen.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

**Býráðsfundur 25. juni 2020:** Samtykt við aðru viðgerð við 7 atkvøðum fyri, 6 ímóti og ongari blankari.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrin Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

**Ískoyti:**
Býráðið samtykti á fundi 30. september 2021 at staðseta nýtt røktarheim við 64 búplássum og 16 atknýttum røktaríbúðum á Stórubrekku í Hoyvík. Víst verður til málið "Nýtt røktarheim við røktaríbúðum", journal nr. 17/03196.

Ætlanin at skipa bústaðarbygging er sostatt slept, og skal henda verkætlanin tí lokast. Ongin játtan er á kontuni, og ongin nýtsla hevur verið síðani 2020.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at loka verkætlanina L64011, Útstykking Stórabrekka, á konto 6475, og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. november 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 17. november 2021:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini.

**Býráðsfundur 25. november 2021:** Einmælt samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

# 297/21 Almannaverkið : Fyrispurningur um grundøki til búfelagsskap

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.11.2021 | 200/21 | 21/00641-5 |
| 2 Fíggjarnevndin | 17.11.2021 | 293/21 | 21/00641-5 |
| 3 Býráðsfundur | 25.11.2021 | 297/21 | 21/00641-5 |

**Upprunin til málið:**
Almannaverkið hevur sent fyrispurning til kommununa um møgulig grundøki til nýggjan búfelagsskap í Tórshavnar kommunu.

**Lýsing av málinum:**
Stórur tørvur er á vardum bústøðum kring landið, og er Almannaverkið í eini tilgongd at skipa eina størri verkætlan um bygging av vardum bústøðum. Verkætlanin verður skipað sum eitt útboð millum privat virkandi, har Almannaverkið ynskir at bjóða 4 ymisk grundøki út til bygging til fýra nýggjar búfelagsskapir, sum ávikavist skulu byggjast í Klaksvík, á Skála, á Toftum og í Tórshavn.

Talan verður um íbúðarbygging, og skal hvør búfelagsskapur rúma 12 íbúðum. Íbúðarbyggingin við vardum bústøðum hjá Bústaðir á Karlamagnusarbreyt í Hoyvík kann nýtast sum fordømi í mun til stødd á bygging, har fótavtrykkið á byggingini er 420 $m^2$. Tørvur er sostatt á einum grundøki, sum er 1800 $m^2$ til støddar. Harafturat er ynskið, at grundøkið liggur nær almennum flutningi og helst miðskeiðis í býnum, tí tey sum koma at búgva har ikki hava koyrikort.

Á fundi millum Almannaverkið og kommununa varð spurningur settur kommununi, hvørjar møguleikar kommunan kundi vísa á í Tórshavn, sum lúka krøvini omanfyri. Víst verður á matr. nr. 1467d á Ternuryggi, sum samtykt er at makaskifta við matr. nr. 1465a. Sí økið á kortskjalinum, sum Almannaverkið er áhugað í at keypa.

**Lógir, ásetingar o.a.:**
Økið liggur í umráðispartinum A3 í 3. grundumráði í almennu byggisamtyktini, har ásetingarnar m.a. eru:

- Økið verður lagt til blandaða bústaða- og miðstaðabygging, har loyvt er at hava handlar, smáhandverk og minni virkir, skrivstovur, stovnar, samkomuhús, heilsubótarhøli og tílíkt.

Ætlaða verkætlanin rúmast innan fyri ásetingarnar í almennu byggisamtyktini.

Servituttur er lýstur á ognina í 1955, at hús ikki mugu verða bygd á trøðni uttan játtan jarðarráðsins. Økið er í dag fevnt av økisásetingini A3 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, sum er byggilendi, men møguliga krevst loyvi frá Búnaðarstovuni í sambandi við bygging á matr. nr. 1467d. Fyrispurningur hesum viðvíkjandi er sendur Búnaðarstovuni.

Harafturat er servituttur lýstur á ognina 1467a tann 10. august 1990, at um vegurin Smærugøta inn til ognina matr. nr. 1467f, Tórshavn, skal dagførast og/ella viðlíkahaldast, so bera eigararnir av ognunum, sum liggja út til vegin (matr.nr. 1467a, 1467d, 1467e og 1467f), í felag útreiðslurnar eftir einum nærri avtalaðum býtislykli.

**Upplýsingar frá umsitingini:**
Økið liggur sum byggilendi og er vælegnað at byggja á, men í sambandi við makaskiftið og ætlaðu byggingina verður neyðugt at marknaumskipa økið til at fevna um áleið 1800 $m^2$. Atkoma til økið og bústaðirnar er frá Smærugøtu, og hevur Skipara- og Navigatørfelagið játtað, at atkoman kann verða umvegis teirra stykki, og verður hetta lýst í skeytinum.

Eigari av grannaognini hevur verið á fundi við kommununa, har ynski varð lagt fram, at ætlaða byggingin ikki verður bygd upp fyri hansara hús, umframt at hann ynskir at keypa 300 $m^2$ at leggja afturat síni ogn. Dømi eru um tillagaða bygging, og verður mett, at kommunan kann selja økið til Almannaverkið við eini treyt um eina loyvda hæddaráseting. Umsitingin metir ikki ráðiligt at selja eitt øki til grannan við tí í huga, at grundstykkið frammanundan er 538 $m^2$ við ábygdum sethúsi og atkomu til grundstykkið, og at grundstykkið til Almannaverkið verður avmarkað í mun til byggingina.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið:**
Umsókn um makaskifti millum matr. nr. 1465a við matr. nr. 1467d, Tórshavn, journal nr. 20/00975.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum):**

**Skjøl:**
Søla av lendi til Almannaverkið (kortskjal), journal nr. 21/00641-11.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**
Almannaverkið hevur ætlanir um at bjóða út øll fýra grundøkini í landinum, har prísurin fyri grundøkið verður ásettur av kommununi í mun til fermetrakostnað, og hvør kostnaðurin er at gera økið byggiklárt. Kostnaðurin verður avmarkaður av, at økið skal brúkast til leigubústaðir.

Kommunan ynskir at selja lendið soleiðis sum tað liggur, t.v.s. at kommunan ikki ger grundstykkið byggiklárt. Vísandi til avmarkingarnar á økinum, sum eru í sambandi við søluna, er keypskostnaðurin mettur at vera 250 kr./$m^2$.

Lagt verður upp til, at tað er Almannaverkið, sum fyrstu 10 árini tillutar búfólkunum eina íbúð. Hetta við ætlan um at leingja avtaluna, men um ætlanin ikki heldur áfram, so skal skrivast í skeytið, at eigarin av grundøkinum verður bundin at hava leigubústaðir á økinum, eisini hóast Almannaverkið ikki heldur fram við avtaluni.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, tekniski stjórin, býararkitekturin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni mæla til at selja Almannaverkinum matr. nr. 1467d fyri 250 kr./$m^2$ sambært kortskjali við tí treyt, at økið einans skal brúkast til leigubústaðir og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. november 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:** Sølan av grundøkinum matr. nr. 1467d er treytað av, at Umhvørvis- og vinnumáláráðið/kommunala eftirlitið góðkennir makaskiftið millum Tórshavnar kommunu og Skipara- og navigatørfelagið av ognunum 1467d og matr. nr. 1465a, Tórshavn.

**Tilmæli:** Kommunustjórin, tekniski stjórin, býararkitekturin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni mæla til at selja Almannaverkinum matr. nr. 1467d fyri 250 kr./$m^2$ sambært kortskjali við tí treyt, at økið einans skal brúkast til leigubústaðir og harumframt at treyta søluna av góðkenning frá kommunala eftirlitinum av makaskifti millum Tórshavnar kommunu og Skipara- og navigatørfelagið av ognunum 1467d og matr. nr. 1465a (j.nr. 20/00975).

**Fíggjarnevndin 17. november 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og byggi- og býarskiparnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. november 2021:** Einmælt samtykt.

# 298/21 Grasagarður - Spælipláss 2021

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.09.2021 | 145/21 | 21/03668-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 06.10.2021 | 240/21 | 21/03668-1 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.11.2021 | 201/21 | 21/03668-1 |
| 4 Mentamálanevndin | | | 21/03668-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 17.11.2021 | 292/21 | 21/03668-1 |
| 6 Býráðsfundur | 25.11.2021 | 298/21 | 21/03668-1 |

**Upprunin til málið:**
Politiskt ynski er at dagføra spæliplássið í Grasagarði.

**Lýsing av málinum:**
Grasagarður, millum Steinatún og Kongagøtu, varð í 2015 innrættað til eitt "klassiskt" spæliøki við spælitólum í miðbýnum. Økið er uml. 2.000 $m^2$ til víddar og fevnir um partar av matriklunum 335, 337 og 338. Umframt spælipláss eru skúlatannlæknastovan og Tilhaldið, sum er savningarstaður hjá teimum eldru í býnum, á matriklunum.

Økið var fyrr tveir vakrir urtagarðar við høgum grótlaðaðum grótgørðum uttanum, men seinni árini eru garðarnir lagdir saman, gøtur skipaðar og grótgarðar lækkaðir. Áðrenn spælipláss varð skipað á økinum, hýsti Grasagarður barnafagnaði, brúðarvígslum, topp-popp konsertum og hátíðarhaldið fyri pisum á Føroya Handilsskúla var eisini vorðin ein fastur táttur. Harumframt var Grasagarður brúktur til ótálmaðan drykkjuskap, grafitti máling og hissini sproytur. Ofta ótespiligt aftaná vikuskiftir, men í dag hevur Grasagarður fingið nýtt andlit og verður nýttur til spæl, uppihald og gjøgnumgongd.

Á økinum eru stór og gomul vøkur trø, mest ahorn, umframt runnar av ymiskum slag, blómur og staudir. Í miðbýnum er av bestu vakstrarmøguleikum og hartil veðurgott, sum er við til at skapa ein fjálgan hugna á staðnum.

Standurin í Grasagarði
Samtykt varð í 2015 at skipa grasplenurnar í Grasagarði til spæliøki hjá børnum. Flag og mold varð gravað av teimum stóru grasplenunum, økið varð drenað og bygt uppaftur við stabilum tilfari, og gummifallundirlag varð lagt á. Skráar á grasplenu vórðu skipaðir við timbursititrappu. Arbeiðið varð boðið út sum heildararbeiðstøka, ið fevndi um jørð- og timburarbeiði, dren- og vatnavveiting, útvegan og uppseting av ljósútgerð og spælιútgerð (klatrinet, trampolinir v.m.) og fallundirlag. Neyðugt var við umfatandi drenings- og lendisarbeiði, og varð tað mesta av fíggingini nýtt til hetta arbeiðið. Úrslitið varð, at fíggingin til spæliútgerðina varð skerd, og gjørdist úrvalið av spæliútgerðini tí einfaldari enn ætlað.

Spæliplássið er nógv vitjað seinastu árini, og sær spæliútgerðin út til at vera í góðum standi uttan at hetta er grundað í eini støðulýsing. Netið í trampolinunum er skift út 1-2 ferðir, men er gummiundirlagið sera litfarið, og er óynsktur gróður á undirlagnum, sum kemst av vantandi viðlíkahaldi. Men ein stórur eftirspurningur er eftir at fáa størri úrval og áhugaverdari spæliøki og útgerð.

Heildarætlan
Ynskið frá umsitingini í 2014 var at gera eitt heildaruppskot fyri allan garðin og ikki bert grasplenurnar, men varð hetta tá avvíst. Hetta sæst aftur sum ein avbjóðing við økinum í dag, tí økið tykist sera sundurbýtt, og grundað á vantandi samanhangin gerast nøkur øki ikki serliga áhugaverd at vera í. Ovari vøllur verður ikki

nógv brúktur mótsett niðara vøll, har nógv børn spæla. Harumframt verður skálin lítið brúktur, hóast hann varð dagførdur við einum klatriveggi.

Í sambandi við eina dagføring av spæliplássinum í Grasagarði er ynskiligt at gera eitt heildaruppskot, sum eisini verður skipað í mun til nærumhvørvið og virksemið í økinum. Hyggjast eigur eftir nýtsluni, hvat riggar og ikki, og út frá hesum velja, hvat skal varðveitast, dagførast og endurnýtast.

Í samsvar við barna- og ungdómspolitikkin hjá Tórshavnar kommunu og tær tilráðingar, ið knýttar eru at børnum og ungum, skal spæliøkið vera ódefinerað í síni innrætting. Hetta grundað á, at tað skal eggja brúkarunum at nýta hugflogið, og skapar spæliplássið sostatt eisini eitt betri haldføri í mun til ta tíðina, sum nýtt verður á økinum. Tað sama ger seg galdandi í mun til litir. Økið skal ikki vera doyvt við alskyns litum.

**Lógir, ásetingar o.a.:**

**Upplýsingar frá umsitingini:**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið:**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum):**

**Skjøl:**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☒ **Nei** ☐

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at heimila umsitingini at innheinta hugskot til heildaruppskot fyri Grasagarð, at játtaðar verða kr. 100.000 av konto 6275, L62044, Spælipláss í kommununi, og at beina málið í fíggjarnevndina umvegis mentamálanevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. september 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at málið verður lagt fyri nevndina aftur á næsta fundi liðugt at taka støðu til.

**Mentamálanevndin 06. oktober 2021:** Útsett.

**Ískoyti:**
Grasagarður er einasta almenna kommunala spæliplássið í Tórshavn, og ynskið er tí, at hetta skilur seg burtur frá spæliplássunum á dagstovnunum og úti í eigarafeløgunum.

Umsitingin hevur sett seg í samband við útlendskan veitara, sum hevur tilvísingar at vísa á um allan heimin, og eru spæliplássini bæði forvitnislig, nýskapandi og øðrvísi í mun til tað klassiska spæliplássið við siðbundnu spæliútgerðini, sum somuleiðis er í samsvari við tilráðingarnar í barna- og ungdómspolitikkinum hjá Tórshavnar kommunu.

Umboð fyri veitara hevur vitjað í Føroyum, og verður eitt heildaruppskot fyri Grasagarð í løtuni tilevnað. Heildaruppskotið verður tøkt til fundin í byggi- og býarskipanarnevndini, og verður tá gjøgnumgingið fyri nevndarlimunum.

**Skjøl:**
Heildaruppskotið verður lagt fram á fundinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at fara undir at dagføra Grasagarð sambært heildaruppskotinum, og at 2 mió. kr. verða játtaðar til gerð av spæliplássinum, harav kr. 500.000 verða játtaðar av L62044, Spælipláss í kommununi og kr. 1,5 mió. av íløguætlan fyri 2022 og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. november 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at játta kr. 2 mió. av íløguætlan fyri 2022.

**Fíggjarnevndin 17. november 2021:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. november 2021:** Einmælt samtykt.

## 299/21 Føroya Ríðingarfelag : Umsókn um trøðna matr. nr. 1156, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.11.2018 | 217/18 | 18/01264-2 |
| 2 Tekniska nevnd | 27.11.2018 | 75/18 | 18/01264-2 |
| 3 Fíggjarnevndin | 05.12.2018 | 359/18 | 18/01264-2 |
| 4 Býráðsfundur | 13.12.2018 | 321/18 | 18/01264-2 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.11.2021 | 226/21 | 18/01264-2 |
| 6 Fíggjarnevndin | 17.11.2021 | 294/21 | 18/01264-2 |
| 7 Býráðsfundur | 25.11.2021 | 299/21 | 18/01264-2 |

**Upprunin til málið:**
Tórshavnar kommuna hevur fingið umsókn frá Føroya Ríðingarfelag um trøðna matrikul 1156 í Havnardali til nýggja kappríðingarbreyt. Í dag hevur felagið eina ríðibreyt uppi í Marknagili umframt aðrar kappingarbreytir í Havnardali, har virksemi felagsins annars heldur til.
Felagið hevur eitt ynski um at betra um verandi breytir og savna allar hesar á einum staði og við hesum savna alt virksemið hjá felagnum úti í Havnardali.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Talan er um eina 500 m langa ríðibreyt úti í Havnardali, ið gongur tvørtur ígjøgnum verandi ríðibreyt, yvir um Tvørá og tvørtur ígjøgnum matrikul 1156. Um tað er møguligt ynskir felagið, at ríðibreytin kemur at liggja soleiðis, at hon sker ígjøgnum horni á matrikul 1157 og at hon skal fara nakrar metrar inn á Flatnahaga matr.nr 1160a (sí j.nr.18-10264-1 Flatmynd av økinum við bana). Sum nú er leigar Felagið lendið, ið gongur heilt upp til Tvørá.

Økið, har felagið ynskir at leggja ríðibanan, hevur eitt hall uppá uml. 30 m og hetta merkir, at banin kemur at hava eina promillu uppá uml. 60. Talan verður tó ikki um eina spreinging av lendinum men um eitt dekk sum verður lagt á soleiðis, at hallið verður javnað út (j.nr. 18-01264-4 ríðiøki_v_m18).

**Lógir, ásetingar o.a.**
Matr.nr. 1156 og 1160a liggja í 4. grundumráði í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, ið er ætlað til landbúnað, alment frílendi og tílíkt. Mælt verður til at matrikul 1156 og og ein partur av 1160a verða ummatrikuleraði til ein matrikul og at matrikulin verður broyttur til D2, samsvarandi við restina av ríðiøkinum (j.nr. 18-01264-5 uppskot til ummatrikulering).

Ein partur av ríðibreytini fer ígjøgnum matr.nr. 1157, ið er eitt D1 øki. Hetta øki er ætlað til almenning, náttúrufriðingar- og mentunarlig endamál og tílíkt. Tískil er neyðugt at taka støðu til um breytin skal flytast útum matr.nr. 1157 ella um tann parturin av matriklinum, ið breytin gongur ígjøgnum skal broytast til D2.

Av tí at talan er um eina breyt, sum gongur tvørtur um eina á, ið er meiri enn 4 m breið hevur áin eina verndarlinju uppá 300 m. Hetta merkir, at øll bygging innan fyri hesar 300 m skal góðkennast av friðingarmyndugleikanum. Sostatt skal ríðibreytin í samb. við byggiloyvi góðkennast av friðingarmyndugleikanum.

Verandi ríðibreyt hevur verið nógv brúkt, og hevur hon verið til stóran gagn, men við einum ætlaðum framtíðar innkomuvegi í økinum, verður ríðibreytin helst ávirkað, um ikki heilt oyðiløgd. Harumframt hevur felagið víst á, at felagið til tíðir hevur stórar trupulleikar av at borgarin nýtir ríðibreytina til at ganga og renna á, tí at rossini ríða so skjótt, og tá er ikki gott við fólki á breytini.

Felagið hevur somuleiðis ætlanir um at byggja nýggjar stallar í økinum, og tá hetta arbeiðið verður framt, er ætlanin at gagnnýta tilfarið frá avgrevstrinum til at byggja nýggju ríðibreytina.

Umsitingin metir, at tað er upplagt at savna alt ríðivirksemið í Havnardali, og metir tískil eisini, at farast skal undir neyðugu broytingarnar í byggisamtyktini, uppsøgn av leigusáttmála, skipan av matrikul viðurskiftunum, keyp av víðkaðum leigusáttmála til ríðingarfelagið o.s.fr.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
17/02742 Umsókn um brúksrætt til økið norðanfyri gøtuna niðan til Tølthøllina. Talan er um felagið FAFU, sum ynskir eitt øki til bygging av ríðihøll við stallum til síni ross. Ynskiligt er at finna eina staðseting til virksemið, og arbeiðir umsitingin við felagnum fyri at finna eina hóskandi staðseting.

15/00497 Umsókn vegna Bogaskjótisamband Føroya um at fáa eitt øki at skjóta á. Tað hevur í fleiri umførum verið umrøtt í politisku nevndunum at staðseta felagið úti í Havnardali uppat virkseminum hjá Føroya Ríðingarfelag. Tað er tó ikki heilt sannlíkt, at virksemini hóska serliga væl til hvørt annað, og tá hugt verður at møguleikunum hjá Føroya Ríðingarfelag at vaksa um teirra virksemi, so eru ætlanirnar við skjótibreytini lagdar á hillina og arbeiðir umsitingin við at finna aðra góða staðseting til Bogaskjótisamband Føroya.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Broyting av almennu byggisamtyktini skal gerast fyri at virksemið skal kunna víðkast.

**Umhvørvisárin**
Einki

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Einki

**Skjøl**
j.nr.18-10264-1 Flatmynd av økinum við bana
j.nr. 18-01264-4 ríðiøki_v_m18
j.nr. 18-01264-5 uppskot til ummatrikulering

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | x | | x | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | x | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☒**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og býararkitekturin mæla til at farast skal undir samráðingar við Landsverk um innkomuvegin, fyri at tryggja rossavirksemið, umframt Havnardal og tá semja er fingin við Landsverk, fara undir samráðingar við traðarleigararnar, broytingarnar í matrikul viðurskiftunum, broytingarnar í byggisamtyktini, at víðkað leigusáttmálan við Fø. Ríðingarfelag og at málið verður beint í býráðið umvegis teknisku nevnd og fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. november 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.
Helena Dam á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Tekniska nevnd 27. november 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 05. desember 2018:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

Helena Dam á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 13. desember 2018:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Føroya Ríðingarfelag søkir um víðkan av leigumálinum við 50.809 fermetrum, soleiðis at samlaða víddin verður 139.507 fermetrar. (Sí kortskjal 18/01264-26.

Endamálið við umsóknini er:

1. Felagið hevur latið kommununi umsókn um byggiloyvi til 3 fjós í Havnardali. Eitt av fjósunum liggur uttan fyri verandi leigumál. Í byggisamtykt er talan um D.2. (Umsókn um byggiloyvi mál 21/00384)
2. Felagið kannar eisini møguleikarnar fyri at gera eina kappríðingarbreyt. Partur av hesi kappríðingarbreytini liggur uttan fyri leigaða økið, og eisini uttan fyri byggisamtyktarligt øki.

Felagið vísir á, at umsóknin um byggiloyvi til fjós, hevur skund.

Vísandi til at felagið hevur sína kappríðingarbreyt í Marknagili, hevur felagið ikki bráðfeingis tørv á lendi til nýggja kappríðingarbreyt.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin, kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni mæla býráðnum til, umvegis byggi- og býarskipanarnevndina og fíggjarnevndina at víðka leigumálið við 50.809 fermetrum til í alt at umfata 139.507 fermetrar, og at alt økið á 139.507 fermetrar verður útlagt til D2 øki í byggisamtyktini. Ískoyti verður gjørt til verandi leigusáttmála, sum annars verður óbroyttur galdandi.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. november 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 17. november 2021:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein og Tróndur Sigurðsson, taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini við tí ískoyti, at øll intriv í økinum skulu taka atlit til og verja ánna í mest møguligan mun.

Ein minniluti, Elsa Berg, atkvøður blankt.

**Býráðsfundur 25. november 2021:** Samtykt við 11 atkvøðum fyri, tveimum blonkum og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Jákup Dam, Annika Olsen, Birgir Nielsen og Ruth Vang.

Blankt atkvøddu: Elsa Berg og Turið Horn.

# 300/21 Umsókn um broyting av byggisamtykt á matr. nr. 1122a, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.11.2021 | 208/21 | 21/03374-2 |
| 2 Býráðsfundur | 25.11.2021 | 300/21 | 21/03374-2 |

**Upprunin til málið**
Eigarar av matrikul 1122a hava søkt um at broyta ásetingarnar fyri øki til A1 øki, sí kortskjal *Áðrenn broyting*.

Alt økið liggur, sum er, í 4. Grundumráði í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, sum er ætlað landbúnaði.

**Lýsing av málinum**
Matrikul 1122a liggur ímillum tveir býlingar, ið lýsa ein ávísan bústaðardám. Eystan fyri matrikulin liggur býlingurin Heimasta Horn við íbúðarhúsum upp móti brætta berginum og vestanfyri liggur økið Miðhorn, har ætlanir eru at byggja íbúðarhús upp ímóti brætta berginum.

Økið liggur á uml. somu hæddarkurv og við líknandi lendisviðurskiftum sum áður nevndu býlingar og kemur tí at binda býlingarnar saman. Fyri at tað skal vera møguligt at byggja á økinum, eigur hetta at verða broytt til A2 øki í almennu byggisamtyktini, heldur enn A1, sum er øki ætlað høgari bústaðabygging, sí kortskjal *Eftir broyting.*

Í Tórshavnar kommunu hevur verið vanligt, at loyvt høgari bygging fram við brøttum lendi. Hetta soleiðis at høg bygging kann loyvast í økjum, uttan at byggingin fer upp um fjallarøðina. Dømi um tílík øki í býnum eru íbúðarøkið við Heimasta Horn, íbúðarøkið við Kongavarða og komandi íbúðarøkið á Oyggjarvegnum.

Ístaðin fyri, at broyta økið til A1 øki, ætlað lágari sethúsabygging, mælir umsitingin til, at økið verður broytt til A2 øki, ætlað høgari bústaðabygging, av tí at mett verður, at hetta hóskar seg betur til økið, og er í trá við onnur líknandi bústaðarøki í býnum.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ásetingar fyri A1 øki í almennu byggisamtyktini eru m.a.:
§5, stk. 1. Loyvt er einans at byggja stakhús, sum eisini kunnu hava eina minni íbúð, ið tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð, og eftir serloyvi frá byggivaldinum tvíhús, sum eisini kunnu hava eina minni íbúð, ið tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð og raðhús og tílíkar bústaðir fyri eitt húski.

Ásetingar fyri A2 øki í almennu byggisamtyktini eru m.a.:
§6, stk. 1. Loyvt er einans at byggja hús í fleiri hæddum til bústaðarendamál. Í sambandi við bygging skal tó bera til at gera rúm til felags nýtslu sum t.d. stovnar, vaskirúm o.a. fyri tey, ið har búgva.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Teldupostur er sendur til umsøkjarar hin 20.09.21 sí fylgiskjal *Fráboðan um, at umsøkjarar taka meting hjá umsitingini til eftirtektar*, har biðið verður um møguligar viðmerkingar til metingina hjá Tórshavnar kommunu, um at broyta byggisamtyktina til A2 øki, ið gongur ímótið umsøkjarans ynski um at broyta øki til eitt A1 øki. Hin 12.10.21 boðaði umsøkjarar frá at tey taka metingina hjá umsitingini hjá Tórshavnar Kommunu til eftirtektar sí fylgiskjal *Fráboðan um, at umsøkjarar taka meting hjá umsitingini til eftirtektar*.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Økið liggur í 4. Grundumráði, og skal broytingin tí góðkennast av friðingarmyndugleikanum.

**Skjøl**
21/03374-7 Áðrenn broyting
21/03374-7 Eftir Broyting
21-03374-6 Fráboðan um, at umsøkjarar taka meting hjá umsitingini til eftirtektar

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☐ **Nei** ☐

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at góðkenna uppskotið til broyting av ásetingum fyri matrikul 1122a frá 4 grundumráðið til A2 øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu sambært kortskjalinum *Eftir broyting*, treytað av loyvi frá friðingarmyndugleikanum og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. november 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 25. november 2021:** Einmælt samtykt.

# 301/21 Broyting av almennu byggisamtyktini fyri matr. nr. 4a til A3 øki, í smb. við útstykking oman fyri Argjahamar

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.11.2021 | 207/21 | 21/04189-1 |
| 2 Býráðsfundur | 25.11.2021 | 301/21 | 21/04189-1 |

**Upprunin til málið**
Stórur fólkavøkstur heldur fram í kommununi og tískil er tað týdningarmikið, at kommunan, við síðuna av tí privatu vinnuni, eisini heldur fram at standa á odda fyri at veita borgarum bústaðir.
Kommunuætlanin vísir á góð lendi til býarvøkstur, m.a. oman fyri Argjahamri. Samtykt er at fara í gongd við eina ætlan at skipa økið bæði við set-, raðhúsum og íbúðum, umframt øki til møguliga stovnsbygging, sí mál nr. 21/01777 og kortskjal *Uppskot til útstykking oman fyri Argjahamri.*

**Lýsing av málinum**
Á býráðsfundi hin 30. september 2021 bleiv einmælt samtykt at játta pening til at fyrireika lendi oman fyri Argjahamri til byggibúning til bústaðir.

Alt økið liggur sum er í 4. Grundumráði í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, sum er ætlað landbúnaði, sí kortskjal *Áðrenn broyting*.

Fyri at kunna byggja bústaðir á lendinum, skal byggisamtyktin broytast. Avgerð er ikki endaliga tikin um hvussu stór grundstykkini skulu vera, hvussu býtið av bústaðarsløgum skal verða og hvussu fríøkini í útstykkingini verða skipaði og tryggjaði. Heldur ikki er avgjørt hvør stovnur, afturat verandi skúla og dagstovni, skal byggjast í økinum, men væntast kann, at tørvur verður á einum røktarheimi við røktaríbúðum í framtíðini. Fyri at hava møguleika fyri at skipa økið, við omanfyri nevndu eindum, er neyðugt at broyta økið til A3 øki í almennu byggisamtyktini sí kortskjal *Eftir broyting*, og tá nærri ætlanir fyriliggja, gera eina serstaka byggisamtykt fyri økið.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ásetingar fyri A3 øki í almennu byggisamtyktini eru m.a.:
§7, stk. 1. Økið verður lagt til blandaða bústaða- og miðstaðabygging, har loyvt er at hava handlar, smáhandverk og minni virkir, skrivstovur, stovnar, samkomuhús, heilsubótarhøli og tílíkt.

§7, stk. 2. Útstykkingar kunnu bert gerast sambært serstakari byggisamtykt.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Tað er týdningarmikið, at útstykkingin í størstan mun tillagar seg lendið og at eitt nú leiðin niðan á Kongavarða verður varðveitt.
Ein umhvørvis árinismeting eigur at verða gjørd av lendinum, áðrenn farið verður undir at skipa tað endaligt, soleiðis at atlit kunnu verða tikin til serlig viðurskiftir í økinum.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
21/01777 – Útstykking oman fyri Argjahamar.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Økið liggur í 4. Grundumráði, og skal broytingin tí góðkennast av friðingarmyndugleikanum.

**Skjøl**
21/04189-3 Áðrenn broyting
21/04189-3 Eftir Broyting
21/01777-3 Uppskot til útstykking oman fyri Argjahamri

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | x | x | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☒**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at broyta byggisamtyktina fyri økið sambært ætlanini fyri økið, sum er í umbúna, frá 4. grundumráði til A3 øki og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. november 2021:** Samtykt at broyta byggisamtyktina fyri økið frá 4. grundumráði til A3 øki og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. november 2021:** Einmælt samtykt.

# 302/21 Uppskot til stuðulslóg til nýggjan uttara ringveg og uppskot til avtalu við TK

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 07.06.2021 | 37/21 | 21/02196-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 16.06.2021 | 160/21 | 21/02196-2 |
| 3 Býráðsfundur | 23.06.2021 | 188/21 | 21/02196-2 |
| 4 Tekniska nevnd | 08.11.2021 | 70/21 | 21/02196-2 |
| 5 Fíggjarnevndin | 17.11.2021 | 297/21 | 21/02196-2 |
| 6 Býráðsfundur | 25.11.2021 | 302/21 | 21/02196-2 |

**Upprunin til málið**
Í sambandi við at samráðingar hava verið millum Fíggjarmálaráðið og Tórshavnar kommunu um at kommunan tekur á seg at gera nýggjan uttara ringveg við íbindingum til Tórshavn er gjørd avtala millum partarnar um, at Føroya landsstýri letur Tórshavnar kommunu stuðul til part av verkætlanini.

**Lýsing av málinum**
Nýggjur uttari ringvegur í Tórshavn hevur verið í umbúna í mong ár og serliga síðani farið var undir at fyrireika Eysturoyartunnilin.

Landsverk hevur arbeitt við at fyrireika henda veg, og í hesi fyrireiking er linjuføring fyri vegin løgd og knútapunkt á linjuføringini staðsett (sí kort í fylgiskjølum). Vegurin verður gjørdur millum rundkoyring oman fyri Sandvíkarhjalla (C) og Marknagilsvegin við Dánjalstrøð (G). Á hesum strekkinum verða knútapunktini C1, C2 og C3, sum eru íbindingar til millum knútapunkt C og knútapunkt E, sum er rundkoyring við Villingadalsvegin/Sundsvegin. Úr knútapunkti E verður tunnil til knútapunkt F, sum er vestan fyri Hotel Føroyar. Í knútapunkti F verður gjørd rundkoyring, sum hevur fýra greinar: Ein í tunnilin, ein oman í knútapunkt G og tvær til Landið at føra ferðsluna til ávikavist Oyggjarvegin og til Sandoyarleiðina.

Alt vegastrekkið millum punkt B og G verður kommunalur vegur.

Samlaði kostnaðurin er mettur til at vera 288 mió. kr.

Stuðulin frá landinum verður í mesta lagið 110 mió. kr., sum ásett er í løgtingslóg um fíggjarligan stuðul til nýggjan uttara ringveg í Tórshavn. Stuðulin verður veittur yvir 5 ár.

Stuðulin er treytaður av, at

- arbeiðið við nýggja uttara ringvegnum verður framt í sama mun, sum stuðul verður goldin út.
- Nýggi uttari ringvegur skal lúka krøv til ferðslutrygd og vera atkomuligur fyri ferðslu til og frá meginøkinum. Hetta er tó ikki galdandi í tíðarskeiðum, tá vegarbeiði og tílíkt verður gjørt.
- Alt vegastrekkið skal haldast frítt fyri forðingar, sum t.d. ferðslubungur, soleiðis at hámarksferðin kann haldast, og ferðslan verður tarnað minst møguligt.
- Nýggjar íbindingar í nýggja uttara ringveg kunnu bert gerast til vegir, sum eru ætlaðir til bilferðslu; ikki til atkomu til bygningar og tílíkt. Er neyðugt at gera nýggja íbinding til annað

enn ein veg, sum bara er ætlaður bilferðslu, skulu hesar fyriskipast soleiðis, at hámarksferðin kann haldast, og ferðslan verður tarnað minst møguligt.

- Útgoldin stuðul kann verða kravdur afturgoldin, um treytirnar ikki verða hildnar. Útgoldin stuðul kann tó ikki verða kravdur afturgoldin, tá løgtingslóg um fíggjarligan stuðul til nýggjan uttara ringveg í Tórshavn er farin úr gildi.
- Fíggjarmálaráðið kann tinglýsa hesa avtalu á matrikulin, tá nýggi uttari ringvegurin er liðugur.

Avtalan er víðari treytað av, at Løgtingið samtykkir uppskotið til løgtingslóg um fíggjarligan stuðul til nýggjan uttara ringveg í Tórshavn, og at Tórshavnar Býráð samtykkir og fremur verkætlanina sambært ásetingum í løgtingslógini og sambært avtaluni millum Fíggjarmálaráðið og Tórshavnar kommunu um Fíggjarligan stuðul til nýggjan uttara ringveg í Tórshavn.

Umsitingin kannar alt tøkt verklagstilfar, forkanningar og alt annað tilfar, sum Landsverk hevur framleitt í sambandi við hesa verkætlan, og sum uttan viðurlag verður latið Tórshavnar kommunu sambært avtaluni.

Byggiskrá verður gjørd við støði í úrslitinum av hesum kanningum, og arbeiðið at fremja verkætlanina verður boðið út av umsitingini sum heildarverkætlan, antin fyri:
- Alla verkætlanina samlað,
- ella fyri vegir og tunnil hvør sær.

Umsitingin arbeiðir í hesum sambandi eisini við at finna fíggingarleist fyri kommununnar part av verkætlanini.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Løgtingslóg um fíggjarligan stuðul til nýggjan uttara ringveg í Tórshavn

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
Innkomuvegur yvirlit, j.nr. 21/02196-4
Avtala_FMR_TK, j.nr. 21/02196-1
LI_uttararingveg, j.nr. 21/02196-1

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís øki í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Frágreiðing um fíggjarlig viðurskifti**
Biðið verður um 1 mió. kr. til at heinta inn uttanhýsis ráðgeving í sambandi við omanfyri standandi fyrireikingar.

| | | |
|---|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>25. november 2021 | Blað nr.: 1182 | |
| | Formansins merki: | |

| | Rakstrarjáttan | Løgujáttan |
|---|---|---|
| **Samlaður kostnaður** | Dkk | Dkk 1.000.000 |
| **Kostnaður í hesum árinum** | Dkk | Dkk 1.000.000 |
| **Tíðarætlan (byrjan/endi)** | Dato | Dato: juni-des 21 |
| **Avleiðingar á rakstur** | | Dkk |

**Játtan:**

| | Á | | | Av | | | Lokað | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Upphædd íalt** | **Deild** | **Verkætlan** | | **Deild** | **Verkætlan** | | **verkætlan** | **Eykajáttan** |
| Dkk 1.000.000 | 8175 | L81037 | | 8175 | LK81042 | | | |
| **Útgreining:** | | | | | | | | |
| Dkk | | | | | | | | |
| Dkk | | | | | | | | |
| Dkk | | | | | | | | |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at tekniska nevnd tekur undir við:

- avtaluni millum Fíggjarmálaráðið og Tórshavnar kommunu um fíggjarligan stuðul til nýggjan uttara ringveg í Tórshavn.
- at umsitingin fær heimild til at gera byggiskrá fyri heildararbeiðstøku.
- at umsitingin fær heimild til at bjóða arbeiðið út í heildararbeiðstøku fyri:
    - Alla verkætlanina samlað,
    - ella fyri vegir og tunnil hvør sær.
- Umsitingin fær játtað ein fíggjarkarm á kr. 1.000.000,- av konto 8175, LK81042, Vegaverkætlanir, á konto 8175, L81037, Innkomuvegur kommunali partur, til at heinta inn uttanhýsis ráðgeving í sambandi við omanfyristandandi fyrireikingar.
- Málið soleiðis verður samtykt og beint víðari í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 07. juni 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 16. juni 2021:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 23. juni 2021:** Einmælt samtykt við teirri broyting, at partar av vegnum/tunnilin kann bjóðast út í innbodnari licitatión.

**Ískoyti:**
Í sambandi við at projektering av tunli og vegum skal gerast, er tørvur á at umsetingini verður heimilað at gera hesar sáttmálar. Í hesum sambandi er tørvur á einum samlaðum karmi á kr. 3.500.000. Hesin karmur er treyt fyri, at projekteringin av innkomuvegnum og tunli kunnu fremjast og gerast liðug. Skotið verður upp, at afturat teimum kr. 1.000.000 og kr. 751.000, sum áður eru játtaðar og framfluttar frá 2020 til verkætlanina L81037 Innkomuvegur kommunalur partur, verða játtaðar kr. 1.750.000, sum ikki verða avgreiddar av ymiskum øðrum kontum og verkætlanum í 2021:

- 500 tkr av løgukarmi LK81042, Vegaverkætlanir,
- 500 tkr av løgukarmi LK81043, Parkeringstunnil,
- 500 tkr av Løgujáttan L81046, Ferðslutrygd við Eysturskúlan
- 250 tkr av Løgujáttan L81043, Dagføring Norðrari Ringvegur við Norðurlandahúsið.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at tekniska nevnd tekur undir við at:

- Umsitingini verður heimilað at gera sáttmálar um projektering av innkomuvegi og tilhoyrandi tunli innan ein samlaðan karm á kr. 3.500.000
- Karmurin til projektering verður fíggjaður av:
  - Verandi tøkari upphædd á L81037 Innkomuvegur kommunalur partur
  - 500 tkr av løgukarmi LK81042, Vegaverkætlanir,
  - 500 tkr av løgukarmi LK81043, Parkeringstunnil,
  - 500 tkr av Løgujáttan L81046, Ferðslutrygd við Eysturskúlan
    250 tkr av Løgujáttan L81043, Dagføring Norðrari Ringvegur við Norðurlandahúsið.

**Tekniska nevnd 08. november 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, men at arbeiðið verður fíggjað av íløguætlan fyri 2022 (Innkomuvegur).

**Fíggjarnevndin 17. november 2021:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein og Tróndur Sigurðsson, taka undir við teknisku nevnd.

Ein minniluti, Elsa Berg, atkvøður blankt.

**Býráðsfundur 25. november 2021:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 12 atkvøðum fyri, einari ímóti og ongari blankari.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Jákup Dam, Turið Horn, Annika Olsen, Birgir Nielsen og Ruth Vang.

Ímóti atkvøddi: Elsa Berg

# 303/21 Umsókn um broytan av serstøku byggisamtykt nr. 7 fyri matr. nr. 1314, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.11.2021 | 205/21 | 21/03962-2 |
| 2 Býráðsfundur | 25.11.2021 | 303/21 | 21/03962-2 |

**Upprunin til málið**
Eigarin av matr. nr. 1314 hevur søkt um at broyta byggisamtyktina fyri matrikulin, soleiðis at raðhús/tvíhús/íbúðir í fleiri enn tveimum hæddum kunnu byggjast á parti av matriklinum (stykki 1, 2, 3, 4 og 5) og sethús á øðrum parti av matriklinum (stykki 6, 7, 8, 9, 10, 11 og 12) , sí skjal *Umsókn* og *Uppskot frá 2001.*

**Lýsing av málinum**
Matr. nr. 1314 liggur í A2 øki og C1 øki í serstøku byggisamtykt nr. 7. Øki A2 er ætlað stakhúsum, ið standa fyri seg, og øki C1 er ætlað almenningi (øki, sum ikki kann byggjast á). Smb. umsóknini hevði C1 øki minkað eitt sindur og vestari partur av A2 økinum hevði verið broyttur til øki ætlað tví-/raðhúsum.

Mett verður, at stykki 1, 2, 3, 4 og 5 hóskar seg at liggja sum øki til raðhús/tvíhús, meðan stykkini 6, 7, 8, 9, 10, 11 og 12 hóska seg at liggja sum sethúsastykkir, soleiðis sum umsøkjari ynskir. Soleiðis fer rað-/tvíhúsabyggingin at verða partur av og hóska til dámin á bústaðabyggingini á Óðinshædd, meðan sethúsabyggingin verður partur av sethúsaøkinum og –dáminum við Stoffalág.

Um rað-/tvíhús verða bygd á stykkjunum 1, 2, 3, 4 og 5 verður mælt til, at hesi fylgja ásetingunum fyri B4 øki í serstøku byggisamtykt nr. 7, ið er øki ætlað tvíhúsum, raðhúsum ella teimum líkar bústaðir. Í umsóknini verður søkt um at hendan byggingin kann vera í fleiri hæddum enn tvær. Her mælir umsitingin til, at hetta verður hildið í í mesta lagi 2 hæddum, soleiðis at byggingin er í sama lutfalli og hóska til dámin við aðra bústaðabygging í B4 økinum á Óðinshædd, og soleiðis at trýstið á økið ikki verður ov stórt.

Um vestari partur av matr. nr. 1314 verður broyttur til B4 øki, verður mælt til, at byggisamtyktin fyri matr. nr. 1317a, 1321a, c, d, e, f, g, h og l somuleiðis verða broyttir til B4 øki. Soleiðis verður talan um eitt samanhangandi B4 øki fram við vinnuøkinum á Óðinshædd. Á matr. nr. 1321c, d, e, f, g og h er tvíhús bygd, á matr. nr. 1321l standa eini sethús, og matr. nr. 1321a og 1317a eru óbygdir. Matr. nr. 1321a er minni enn 200 $m^2$, og tí ber ikki til at byggja eini sethús ella tvíhús á stykkinum. Matr. nr. 1317a er uml. 3400 $m^2$ til víddar. Umsitingin hjá Tórshavnar kommunu hevur verið í sambandi við eigaran, sum í fyrstu atløgu ikki hevði viðmerkingar til broytingina, men ynskti at fáa broytingina sendandi, soleiðis at hann kundi seta seg gjøllari inn í ásetingarnar fyri økið.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ásetingar fyri A2 øki í serstøku byggisamtykt nr. 7 eru m.a.:
- Við teimum undantøkum, ið eru nevnd niðanfyri undir felagsásetingum, skulu eindirnar ikki verða nýttar uttan til sethús og bygd mugu verða einans stakhús, ið standa fyri seg. Á hvørjari ogn kunnu ikki verða bygd uttan eini sethús, við í mesta lagi tveimum íbúðum.

Ásetingar fyri B4 øki í serstøku byggisamtykt nr. 7 eru m.a.:
- Við teimum undantøkum ið nevnd eru niðanfyri undir felagsásetingum, skulu eindirnar ikki verða nýttar uttan til bústaðir, og bygd mugu, einans verða tvíhús, raðhús ella teimum líkar bústaðir.
- Bygt má einans verða í samsvari við góðkendari heildarbyggiætlan fyri hvørja B-eind ella náttúrligan part av henni.

Ásetingar fyri C1 øki í serstøku byggisamtykt nr. 7 eru m.a.:

- C1 verður lagt sum almenningur.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Økið beint vestanfyri er eitt B5 vinnuøki, ið loyvir virkjum í umhvørvisflokki 2-4. Í vegleiðingini um umhvørvisflokking av vinnuvirkjum í Tórshavnar kommunu verður mælt til, at virki í umhvørvisflokki 2-4 hava eina frástøðu til bústaðir á 20-100 metrar. Hetta leggur eina stóra binding á matr. nr. 1314, sí viðhefta skjal "Umhvørvisflokking". Skraveraða økið vísir eina frástøðu frá vinnuøkinum á 20-100 metrar. Tó kann vísast á, at stórur partur av vinnuøkinum á Hálsi og við Óðinshædd er umringað av sethúsabygging, ið liggur tættari at vinnuøkinum enn 20 metrar, so matr. nr. 1314 liggur ikki tættari vinnuøkinum enn onnur sethúsaøki sum t.d. Konmansmýra og Tjarnalág.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

- *SB nr. 7 – Áðrenn broyting.pdf*, journal nr. 21/03962-5
- *SB nr. 7 – Eftir broyting.pdf*, journal nr. 21/03962-5
- *Uppskot frá 2001.tif*
- *Umhvørvisflokking.pdf*, journal nr. 21/0962-2
- *Umsókn,* journal nr. 21/03962-7
- *Sb_tórshavn_eysturbýur_1973_7_2019*

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at broyta serstøku byggisamtykt nr. 7 smb. skjalinum *SB nr. 7. – Eftir broyting,* og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. november 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 25. november 2021:** Einmælt samtykt.

# 304/21 Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Hest

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.11.2021 | 202/21 | 21/04429-1 |
| 2 Hest/Koltursnevndin | 24.11.2021 | 5/21 | 21/04429-1 |
| 3 Býráðsfundur | 25.11.2021 | 304/21 | 21/04429-1 |

**Upprunin til málið**
Í málinum *Endurskoðan av byggisamtyktunum fyri bygdirnar* er samtykt, at endurskoða byggisamtyktirnar fyri allar bygdirnar í kommununi.

Fyri fleiri av bygdunum eru byggisamtyktirnar ikki vorðnar endurskoðaðar síðani tær eru blivnar partur av Tórshavnar kommunu, og tí er í nógvum førum ósamsvar millum byggisamtyktirnar fyri bygdirnar og almennu byggisamtyktina fyri Tórshavnar kommunu. Harumframt er munur á hvat loyvt verður í teimum ymisku bygdunum, og hetta ger byggisamtyktirnar fyri bygdirnar torskildar, truplar at umsita og viðførir ójavnvág í kommununi.

Í málinum *Endurskoðan av byggisamtyktunum fyri bygdirnar* eru yvirskipaði viðurskifti viðgjørd við tí endamáli, at fáa eins ásetingar í byggisamtyktunum fyri bygdirnar, tó við nøkrum frávikum, tá talan er um staðbundin viðurskifti og serstakan bygdadám.

Í hesum málinum verður serstaka byggisamtyktin fyri Hest viðgjørd nærri, við støði í yvirskipaðu viðurskiftunum, sum eru viðgjørd í málinum *Endurskoðan av byggisamtyktunum fyri bygdirnar.*

**Lýsing av málinum**
Hestur fekk sína fyrstu serstøku byggisamtykt í 2019. Í uppskotinum til endurskoðan av byggisamtyktini fyri bygdirnar verður mælt til, at bygdirnar Kirkjubøur, Velbastaður, Nólsoy, Hvítanes, Kaldbak og Hestur fáa hvør sína serstaka byggisamtykt, í trá við ásetingarnar fyri 4. Grundumráði í Almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

Mett verður ikki, at serstøku byggisamtyktirnar fyri bygdirnar skulu hava eins nógv ymisk øki, sum almenna byggisamtyktin hevur, av tí at talan er um minni bygdir, har ikki ber til at regulera virksemið eins neyvt og í høvuðsstaðnum. Tí eru tær ymisku ásetingarnar fyri allar bygdirnar samanbornar, og funnið er fram til nakrar felags ásetingar, ið hóska til allar bygdirnar.

Áðrenn endurskoðanina av byggisamtyktini fyri Hest, eru hesi ymisku økini í bygdini:

A: Sethús
B: Havnaøki
D: Almennir stovnar og mentan
E: Neyst og bátapláss
F: Frítíðar- og summarhús
4. grundumráði

Niðanfyri eru ásetingarnar í uppskotinum til endurskoðan av byggisamtyktini fyri Hest, sum smb. uppskotinum eru tær somu fyri allar bygdirnar:

SA: Bústaðarøki
SB1: Havnaøki
SB2: Vinnuøki
SD1: Frílendi

SD2: Almennir stovnar og mentan
SE: Neyst
SF: Frítíðarhús
SG: Bóndahús

Tá kemur til bókstavir og tøl, verða somu tekin brúkt fyri økini í bygdunum sum í høvuðsstaðnum, men við tí muni, at “S” er sett frammanfyri bókstavirnar og tølini, t.d. “S”B1, fyri at vísa til at talan er um øki í eini serstakari byggisamtykt, og ikki í høvuðsstaðnum.

Sum sæst, so eru tað fleiri øki í uppskotinum til endurskoðan av byggisamtyktini fyri Hest, enn tað eru áðrenn endurskoðanina.

Umframt tey økini, sum vóru áðrenn endurskoðanina, so eru SB2 – Vinnuøki, SD1 – Frílendi og SG – Bóndahús. 4. Grundumráði (Landbúnaður) verður tikið úr serstøku byggisamtyktini fyri Hest og lagt undir 4. Grundumráði (Landbúnaður) í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

Tær ávísu broytingarnar í økjum og ásetingum eru nærri lýstar í skjalinum *Hestur – áðrenn og eftir broyting,* og ein meira yvirskipað lýsing er niðanfyri.

**Bústaðarøki**
Bústaðarøkini í Almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu loyva typologiunum stakhús, tvíhús, raðhús og íbúðir. Í bygdunum er ein meting gjørd av, hvør typologi skal loyvast í hvørjari bygd, gjørd út frá m.a. verandi bygging/ásetingum og bygdadámi.

Í Hesti verður mett ráðiligt at loyva stakhúsum og tvíhúsum. Hestur er ein minni bygd og mett verður ikki, at íbúðarbygging og raðhúsabygging hóskar seg til dámin í bygdini.

Í sethúsaøkjum í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu er minsta grundstykkjavídd 500 $m^2$. Í bygdunum verður yvirskipað mett, at grundstykkini kunnu vera minni, og í Hesti verður mett, at ein hóskandi minsta grundstykkjavídd er 300 $m^2$. Hetta m.a. grundað á verandi ásetingar fyri grundstykkjavídd í Hesti og verandi víddir á grundstykkjum í Hesti.

Ásetingar viðv. hædd, byggi- og nýtslustig vera tær somu sum sum fyri sethúsaøki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

**Almenn øki**
Umframt øki til almennar stovnar og mentan, verður tað í bygdunum mett vera skilagott við einum øki til frílendi, har ikki ber til at ikki er loyvt at byggja.

**Neystaøki og øki til frítíðarhús**
Ynski hevur leingi verið um at loyva frítíðarbústøðum í neystum, og mett verður, at ásetingarnar fyri neystaøkini í bygdunum skulu vera soleiðis, at til ber at hava frítíðarbústað á loftinum. Tó, so skulu nakrar treytir verða, t.d. skulu kloakkir og aðrar leiðingar gjaldast av neystaeigarunum og á niðastu hædd skal vera møguligt at hava bát.

Í bygdunum eiga somuleiðis at vera løgd av øki til frítíðarhús. Hesi eiga at liggja í útjaðaranum av bygdini, soleiðis at nærleiki er til almennar hentleikar, uttan at tey gera seg ov nógv inn á bygdalagið – í hesum sambandi eiga atlit so sum støðd á øki, bygging, snið og tílíkt at verða tikin. Á økjunum til frítíðarhús eigur ikki at vera møguligt at búgva alt árið, grundstykkini kunnu vera minni, og til ber at skipa tey annarleiðis enn vanlig bústaðarøki, við t.d. felags parkeringsplássum.

**Landbúnaðarøki**
Sambært almennu byggisamtyktini §26, stk. 5, liggja allar bygdirnar í kommununi í 4. Grundumráði í Tórshavnar kommunu, og hava tær serstakar byggisamtyktir, ið stýra byggingini. Tí verður 4. Grundumráði og onnur landbúnaðarøki tikið úr serstøku byggisamtyktunum fyri bygdirnar.

Í nøkrum av bygdunum var áðrenn endurskoðanin ein serskild áseting fyri øki til bóndahús. Hendan gav festarunum størri frælsi til at umvæla sethús síni, enn ásetingarnar fyri 4. Grundumráði geva. Tí ynskir man, at eitt øki SG: Bóndahús til bóndahús verður í byggisamtyktunum fyri bygdirnar.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Í § 26, stk. 5 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu er ásett at:

- *Í bygdunum Kaldbak, Kaldbaksbotni, Hvítanesi, Norðradali, Syðradali, Nólsoy, Hestur, Koltur, Kirkjubø og Velbastað kann, út um tað, ið er ásett fyri 4. Grundumráði, einans verða bygd sambært serstakum byggisamtyktum.*

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

- *Endurskoðan av byggisamtyktunum fyri bygdirnar,* journal nr. 20/04243.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

- *Hestur – áðrenn endurskoðan*, journal nr. 21/04429-2.
- *Hestur – Eftir broyting*, journal nr. 21/04429-2.
- *Serstøk byggisamtykt – Hestu*r, journal nr. 21/04429-3.
- *Hestur – áðrenn og eftir broyting,* journal nr. 21/04429-4.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at samtykkja uppskotið til endurskoðan av byggisamtyktini fyri Hest smb. skjølunum *Serstøk byggisamtykt – Hestur* og *Hestur - Eftir broyting*, og beina málið í býráðið umvegis staðbundnu nevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. november 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Hest/Koltursnevndin 24. november 2021:** Kunnað varð um málið.

**Býráðsfundur 25. november 2021:** Einmælt samtykt.

# 305/21 Broyting av byggisamtykt fyri havnarøkið í Hesti

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Havnanevndin | 08.06.2021 | 25/21 | 21/02256-1 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.11.2021 | 206/21 | 21/02256-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 17.11.2021 | 299/21 | 21/02256-1 |
| 4 Býráðsfundur | 25.11.2021 | 305/21 | 21/02256-1 |

**Upprunin til málið**
Havnarnevndarformaðurin hevur reist málið at broyta byggisamtyktina fyri partar av havnarøkinum í Hesti.

**Lýsing av málinum**
Tá sambandið millum Sandoynna og Streymoynna varð broytt, bleiv ferjulega bygd á Gomlurætt og í Hesti. Stórt grótkast bleiv gjørt i Hesti, sum gjørdi tað møguligt at hava regluligt sjóvegis samband alt árið.

Útbyggingin í Hesti gjørdi tað eisini møguligt at leggja bátabrúgvar í tí norðara partinum av hylinum. Samband er við bátabrúgvarnar eftir einum vegi, sum gongur frá havnarlagnum við ferjuleguna.
Vegurin liggur eftir einari útfylling framman fyri gomlu fjøruni. Hendan útfyllingin er so breið, at tað í støðum er 8 til 10 m millum vegin og bakkan.

Tá aling var í Hestfirði, bleiv hetta økið brúkt til goymslu av aliútgerð, men síðani alingin steðgaði, hevur økið ikki verið brúkt til nakað ávíst.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Økið er í byggisamtyktin lagt av til havnaøki.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Eitt lítið øki í tí gomlu smábátahavnini er í byggisamtyktini lagt av *til neyst og bátapláss, har tað er loyvt at seta bátar, og fremja neystabygging, sum lutvíst kann brúkast til frítíðarhús.*

Alt økið fram við sjónum, frá gomlu bátahavnini til og við tí nýggja grótkastinum, er avlagt til havnaøki. Í byggisamtyktini stendur, *at økið verður lagt av til havnaendamál og virki, ið hava samband við skipaferðslu, fiskivinnu og til virksemi.*

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Viðm. Frá staðbundnu nevndini í Hesti j.nr. 21/02256-4.

**Skjøl:** J.nr.21/02256-4: Liggur sum fílreferansa

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |

| **Fíggjarliga/búskaparligar avleiðingar** | | | | |
|---|---|---|---|---|

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Havnarmeistarin mælir til, at havnanevndin tekur støðu til, um byggisamtyktin fyri økið millum vegin og bakkan skal broytast til annað enn havnarøki.

**Havnanevndin 08. juni 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum um at broyta byggisamtyktina til summarhús og at heimila umsitinigini at bjóða sølu av lendi út og beina málið í býráðið og fíggjarnevndina umvegis byggi- og býarskipanarnevndina.

**Ískoyti:**
Økið, ið samtykt er at broyta byggisamtyktina fyri, soleiðis at summarhús kunnu byggjast á tí, liggur á havnaøkinum í Hesti. Tað hevur ikki verið vanligt at loyva summarhúsbygging á havnaøkjum í kommununi, men heldur givið loyvi at innrætta ovaru hæddina av neystum til frítíðarbústað. Ásetingarnar fyri neystaøkið hava tó tað binding, at ikki ber til at innrætta neystið til frítíðarhús alt sum tað er, men møguleiki skal vera at hava bát á niðastu hæddini.

Ì málinum um endurskoðan av byggisamtyktunum fyri bygdirnar verður mælt til, at skipan av økjum til frítíðarhús verður gjørt smb. góðkendari útstykkingar- og byggiæltan. Um frítíðarhús skulu byggjast á havnaøkinum í Hesti verður mælt til, at byggingin hóskar seg til staðsetingina, við t.d. at nýta neystaskapið.

Eitt óbygt kommunalt øki til frítíðarhús er í Hesti, matr. nr. 101, sí skjal *Matr. nr. 101*, og hevur tað í fleiri ár verið tosað um, at bygt frítíðarhús á hesum økinum. Hetta vísir staðbundna nevndin fyri Hest somuleiðis á í skrivi sínum, dagfest 18.06.2021, har tað m.a. verður ført fram at:

- Ætlaða broytingin á havnaøkinum heldur kann kallast frítíðarneyst enn summarhús. Økið liggur nær við sjógvin og einki øki er rundanum til plantuvøkstur o.a.
- Eru ikki ímóti, at ætlaða broytingin verður framd, men ynskja ikki, at útstykkingin av summarhús grundstykkjum á matr. nr. 101 verður avloyst av ætlanini at bjóða neystagrundøkir við havnarlagið.

Býarskipanardeildin hevur gjørt ein skitsu av møguligari frítíðarhúsútstykking á matr. nr. 101, sí skjal *Summarhús í Hesti - skitsa*, og skipar hendan økið við smáum stykkjum, við gøtum ímillum og felags økjum og parkeringsplássum. Umsitingin hjá Tórshavnar kommunu er samd við staðbundnu nevndini í ynskinum um, at ætlaða broytingin av byggisamtyktini fyri havnaøkið ikki avloysir ætlanirnar um útstykking til frítíðarhús á matr. nr. 101.

Vísast skal somuleiðis á, at privatir borgarar hava víst matr. nr. 101 áhuga, og ynskja at keypa økið, men umsitingin metir, at hetta er eitt gylt høvi at skipa eina kommunala útstykking til frítíðarhús.

**Tilmæli**:
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at:
- Broyta byggisamtyktina fyri Hest fyri part av matr. nr. 10a smb. kortskjalinum *Eftir broyting*.
- Ein møgulig bygging av frítíðarhúsum á matr. nr. 10a verður gjørt smb. eini góðkendari útstykkingar- og byggiætlan.
- Umsitingin kannar møguleikarnar fyri eini kommunalari útstykking til frítíðarhús á matr. nr. 101.
- Beina málið í Býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. november 2021:** Samtykt at taka undir við pkt. 1 og 2 og at bjóða lendið út til frítíðarhús og beina málið í býráðið.

**Fíggjarnevndin 17. november 2021:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. november 2021:** Tikið av skrá.

# 306/21 Víðkan av sølutorginum í Vágsbotni

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Havnanevndin | 09.03.2021 | 13/21 | 21/00927-1 |
| 2 Havnanevndin | 27.04.2021 | 20/21 | 21/00927-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 28.04.2021 | 98/21 | 21/00927-1 |
| 4 Býráðsfundur | 29.04.2021 | 109/21 | 21/00927-1 |
| 5 Havnanevndin | 16.09.2021 | 32/21 | 21/00927-1 |
| 6 Byggi- og býarskipanarnevndin | 04.10.2021 | 190/21 | 21/00927-1 |
| 7 Havnanevndin | 19.10.2021 | 38/21 | 21/00927-1 |
| 8 Fíggjarnevndin | 20.10.2021 | 271/21 | 21/00927-1 |
| 9 Býráðsfundur | 28.10.2021 | 278/21 | 21/00927-1 |
| 10 Býráðsfundur | 25.11.2021 | 306/21 | 21/00927-1 |

**Upprunin til málið**
Havnarnevndarformaðurin hevur reist málið.

**Lýsing av málinum**
Ynski er um, at bryggjukanturin framman fyri sølutorginum í Vágsbotni verður breiðkaður 2,5 metur við einari longd upp á umleið 35 metur. Hetta skal bøta um atkomuna til sølutorgið.
Eisini er ynski um, at breiðka gongubreytina frá Vágsbotni og 35 metur vestureftir.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Økið fram við sølutorginum í Vágsbotni hoyrir undir byggisamtykt nr. 4 fyri Tinganes og gomlu Havnina.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Vágsbotnur er seinnu árini meira og meira blivin ein partur av miðbýnum, við matstovum, sølutorgi og øðrum líknandi virksemi.
Í 2020 varð skipað fyri einari arkitekta kapping fyri økið í Vágsbotni.

Ásannandi, at bátabrúgvar, bátahavnir, økið á Kongabrúnni og í Vágsbotni, er eitt trivnaðar øki, hevur býráðið í 2005 samtykt, at íløgur á hesum økinum, verða fíggjaðar av Tórshavnar kommunu. J.nr 21/00927-2.

Fyri at koma til eina góða loysn við Vágsbotni og økinum har, eigur eitt uppskot um broyting av økinum at viðgerast í býarskipanarnevndini.

Um bryggjukanturin og gongubreytin skulu flytast longur út, er neyðugt at gera botnkanningar.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Arkitekta kapping í 2020 hevur verið um skipan av økinum á Skálatrøð og Vágsbotni

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/léttar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Havnarmeistarin mælir til at beina málið um víðkan av sølutorginum í Vágsbotni í byggi- og býarskipanarnevndina.
Eisini verður mælt til at gera botnkanningar, at fíggja av konto 7476 smábátahavnir L74007 Bátahylur við Sjógv

**Havnanevndin 09. mars 2021:** Samtykt at arbeiða víðari við málinum og bjóða bryggjukantin út sum heildarloysn millum tríggjar arbeiðstakarar.

**Ískoyti:**
Arbeiðið varð bjóðað út millum J&K Petersen, Articon og West-Trading.

Biðið var um tilboð upp á eina loysn við stuðlamúri og eina loysn við L-elementum.

Lisitatión varð hildin 19.04.2021.
.
Inn komu tilboð frá J&K Petersen og Articon.
Tilboðini upp á stuðlamúr vóru: frá J&K Petersen 2.151.608,- kr. og frá Articon 2.167.322,- kr.

Harumframt hevði Articon tilboð upp á L-element loysn fyri 1.876.000,- kr.

Fyrimunurin við eini elementloysn er, at minni arbeiði er á staðnum.
Viðv. uppgrevstri og planering verður bert arbeitt frá sjósíðuni. Leysa tilfarið á botni kann gravast upp frá krókinum, og ein vegbreyt verður leypandi planerað omanfyri sjóvarmálan fram við bryggjukantinum.
Tá botnurin er planeraður, verða elementini sett niður. Tá er neyðugt, at krani stendur á økinum við sølubásarnar umleið ein dag.
Fylt verður aftanfyri elementini og liðugtgerð av hamara, leiðingum og lendinum kann gerast.

Mælt verður til at taka av tilboðnum frá Articon upp á L-element loysn, og at játta 2.076.000,- kr. til arbeiðið.

Um arbeiðið verður sett í verk 1. mai 2021 verður rokna við, at tað kann verða liðugt í fyrru helvt av juli.

Um arbeiðið verður sett í verk 1. september 2021, verður roknað við, at tað verður liðugt mánaðarskiftið oktober/november.

Vágsbotnur verður nógv vitjaður nú várið og summarið kemur. Hóast arbeiðið í stóran mun verður gjørt frá sjósíðuni, verður mælt til ikki at byrja arbeiðið fyrr enn 1. september 2021. Hetta eigur eisini at geva eitt betri úrslit, tá arbeiðið kann fyrireikast í góðari tíð.

**Tilmæli frá havnameistaranum:** Mælt verður til:

- at taka av tilboðnum frá Articon, at gera bryggjuna av L-elementum fyri kr.1.876.000.
- at arbeiðið byrjar 1. september 2021
- at nevndin tekur støðu til hvussu íløgan skal fíggjast.

**Havnanevndin 27. apríl 2021:**

**Ein meiriluti:** Kári Johansen, Tróndur Sigurðsson, Birgir Nielsen og Annfinn Brekkstein samtykti at taka av tilboðnum frá Articon, at gera bryggjuna av L-elementum fyri kr.1.876.000. Og at fíggja arbeiðið av játtan til bátahyl í Álakeri konto 7460,L 00001íløgukarmar fyri árið. Arbeiðið byrjar beinanvegin.

**Ein minniluti:** Elsa Berg tekur ikki undir við tilmælinum tí hon vil hava at arbeiðið skal gerast í samsvar við ætlanina skipan av Vágsbotn.

**Fíggjarnevndin 28. apríl 2021:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein og Tróndur Sigurðsson, tekur undir við meirilutanum í Havnanevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Annika Olsen og Elsa Berg, atkvøður ímóti.

**Býráðsfundur 29. apríl 2021:** Atkvøtt varð um uppskot frá Gunvør Balle um at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina, ið fall við fýra atkvøðum fyri, níggju ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Jákup Dam, Gunvør Balle og Ruth Vang.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Kristian M. Skála og Birgir Nielsen.

Síðani varð atkvøtt um uppskotið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við níggju atkvøðum fyri, trimum ímóti og einari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Kristian M. Skála og Birgir Nielsen.

Blankt atkvøddi: Ruth Vang.

Ímóti atkvøddu: Elsa Berg, Jákup Dam og Gunvør Balle, ið viðmerkja i gerðabókina, at tey atkvøða ímóti, tí tey vilja hava, at arbeiðið skal gerast í samsvari við ætlanina skipan av Vágsbotni.

**Býráðsfundur 29. apríl 2021:** Atkvøtt varð um uppskot frá Gunvør Balle um at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina, ið fall við fýra atkvøðum fyri, níggju ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Jákup Dam, Gunvør Balle og Ruth Vang.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Kristian M. Skála og Birgir Nielsen.

Síðani varð atkvøtt um uppskotið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við níggju atkvøðum fyri, trimum ímóti og einari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Kristian M. Skála og Birgir Nielsen.

Blankt atkvøddi: Ruth Vang.

Ímóti atkvøddu: Elsa Berg, Jákup Dam og Gunvør Balle, ið viðmerkja i gerðabókina, at tey atkvøða ímóti, tí tey vilja hava, at arbeiðið skal gerast í samsvari við ætlanina skipan av Vágsbotni.

**Ískoyti:**
Arbeiðið at breiðka bryggjukantin 35 m frá Vágsbotni og suðureftir, er liðugt.

Alt strekkið, frá krókinum og út á endan á tí gamla bryggjukantinum, er tilsamans 94 m, sum merkir, at um allur bryggjukanturin skal breiðkast, mangla tað 59 m í.

Dýpið á tí innara strekkinum er 2½ m. Á tí uttara strekkinum er tørvur á at leggja størri bátar, tí eigur dýpið ikki at fara undir 3 m, sum er dýpið á verandi bryggju.
Best hevði verið, um dýpið kundi komið niður á 3,5 m.

Miðskeiðis í økinum liggur ein flótandi eind, sum verður brúkt til vitjandi bátar og uppihaldsøki annars. Um bryggjan skal breiðkast, verður neyðugt at stytta tað flótandi eindina.

At breiðka teir eftirverandi 59 m, líkist nógv tí fyrra arbeiðinum, tí eigur tað at bera til at samráðast við tann sama arbeiðstakaran.
Partur av fyrireikingini eigur at vera, at gera neyvar botnkanningar saman við arbeiðstakaranum, so tær óvantaðu útreiðslurnar verða avmarkaðar.

Økið er partur av Vágsbotni, og eigur eisini at verða viðgjørt av býarskipanarnevndini.

**Havnarmeistarin mælir til:**
At samráðast við sama arbeiðstakara, fyri at koma við einari ætlan og einum samlaðum kostnaði, við grundarlagi í botnkanningum, sum eru gjørdar av arbeiðstakara og -ánara í felag.

At fíggjarnevndin vísir á fígging

At beina málið í býarskipanarnevndina.

**Havnanevndin 16. september 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina. Og taka sølutorgið við sum ein part av málinum.

**Ískoyti:**
Býarskipanarliga verður mett best, um bryggjukanturin verður longdur heilt út til verandi træbrúgvar longur suðuri, soleiðis at teinurin kann upplivast sum ein heild. Talan er helst um eitt 60 metra langt strekki, sum bryggjukanturin skal leingjast.

Víst verður á omanfyri standandi tilmælir, har mælt verður til, at fara í samráðingar við fyrrverandi arbeiðstakaran á økinum og saman við honum at gera neyðugu botnkanningarnar, soleiðis at óvæntaðu útreiðslurnar verða avmarkaðar.

Viðv. Sølutorginum, so er helst neyðugt at fara undir at viðlíkahalda søluplintarnar við nøktandi ljósi o.s.fr., umframt at teir eru nakað illa farnir, grundað á lítið og einki viðlíkahald. Mett verður hóskandi, at fáa søluplintarnar settar í stand, soleiðis at økið kemur at virka á fullgóðan hátt fram til at Vágsbotn-torgið í síni heild verður raðfest.

Fyri at fara undir hetta arbeiðið, so eigur sølutorgið at verða eftirhugt, soleiðis at ábøturnar, sum skulu gerast, verða nágreinaðar. Mett verður, at talan er ikki um eina stóra íløgu, men fyrr enn neyðugu tiltøkini eru skrásett, er trupult at meta um fíggjartørvin.

Um farið verður undir at gera bryggjukantin, og ein arbeiðstakari kemur á økið at arbeiða, so verður mett hóskandi, at sami arbeiðstakari ger neyðuga viðlíkahaldið av sølutorginum, hetta fyri at loysa uppgávuna so skynsamt sum gjørligt.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til:
- At Havnaskrivstovan fer undir samráðingar við arbeiðstakaran, fyri at koma við eini ætlan og einum samlaðum kostnaði, við grundarlagi í botnkanningum, umframt staðfesting av ábótum á søluplintunum, sum eru gjørdar av arbeiðstakara og -ánara í felag.
  At fíggjarnevndin vísir á fígging, og at málið verður beint í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 04. oktober 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í havnanevndina.

**Ískoyti**
Samskift hevur verið við entreprenørin, P/F Articon, sum gjørdi tann fyrra partin av bryggjukantinum frá Vágsbotni og suðureftir, sum vóru lidnir áðrenn ólavsøku.
Arbeiðið umfatar:
- Dýpdarmáting, botnkanning og projektering av betongelementum til leinging av bryggjuni við 60 m.
- Bryggjan verður dimentionerað fyri flatulast upp á 5 kN/m2 og punktlast 45 kN.
- Treytað av, at uppmáting og botnkanningin vísa, at tað er møguligt, so er roknað við dýpi upp á 3,0 m á fyrstu 30 m av leingingini og dýpi upp á 3,5 m á eystasta partinum á leingingini.
- Samanbygging verður gjørd í eystara horni við bryggjuna sum varð gjørd í 2011.
- 7 stk pullartar 10 tons verða settir í bryggjuhamaran og 5 stk gøtuljóssteyar.
- Arbeiðishátturin verður sum við arbeiðinum, sum var gjørt í summar.

Um sáttmáli kann gerast innan 1. nov. 2021 verður arbeiðið liðugt í seinasta lagi 1. apríl 2021, kostnaður kr. 5.175.363,-

Søluplintar:
Ábøtur skulu gerast á søluplintarnar. Hetta arbeiðið er mett til kr.1.000.000

Kafe brúgvin:
Neyðugt verður at stytta brúna, hetta arbeiðið er mett til kr. 100.000

Projekt, eftirlit og óvantað:
Tað eru altíð óvissur bundnar við at arbeiða undir vatnskorpuni, har tað er trupult at skráseta botnviðurskiftini neyvt, saman við eftirlitinum er hetta mett til 12% ella kr. 753.000.

**Tilmæli frá havnameistaranum:** Mælt verður til at gera avtalu við Articon um at gera arbeiðið, og at játta tilsamans kr. 7.028.363,-
At fíggjarnevndin finnur fígging, og at málið verður beint í býráðið.

**Havnanevndin 19. oktober 2021:**

Ein meiriluti: Kári Johansen og Annfinn Brekkstein samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti: Elsa Berg tekur ikki undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 20. oktober 2021:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein og Tróndur Sigurðsson, tekur undir við havnanevndini og játtar kr. 7.028.363 av meirinntøkum og beinir málið í býráðið sum eykajáttan, ið krevur tvær viðgerðir.

Ein minniluti, Annika Olsen og Elsa Berg, tekur ikki undir við tilmælinum, tí aðrar raðfestingar innan tekniska økið eiga at raðfestast fremri, t.d. kloakkir í økinum og orkuskiftið. Tá arbeitt verður við menning av Vágsbotni og nærumhvørvinum eigur arbeiðið at verða gjørt samsvarandi vinnandi arkitektauppskotinum fyri økið.

**Býráðsfundur 28. oktober 2021:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við níggju atkvøðum fyri, trimum ímóti og einari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Birgir Nielsen og Ruth Vang.

Ímóti atvøddu: Elsa Berg, Gunvør Balle og Annika Olsen.

Blankt atkvøddi: Jón Kragesteen.

**Býráðsfundur 25. november 2021:** Samtykt við aðru viðgerð við 12 atkvøðum fyri, einari ímóti og ongari blankari.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Jákup Dam, Turið Horn, Annika Olsen, Birgir Nielsen og Ruth Vang.

Ímóti atkvøddi: Elsa Berg, ið ynskti at fáa viðmerkt í gerðabókina, at hon ikki tekur undir við málinum, tí aðrar raðfestingar innan tekniska økið eiga at raðfestast fremri, t.d. kloakkir í økinum og orkuskiftið. Tá arbeitt verður við menning av Vágsbotni og nærumhvørvinum eigur arbeiðið at verða gjørt samsvarandi vinnandi arkitektauppskotinum fyri økið.

# 307/21 Fíggjarætlan 2022, Tórshavnar kommuna

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 28.09.2021 | 239/21 | 21/03493-3 |
| 2 Býráðsfundur | 30.09.2021 | 237/21 | 21/03493-3 |
| 3 Mentamálanevndin | 06.10.2021 | 244/21 | 21/03493-3 |
| 4 Havnanevndin | 05.10.2021 | 37/21 | 21/03493-3 |
| 5 Vinnunevndin | 07.10.2021 | 33/21 | 21/03493-3 |
| 6 Byggi- og býarskipanarnevndin | 04.10.2021 | 189/21 | 21/03493-3 |
| 7 Tekniska nevnd | 04.10.2021 | 66/21 | 21/03493-3 |
| 8 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 05.10.2021 | 42/21 | 21/03493-3 |
| 9 Trivnaðarnevndin | 07.10.2021 | 69/21 | 21/03493-3 |
| 10 Heilsu- og eldranevndin | 05.10.2021 | 26/21 | 21/03493-3 |
| 11 Fíggjarnevndin | 20.10.2021 | 272/21 | 21/03493-3 |
| 12 Býráðsfundur | 28.10.2021 | 279/21 | 21/03493-3 |
| 13 Fíggjarnevndin | 24.11.2021 | 312/21 | 21/03493-3 |
| 14 Býráðsfundur | 25.11.2021 | 307/21 | 21/03493-3 |

**Upprunin til málið**
Fíggjarnevndin skal sambært kommunustýrislógini leggja uppskot til fíggjarætlan fyri býráðið í seinasta lagi 1. oktober.

Býráðið skal síðani viðgera uppskotið tvær ferðir við í minsta lagi 14 daga millumbili. Fíggjarætlanin skal vera endaliga samtykt í seinasta lagi 1. desember.

Býráðið hevur fyrstu viðgerð 28. oktober og aðru viðgerð 25. november.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Lýsing av málinum**

**Fortreytir fyri fíggjarætlan 2022**
Í uppskotinum til fíggjarætlan 2022 er roknað við, at kommunuskattaprosentið og barnafrádrátturin framhaldandi verða ávikavist 19,00% og 8.000 kr.

Kendar framskrivingar og virksemisbroytingar eru eisini tiknar við.

Virksemisbroytingar eru t.d sáttmála- og lógarbundnar broytingar, rakstrarkostnaðar-ávirkan av nýggjum íløgur og íløgum, ið koma ístaðin fyri aðrar og eisini samtyktar og/ella ætlaðar broytingar í virksemi og tænastustøði.

Í talvuni niðanfyri síggjast høvuðstølini býtt á kommunugreinar.

| tkr | | Roknskapur 2020 | Ætlan 2021 | Ætlan 2022 | Broyting 2021/2022 pst | kr |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | | | | | | |
| **Inntøkur** | | | | | | |
| 20501 | Kommunuskattur | 890.147 | 873.135 | 920.000 | 5,4% | *46.865* |
| 20601 | Felagsskattur | 55.298 | 28.000 | 35.000 | 25,0% | *7.000* |
| 20502 | Húsaleiguskattur | 602 | 2.000 | 2.000 | 0,0% | *0* |
| 20801 | Skattur af eftirlønarinngjøldum | 155.841 | 154.817 | 154.817 | 0,0% | *0* |
| 20802 | DIS, FAS og frádráttir | 36.675 | 33.844 | 36.072 | 6,6% | *2.228* |
| | **Inntøkur íalt** | **1.138.562** | **1.091.796** | **1.147.889** | **5,1%** | ***56.093*** |
| | | | | | | |
| **Rakstur** | | | | | | |
| §1 | Kommunal fyrisiting | 93.422 | 95.895 | 99.138 | 3,4% | *3.243* |
| §2 | Almanna- og heilsumál | 256.186 | 282.668 | 302.171 | 6,9% | *19.503* |
| §3 | Børn og ung | 190.635 | 200.198 | 214.617 | 7,2% | *14.419* |
| §4 | Undirvísing | 42.880 | 45.008 | 47.159 | 4,8% | *2.151* |
| §5 | Mentan og frítíð | 61.694 | 65.573 | 63.830 | -2,7% | *-1.743* |
| §6 | Teknisk mál | 150.203 | 144.852 | 147.141 | 1,6% | *2.289* |
| §7 | Kommunal virkir TK | 87.825 | 79.062 | 81.139 | 2,6% | *2.077* |
| §7 | Kommunal virkir TH | -44.681 | -32.858 | -32.353 | -1,5% | *505* |
| | **Rakstur íalt** | **838.165** | **880.398** | **922.842** | **4,8%** | ***42.444*** |
| | | | | | | |
| **Aðrar útreiðslur** | | | | | | |
| 20101 | Stuðul til rentuútreiðslur | 18.141 | 18.000 | 18.000 | 0,0% | *0* |
| 20910 | Aðrar inntøkur | 3.231 | 2.000 | 2.000 | 0,0% | *0* |
| | **Aðrar útreiðslur íalt** | **21.372** | **20.000** | **20.000** | **0,0%** | ***0*** |
| | | | | | | |
| | **Úrslit áðrenn rentur** | **279.024** | **191.398** | **205.047** | **7,1%** | ***13.649*** |
| | | | | | | |
| **Rentur** | | | | | | |
| 20301 | Rentuútreiðslur TK | - | 800 | 2.225 | 178,1% | *1.425* |
| 20301 | Rentuútreiðslur TH | - | 5.500 | 5.700 | 3,6% | *200* |
| 20401 | Rentuinntøkur TK | - | 0 | 0 | 0,0% | *0* |
| 20401 | Rentuinntøkur TH | - | 0 | 0 | - | - |
| | **Rentur íalt** | **2.517** | **6.300** | **7.925** | **25,8%** | ***1.625*** |
| | | | | | | |
| | **Úrslit av rakstri TK/TH** | **276.507** | **185.098** | **197.122** | **6,5%** | **12.024** |
| | | | | | | |
| | **Avdráttir TK** | **1.234** | **1.234** | **1.234** | **0,0%** | ***0*** |
| | **Avdráttir TH** | **15.873** | **15.873** | **19.900** | **25,4%** | ***4.027*** |
| | **Úrslit av rakstri TK/TH** | **259.400** | **167.991** | **175.988** | **4,8%** | ***7.997*** |
| | | | | | | |
| | **Avlop til skattafíggjaðar íløgur hjá TK*** | **230.592** | **156.506** | **169.235** | **8,1%** | **12.729** |
| | | | | | | |

Búskaparráðið hevur nýliga lagt sína heystfrágreiðing fram, og har metir ráðið fyri 2022 ein búskaparvøkstur/vøkstur í bruttotjóðarúrtøkuni BTÚ upp á 3,3% í leypandi prísum.

Ráðið endurmetir eisini búskaparvøksturin fyri 2020 og 2021. Metingin er nú ávikavist
-2,4% (-6,9%) og 7,9% (5,5%).

**INNTØKURNAR**
Tað ber ikki til at siga, at korona hevur sæst stórvegis aftur í inntøkunum hjá kommununi. Væntandi verður tó felagsskatturin lakari komandi.

Inntøkumetingin av **kommunuskattinum** er við støði í staðfestu inntøkunum fyrstu átta mánaðarnar í 2021 og fíggjarætlanartølini síðstu 4 mánaðarnar við 1,00% væntaðum vøkstri løgdum omaná. Oman á samlaða metta talið fyri 2021 eru síðani løgd 2,00% fyri at koma fram til metingina fyri 2022. Inntøkurnar frá kommunuskattinum vaksa tá 5,4% ella 46,9 mió.kr upp í 920 mió.kr í mun til 873,1 mió.kr í fíggjarætlanini fyri 2021.

Inntøkurnar av **skatti av eftirlønarinngjøldum** eru mettar til 154,8 mió.kr. Hetta er sama metta tal sum fyri 2021. Ein nýgg meting fyri 2022 kemur frá Fíggjarmálaráðnum kemur væntandi skjótt. Fyri 2020 var staðfesta talið 155,8 mió.kr.

Inntøkan frá **felagsskatturin** er fyri 2022 mett at verða 35,0 mió.kr, sum er 7,0 mió.kr ella 25% hægri enn metingin í fjør. Staðfesti felagsskatturin fyri 2020 bleiv 55,3 mió.kr, og tá var metingin 35 mió.kr. Munurin ímillum tá og nú er tó, at Fíggjarmálaráðið væntar, at korona fer at síggjast aftur í rakstrarúrslitunum hjá feløgnum og harvið eisini skattinum.

**Samlaðu inntøkurnar** vaksa sostatt 56,1 mió.kr ella 5,1% upp í 1.147,9 mió.kr í mun til metingina upp á 1.091,8 mió.kr í fíggjarætlanini 2021. Til samanberingar vuksu inntøkurnar í fíggjarætlanini 2021 við 27,4 mió.kr ella 2,6% upp í 1.091,8 mió.kr í mun til fíggjarætlanina 2020.

**RAKSTRARÚTREIÐSLURNAR**
Virksemið í høvuðsstaðarkommununi er enn sum áður í stórum vøkstri.

Talið av íbúgvum í kommununi vaks frá 2020 til 2021 við 1,79% ella 397 upp í 22.607 frá 22.210. Frá 2013 og fram til 2021 er talið av íbúgvum vaksið 2.664 ella 13,4%.

Ein sovorðin vøkstur hevur náttúrliga við sær øking í virksmeminum, tænastunum og harvið eisini rakstrarútreiðslunum.

Samanløgdu rakstrarútreiðslurnar hjá kommununi vaksa í fíggjarætlanini fyri 2022 netto 42,4 mió.kr upp í 922,8 mió.kr úr 880,4 mió.kr. Hetta er ein vøkstur upp á 4,8% í mun til fíggjarætlanina 2021.

**Lønir eru størsti partur av rakstrarkostnaðunum**
Av samlaða bruttokostnaðinum eru lønirnar 61% og 74% av nettokostnaðunum. Fyri ár 2022 eru lønirnar mettar at vaksa 33,8 mió.kr ella 5,17%í mun til fíggjarætlan 2021.

Av hesum vøkstrinum eru 9,96 mió.kr lønarhækkingar, tvs sáttmálabundnar hækkingar.

Haraftrat er tað vøksturin í virkseminum, ið økir um lønirnar við 23,8 mió.kr. Størsti parturin av hesum vøkstri í krónum er á grein 2, og her er tað serliga eldraøkið. Eisini er stórur vøkstur á grein 3, dagstovnaøkið.

Sí talvuna niðanfyri.

| | *tús.kr*<br>**Grein** | **Lønar-<br>hækking** | **Lønar-<br>øking** | **íalt** |
|---|---|---|---|---|
| §1 | Kommunal fyrisiting | 1.443 | 1.576 | **3.019** |
| §2 | Almanna- og heilsumál | 4.128 | 11.097 | **15.225** |
| §3 | Børn og ung | 1.777 | 9.779 | **11.556** |
| §4 | Undirvísing | 392 | 2 | **394** |
| §5 | Mentan og frítíð | 573 | 1.752 | **2.325** |
| §6 | Teknisk mál | 1.117 | -603 | **514** |
| §7 | Kommunal virkir TK | 530 | 251 | **781** |
| | | **9.960** | **23.854** | **33.814** |

**Høvuðsútreiðslutøl á greinunum**

Á **§ 1 Kommunual fyrisiting** økjast nettoúreiðslurnar 3,4% ella 3,2 mió.kr. Størsti parturin av vøkstrinum er í lønum á Teknisku fyrisiting við 1,723 mió.kr / 7,00%. Tvey størv sum byggimálsviðgerðar á tekniska økinum blivu á heysti 2019 játtaði sum eykajáttan og eru harvið ikki í fíggjarætlanini fyri 2022. Hesi mugu tískil raðfestast í 2022. Eisini er lønarvøkstur í Miðfyrisitingini, sum í høvuðsheitum er ein fylgja av øktum lógarkrøvum ísv persónsdátuverju og kt-trygd.

Nettoútreiðslurnar á **§ 2 Almanna- og heilsumál** økjast íalt við 6,9% ella 19,5 mió.kr, herav 15,2 mió.kr er hækking í lønum.

*Barnavernd* økist 0,8 mió.kr ella 13,0%. *Børn sett heiman í fosturfamilju* hækkar 3,2 mió.kr ella 19,2% í mun til í fjør. Av hesum er hækking í lønum 1,9 mió.kr. *Brúkaragjøld, serstovnar* hækkar 1,2 mió.kr., ið er ein hækking á 30,8%. Útreiðslugongdin innan barnaverndarøkið hevur síðstu árini verið vaksandi, lutvíst av vaksandi tali av barnaverndarmálum og vaksandi tali av umsorganaryvirtøkum.

Eldraøkið stendur fyri størstu hækkingini innan almanna- og heilsumál. Serliga er talan um hækking í *konto 2721 Røktartænastur* 8,5 mió.kr svarandi til hækking á 5,7%. Herav eru t.d 800 tkr til heilstænastuna í Nólsoy og 4 mió.kr er uppraðfesting av røktarøkinum. *Konta 2722 Tilboð* hækkar við 2,8 mió.kr, ið er hækkking á 7,6%. 1 mió.kr er til lógarfesta endurvenjing og 1 mió.kr til virksemisfólk. *Lógarbundin ansingarsamsýning* økist 590 tkr ella 23,5%.

Nettoútreiðslurnar á **§ 3 Børn og ung** fylgja í høvuðsheitum barnatalinum og økjast 14,4 mió.kr ella 7,2%.

*Útreiðslurnar í teim fýra eindunum, B-A-R-N* økjast netto 8,6 mió.kr ella 5,8%. Barnatalið økist 18 í vøggustovunum, 28 í barnagørðunum og 46 í frítíðarskúlunum. Harumframt er ein ungdómsklubbur komin aftrat. Útrokningarlykilin er tann sami sum í fjør, tó er lønarstigin hjá leiðarum hækkaður til 29 samsvarandi miðaltalinum. Foreldragjaldið er óbroytt 27%.

*Útreiðslur til systkinaavsláttur* vaksa 2,1 mió.kr ella 16,9%.

*Kontan 3215 Aðrar útreiðslur* lækkar 2,9 mió.kr ella 22%. Lækkingin kemst serliga av, at játtanin til serstovur er tikin úr. Lagt er upp fyri nýggjum dagstovnaplássum svarandi til eina vøggustovu (12 børn) og eina barnagarðsstovu (20 børn), íalt 2,1 mió.kr. Nýggj konta 3218 Serstovur er skipað og økt við 2 mió.kr til 6 mió.kr svarandi til tørvin (barnatal á serstovu).

Nettoútreiðslurnar á **§ 4 Undirvísing** hækka 2,2 mo.kr ella 4,8%. Játtanin fylgir metta næmingatalinum. Størsti vøksturin er ísv nýggja Skúlan á Fløtum, 0,7 mió.kr ella 6,3%, hetta skyldast serliga økt tal av flokkum.

Nettoútreiðslurnar á **§ 5 Mentan og frítíð** lækka 1,7 mió.kr ella -2,7%. Størsta broytingin er lækking í *Stuðul til íløgur* upp á 4,3 mió.kr ella 84,3%, sum er vegna serstsaka játtan í 2020. Musikkskúlin hækkar 1 mió.kr ella 11,3%, sum kemst av øktum undirvísingartímatali eftir broyting í løgtingsfíggjarlógini.

Kontan Ítróttaranlegg økist 520 tkr ella 3,5% vegna nýggjar rakstrarútreiðslur ísv høllina á Fløtum og Tórsvøll.

Nettoútreiðslurnar á **§ 6 Teknisk mál** økjast við 1,6% ella 2,3 mió.kr. Av hesum eru t.d 0,6 mió.kr ella 5,6% øking til fríðkan og viðlíkhald.

Nettoútreiðslurnar á **§ 7 Kommunal virkir** økjast við 5,6% ella 2,6 mió.kr. Konta 7110 Renovatión veksur 1,6 mió.kr ella 7,1%.

----

Í fyriliggjandi uppskoti til fíggjarætlan við nevndu fortreytum og virksemisbroytingum verður úrslit áðrenn rentur 205,1 mió.kr.

Úrslit av rakstri og rentum, men áðrenn avdráttir og íløgur, verður 197,1 mió.kr.

Avlop til skattafíggjaðar íløgur verður 169,2 mió.kr.

Er avlopið til skattafíggjaðar íløgur lægri enn samlaðu íløgurnar, má munurin fíggjast við meiri inntøku og/ella, lægri útreiðslum og/ella lántøku.

Lániskuldin hjá kommununi var síðst í august mánaða 227 mió.kr íalt. Av hesum eru 217 mió.kr knýttar at Tórshavnar havn.

Í samband við byggingina av endurvenjingardepilinum URD var í fíggjarætlanini 2020 tikið hædd fyri eini lántøku á 57 mió.kr. Lánið er ikki tikið enn.

Tórshavnar havn hevur í løtuni eina samlaða lániheimild upp á 64 mió.kr, sum kann takast, um tørvur er á tí.

Býráðið ásetir kommunuskattaprosentið og barnafrádráttin og kann umvegis hesi bæði broyta fortreytirnar fyri fíggjarætlanina.

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávísøkir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/læ ttar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☒** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Sambært kommunustýrislógini skal fíggjarnevndin leggja uppskot til fíggjarætlan fyri býráðið innan 1. oktober.

**Fíggjarnevndin 28. september 2021:** Framlagt og beint í býraðið.

**Býráðsfundur 30. september 2021:** Framlagt.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 04. oktober 2021:** Framlagt.

**Tekniska nevnd 04. oktober 2021:** Framlagt.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 05. oktober 2021:** Framlagt.

**Havnanevndin 05. oktober 2021:** Framlagt.

**Heilsu- og eldranevndin 05. oktober 2021:** Framlagt.

Ein minniluti, Annika Olsen og Birgir Nielsen, mælir til at gongd verður sett á at byggja eldradepilin í Kollafirði, og at neyðug upphædd verður sett av at projektera depilin, soleiðis at byrjast kann at byggja í komandi ári.

**Mentamálanevndin 06. oktober 2021:** Framlagt.

Ein minniluti, Annika Olsen og Ruth Vang, mælir til at hækka normeringarnar á dagstovnaøkinum, sambært framferðarætlan um hægri normering á dagstovnaøkinum, sum var einmælt samtykt á býráðsfundi 26. november 2020.

**Trivnaðarnevndin 07. oktober 2021:** Framlagt.

**Vinnunevndin 07. oktober 2021:** Framlagt.

**Fíggjarnevndin 20. oktober 2021:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein og Tróndur Sigurðsson, taka undir við fyriliggjandi uppskoti til fíggjarætlan fyri 2021 við niðanfyristandandi broytingaruppskoti viðvíkjandi íløguætlanini. Meirilutin beinir málið í býráðið til 1. viðgerð.

## Broytingaruppskot:

| | | |
|---|---|---|
| | | **Íløguætlan 2022** |
| | | |
| | **§2 Almanna- og heilsumál** | **8.000.000** |
| 2375 | Tannlæknamiðstøð | 1.000.000 |
| 2775 | Nýtt røktarheim við røktaríbúðum | 6.000.000 |
| 2775 | Eldradepil í Kollafirði | 1.000.000 |
| | **§4 Undirvísing** | **2.000.000** |
| 4175 | Dagføring av skúlum, Hoyvíkar skúli | 2.000.000 |
| | **§5 Mentan og frítíð** | **89.500.000** |
| 5475 | Býarbókasavn | 2.000.000 |
| 5775 | Tórsvøllur | 13.000.000 |
| 5775 | Fótbóltsvallir / Argir-Hoyvík | 10.000.000 |
| 5775 | Langhylur | 40.000.000 |
| 5775 | Skjótibreyt | 5.000.000 |
| 5775 | Golf | 4.500.000 |
| 5775 | Stórhøll | 10.000.000 |
| 5775 | Fimleikahøll/borgarhús í Kaldbak | 5.000.000 |
| | **§6 Teknisk mál** | **72.200.000** |
| 6175 | Umsiting og røkt av fastari ogn - Keyp av Kurlu | 1.200.000 |
| 6275 | Miðbýðarætlan | 10.000.000 |
| 6275 | Fríðkan av býnum | 5.000.000 |
| 6275 | Fríðkan, bygdir og økir | 2.000.000 |

| | | |
|---|---|---|
| 6275 | Lendisgøtur | 4.000.000 |
| 6275 | Spælipláss, grasagarð, glaðsheygg o.a. | 5.000.000 |
| 6275 | Viðarlundin, træplanting o.a. | 1.000.000 |
| 6275 | Vetrarfriðing í Kollafirði og Nólsoy | 1.000.000 |
| 6675 | Orkupolitikkur - átøk | 8.000.000 |
| 6775 | Vatnreinsiverk í Havnardali | 1.000.000 |
| 6875 | Kloakkir | 8.000.000 |
| 8175 | Parkering | 3.000.000 |
| 8175 | Innkomuvegur | 10.000.000 |
| 8175 | Vegir | 8.000.000 |
| 8375 | Rakstrargøgn (Verkstaðið) | 5.000.000 |
| | **§7 Kommunal virki** | **25.000.000** |
| 7175 | Renovatión | 7.000.000 |
| 7476 | Smábátahavn Álakeri | 18.000.000 |
| | **Íløguætlan uttan TH** | **196.700.000** |

Ein minniluti, Annika Olsen og Elsa Berg, atkvøður blankt.

**Býráðsfundur 28. oktober 2021:** Atkvøtt varð við 1. viðgerð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við átta atkvøðum fyri, fimm blonkum og ongari atkvøðu ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam og Birgir Nielsen.

Blankt atkvøddu: Elsa Berg, Jón Kragesteen, Gunvør Balle, Annika Olsen og Ruth Vang.

**Ískoyti:**
Nýggjastu metingarnar av samlaðu inntøkunum fyri 2021 vísa, at meirinntøkurnar koma at verða umleið 67 mió.kr.

Meira enn  helmingurin av hesum, 36,2 mió.kr, er staðfestar meirinntøkur av partafelagsskatti, sum er grundaður á ársroknskapirnar í 2020.

Kommunuskatturin verður mettur at blíva 10,3 mió.kr hægri enn mett upprunaliga.

Haraftrat skal leggjast árliga reguleringin fyri árið fyri, ið vanliga kemur í oktober í inniverandi ári. Í ár er hon 12,3 mió.kr.

Skatturin av eftirlønarinngjøldum verður mettur 7,3 mió.kr hægri enn upprunaliga mett, og FAS/DIS/frádráttir verðar mettir at blíva 2,2 mió.kr hægri enn uppruna metingin.
Samanlagda metingin av meirinntøkunum fyri 2021 er sostatt 67 mió.kr.
Av mettu meirinntøkunum eru játtaðar 9,13 mió.kr. Aftan á hesar játtanir eru 57,87 mió.kr tøkar til komandi ár.

---

Fyri 2022 sigur nýggjasta metingin frá Fíggjarmálaráðnum av eftirlønarskattinum, at hesin verður 14,57 mió.kr hægri enn upprunaliga mett.

Í núverandi uppskoti til fíggjarætlan er hesin posturin 154,82 mió.kr, og verður her skotið upp at hækka talið til 169,39 mió.kr.
Inntøkur í samband við DIS/FAS/frádráttir verður nú mettar 413 tkr lægri enn upprunaliga mett.

Rentuútreiðslurnar verður mettar 1,43 mió.kr lægri enn í uppruna uppskotinum, og mælt verður tí til at lækka metingina fyri rentuútreiðslurnar hesa upphæddina 1,43 mió.kr.

Samanlagt hækka hesar tríggir postarnir 15,58 mió.kr.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, fyrisitingarstjórin og fíggjarleiðarin mæla til at hækka kontu 20801 Skattur av eftirlønarinngjøldum við 14,57 mió.kr, lækka kontu 20802 DIS, FAS og frádráttir við 413 tkr og lækka kontu 20301 Rentuútreiðslur TK við 1,43 mió.kr. Samanlagt 15,58 mió.kr.

**Fíggjarnevndin 24. november 2021:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein og Tróndur Sigurðsson tekur undir við tilmælinum og beinir fíggjarætlanina í býráðið við niðanfyristandandi broytingum í raksti og íløgum:

**Uppskot til broytingar í inntøkum og rakstri**

| Deild | Navn | Broyting |
|---|---|---|
| | **Inntøkur og rentur:** | |
| 20801 | Skattur af eftirlønarinngjøldum | 14.569 |
| 20802 | DIS, FAS og frádráttir | -413 |
| 20301 | Rentuútreiðslur TK | 1.425 |
| | **Hækking í inntøkum** | **15.581** |

| Deild | Navn | Broyting |
|---|---|---|
| | **Rakstur, lækkingar:** | |
| 1110 | Býráðið | 200 |
| 1310 | Býráðskrivstova | 200 |
| 1311 | Miðfyrisiting | 350 |
| 1312 | Trivnaðarfyrisiting | 300 |
| 1313 | Tekniska fyrisiting | 1.000 |
| 1317 | Heilsu- og umsorgarnarfyrisitingin | 200 |
| 2613 | Børn sett heiman í fosturfamilju | 1.000 |
| 2210 | Kommunulæknatænastur | 300 |
| 3211/3217 | Dygdarmenning | 500 |
| 3215 | Aðrar útreiðslur barnaansing | 2.100 |
| 3312 | Summararbeiði hjá skúlaungdómi | 2.000 |
| 5716 | Skoytubreyt | 874 |
| 6109 | Umsiting og røkt av bygningum | 1.000 |
| 7317 | Talgilding til borgaran | 600 |
| 7510 | Bussleiðin | 2.500 |
| | **Lækking íalt** | **13.124** |
| | | |
| **Deild** | **Flyting millum kontur:** | **Broyting** |
| 2460 | Stuðul til almannamál | -150 |
| 2461 | Stuðul til heilsu- og eldramál | 150 |

| | **Broyting** | **0** |
|---|---|---|
| **Deild** | **Brúkaragjøld:** | **Broyting** |
| 3213 | Systkinaavsláttur | -655 |
| 7110 | Renovatión | 1.000 |
| | **Hækking í alt** | **345** |
| **Deild** | **Rakstur, raðfestingar:** | **Broyting** |
| 8112 | Asfalt | 1.000 |
| §3 | Børn og ung, uppnormering brutto 10 mió. Kr. | 6.712 |
| | **Hækking í alt** | **7.712** |
| | | |
| | **Lækking í rakstri netto** | **5.757** |

| | | |
|---|---|---|
| | **Samlað broyting í rakstri, íroknað inntøkur** | **21.338** |

**Uppskot til íløguætlan**

| | | |
|---|---|---|
| | **§2 Almanna- og heilsumál** | **8.000.000** |
| 2375 | Tannlæknamiðstøð | 1.000.000 |
| 2775 | Nýtt røktarheim við røktaríbúðum | 6.000.000 |
| 2775 | Eldradepil í Kollafirði | 1.000.000 |
| | **§3 Børn og ung** | **34.000.000** |
| 3175 | Útbygging dagstovnurin á Hamrinum | 30.000.000 |
| 3175 | Tillagingar á dagstovnaøkinum | 4.000.000 |
| | **§4 Undirvísing** | **3.900.000** |
| 4175 | Dagføring av skúlum, Hoyvíkar skúli | 2.000.000 |
| 4175 | Dagføring av skúlum, Skúlin við løgmannabreyt | 1.900.000 |
| | **§5 Mentan og frítíð** | **94.500.000** |
| 5275 | Kvøldskúlin | 2.000.000 |
| 5475 | Býarbókasavn | 2.000.000 |
| 5775 | Tórsvøllur | 13.000.000 |
| 5775 | Fótbóltsvallir / Argir-Hoyvík | 10.000.000 |
| 5775 | Langhylur | 40.000.000 |
| 5775 | Skjótibreyt | 5.000.000 |
| 5775 | Golf | 4.500.000 |
| 5775 | Stórhøll | 10.000.000 |
| 5775 | Fimleikahøll/borgarahús í Kaldbak | 5.000.000 |
| 5775 | Gundadalshøllin | 1.000.000 |

| | | |
|---|---|---|
| 5775 | Innandura spælipláss | 1.000.000 |
| 5775 | Frælsur ítróttur | 1.000.000 |
| | **§6 Teknisk mál** | **83.100.000** |
| 6175 | Umsiting og røkt av fastari ogn - Keyp av Kurlu | 1.200.000 |
| 6175 | Umsiting og røkt av fastari ogn - Søla | -3.100.000 |
| 6177 | Fjarhitafelagið | 15.000.000 |
| 6177 | Orkupolitikkur - átøk | 8.000.000 |
| 6275 | Miðbýðarætlan | 8.000.000 |
| 6275 | Fríðkan av býnum | 5.000.000 |
| 6275 | Fríðkan, bygdir og økir | 2.000.000 |
| 6275 | Lendisgøtur | 4.000.000 |
| 6275 | Spælipláss, Grasagarð, Glaðsheygg, Nólsoy o.a. | 5.000.000 |
| 6275 | Viðarlundin, træplanting o.a. | 1.000.000 |
| 6275 | Vetrarfriðing í Kollafirði og Nólsoy | 1.000.000 |
| 6276 | Torg, Hoyvík | 1.000.000 |
| 6775 | Vatnreinsiverk í Havnardali | 1.000.000 |
| 6875 | Kloakkir | 8.000.000 |
| 8175 | Parkering | 3.000.000 |
| 8175 | Innkomuvegur | 10.000.000 |
| 8175 | Vegir | 8.000.000 |
| 8375 | Rakstrargøgn (Verkstaðið) | 5.000.000 |
| | **§7 Kommunal virki** | **25.000.000** |
| 7175 | Renevatión, skiljihøll | 7.000.000 |
| 7476 | Smábátahavn í Álakeri | 18.000.000 |
| | **Íløgur TK** | **248.500.000** |
| | | |
| 7475 | Tórshavnar Havn | 24.000.000 |
| | **Íløgur íalt** | **272.500.000** |

Ein minniluti, Elsa Berg og Annika Olsen, atkvøður blankt.

**Býráðsfundur 25. november 2021:** Fyrst varð atkvøtt um soljóðandi broytingaruppskot frá Anniku Olsen og Elsu Berg: Mælt verður til, at tær 57 mió kr. av meirinntøkunum í 2021, sum ikki eru brúktar, verða játtaðar soleiðis: Orkumál 12 míó kr, Vatnverkið 10 mió kr og Stórhøllin 35 mió kr.

Broytingaruppskotið fall við fimm atkvøðum fyri, einari blankari og sjey atkvøðum ímóti.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Jákup Dam, Turið Horn, Annika Olsen og Ruth Vang.

Blankt atkvøddi: Birgir Nielsen.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk og Bjørg Dam.

Síðani varð atkvøtt um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini og uppskot frá Heðini Mortensen um óbroytt kommunuskattaprosent á 19% og óbroyttan barnafrádrátt á kr. 8.000, og varð hetta uppskot samtykt við 12 atkvøðum fyri og einari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Turið Horn, Jákup Dam, Annika Olsen, Birgir Nielsen og Ruth Vang.

Ímóti atkvøddi: Elsa Berg.

Fíggjarætlanin fyri 2022 soleiðis samtykt við aðru viðgerð.

## 308/21 Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2021

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 17.02.2021 | 34/21 | 21/00010-1 |
| 2 Býráðsfundur | 25.02.2021 | 68/21 | 21/00010-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 17.03.2021 | 68/21 | 21/00010-1 |
| 4 Býráðsfundur | 25.03.2021 | 103/21 | 21/00010-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 21.04.2021 | 96/21 | 21/00010-1 |
| 6 Býráðsfundur | 29.04.2021 | 130/21 | 21/00010-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 19.05.2021 | 131/21 | 21/00010-1 |
| 8 Býráðsfundur | 27.05.2021 | 157/21 | 21/00010-1 |
| 9 Fíggjarnevndin | 16.06.2021 | 166/21 | 21/00010-1 |
| 10 Býráðsfundur | 23.06.2021 | 203/21 | 21/00010-1 |
| 11 Fíggjarnevndin | 22.09.2021 | 230/21 | 21/00010-1 |
| 12 Býráðsfundur | 30.09.2021 | 242/21 | 21/00010-1 |
| 13 Fíggjarnevndin | 20.10.2021 | 273/21 | 21/00010-1 |
| 14 Býráðsfundur | 28.10.2021 | 280/21 | 21/00010-1 |
| 15 Fíggjarnevndin | 17.11.2021 | 300/21 | 21/00010-1 |
| 16 Býráðsfundur | 25.11.2021 | 308/21 | 21/00010-1 |

**Upprunin til málið:**
Sambært kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommununnar o.t. §10 skulu kommunur innraportera roknskapardátur hvønn mánað til Fíggjarmálaráðið. Sambært § 9 skal kommunustýrið góðkenna.

**Lýsing av málinum – samandráttur**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/léttar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri januar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 17. februar 2021:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 25. februar 2021:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri februar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 17. mars 2021:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 25. mars 2021:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri mars verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 21. apríl 2021:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 29. apríl 2021:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri apríl verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 19. mai 2021:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 27. mai 2021:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri mai verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 16. juni 2021:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 23. juni 2021:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri juni, juli og august verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 22. september 2021:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 30. september 2021:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri september verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 20. oktober 2021:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 28. oktober 2021:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri oktober verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 17. november 2021:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 25. november 2021:** Framlagt og góðkent.

# 309/21 Eykajáttan til ávísar barnaverndarkontur 2020 - 2021

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin | 15.11.2021 | 78/21 | 21/04737-1 |
| 2 Trivnaðarnevndin | 23.11.2021 | 86/21 | 21/04737-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 24.11.2021 | 313/21 | 21/04737-1 |
| 4 Býráðsfundur | 25.11.2021 | 309/21 | 21/04737-1 |

**Upprunin til málið**
Eykajáttanartørvur á kontunum 2612 Barnavernd, konta 2613 Børn sett heiman í fosturfamilju, og konta 2617 Brúkaragjøld, serstovnar, tilsamans kr. 6,5 mió.

**Lýsing av málinum**
Sum kunnað um í trivnaðarnevndini í september, hava ávísar av barnaverndarkontunum meirnýtslu. Talan er um konturnar 2612 Barnavernd, 2613 Børn sett heiman í fosturfamilju, og 2617 Brúkaragjøld, serstovnar.

Niðanfyri er yvirlit yvir mettu meirnýtsluna fyri alt árið 2021. Í øllum trimum førum stavar ein partur av meirnýtsluni frá árinum 2020.

| *Tkr.* | Framroknað pr. okt/2021 | Framflyting 2020 | |
|---|---|---|---|
| 2612 Barnavernd | -988 | -483 | |
| 2613 Børn sett heiman í fosturfamilju | -2.164 | -1.021 | |
| 2617 Brúkaragjald, serstovnar | -1.256 | -599 | |
| | -4.408 | -2.103 | **-6.511** |

Talan er um lógarbundnar útreiðslur og kostnaðir í sambandi við umsorganaryvirtøkur og kostnaðir fyri fyribyrgjandi fyriskipanir sbrt. barnaverndarlógini.

Orsøkin til útreiðslugongdina sum heild síðstu árini er serliga eitt hækkandi tal av umsorganaryvirtøkum, ið síggjast aftur í kontu 2613 og kontu 2617. Hinvegin halda útreiðslurnar á kontu 2612 seg á sama støðið.

| *Tkr.* | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 mett |
|---|---|---|---|---|
| 2612 Barnavernd | 6.974 | 6.845 | 6.444 | 6.915 |
| 2613 Børn sett heiman í fosturfamilju | 12.844 | 15.747 | 18.073 | 18.648 |
| 2617 Brúkaragjald, serstovnar | 2.447 | 3.081 | 4.818 | 5.141 |

Hóast tiltøk eru gjørd at tálma útreiðsluvøksturin, hvat fyriskipanum viðvíkur, so má staðfestast, at yvirhøvur hevur fíggjarætlanin verið ov lágt sett. Fíggjarætlanaruppskotið 2022 er stillað eftir mettu kostnaðinum fyri 2021.

Trivnaðarnevndin hevur av teimum játtanum, sum nevndin varðar av, ikki møguleika at fíggja eykajáttanartørvin.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Barnaverndarlógin
Játtanarskipanin

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Eftirmeting av barnavernd

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☒ **Nei** ☐

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og sosialdeildarleiðarin mæla nevndini til at heita á fíggjarnevndina um at útvega fígging til eykajáttan viðvíkjandi nevndu kontum.

**Trivnaðarnevndin 15. november 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Víst verður til lýsing omanfyri av eykajáttanartørvinum á ávísum kontum innan barnavernd.

Skotið verður upp at fíggja størsta partin av tørvinum av kontum, sum í inniverandi fíggjarárið væntast at hava minninýtslu við ársenda, umframt av meirinntøkum.

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1110 | Býráðið | 300.000 | Minninýtsla |
| 1312 | Trivnaðarfyrisitingin | 100.000 | Minninýtsla |
| 2512 | Integratión | 500.000 | Minninýtsla |
| 2722 | Tilboð | 1.500.000 | Minninýtsla |
| 3211 | Námsfrøðilig ráðgeving | 400.000 | Minninýtsla |
| 3217 | Dygdarmenning | 400.000 | Minninýtsla |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 5312 | Mentanarhølir | 250.000 | Minninýtsla |
| 5313 | Múllers pakkhús | 350.000 | Minninýtsla |
| 7315 | Kommunuætlan | 450.000 | Minninýtsla |
| | Av meirinntøkum | 2.100.000 | |
| | **Tilsamans** | **6.350.000** | |

Skotið verður upp, at fíggingin verður býtt soleiðis út á nevndu barnaverndarkontur:

| | | |
|---|---|---|
| 2612 | Barnavernd | 1.425.000 |
| 2613 | Børn sett heiman í fosturfamilju | 3.100.000 |
| 2617 | Brúkaragjøld, serstovnar | 1.825.000 |
| | **Tilsamans** | **6.350.000** |

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og sosialdeildarleiðarin mæla til at játta tilsamans kr. 6.350.000 sambært yvirlitinum omanfyri sum eykajáttan til konturnar 2612 Barnavernd kr. 1.425.000, 2613 Børn sett heiman í fosturfamilju kr. 3.100.000, og 2617 Brúkaragjald, serstovnar kr. 1.825.000 og beina málið til tvær býráðsviðgerðir um fíggjarnevndina.

**Trivnaðarnevndin 23. november 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 24. november 2021:** Samtykt at taka undir við trivnaðarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. november 2021:** Einmælt samtykt við fyrstu viðgerð. Málið beint víðari til aðru viðgerð.

**FUNDURIN LOKIN KL. 21:30**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Heðin Mortensen | Annfinn Brekkstein | Tróndur Sigurðsson |
| Kári Johansen | Kristianna Winther Poulsen | Súna Mørk |
| Bjørg Dam | Elsa Berg | Jákup Dam |
| Annika Olsen | Birgir Nielsen | Ruth Vang |
| | Turið Horn | |